Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	27.03.2023
Mál nr.:	23/02502
Málsviðgjørt:	ABD
Ummælistíð:	06.02.2023 til 23.02.2023
Eftirkannað:	10.03.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)
(Ígildissetan av 4. og 5. hvítvaskdirektivi o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), sum broytt við § 42 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og § 7 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 1, nr. 1 verður aftan á "Realkredittstovnar" sett: "og Føroya Realkreditstovnur".

2. Í § 1, stk. 1, nr. 6 verður aftan á "ognarmeklarafyritøkur" sett: ", heruppií tá tey virka sum millumgongufólk í sambandi við útleigan av fastari ogn".

3. Í § 1, stk. 1, nr. 7 verður "og eksternir bókhaldarar" broytt til: ", eksternir bókhaldarar og ein og hvør annar persónur, ið átekur sær at veita hjálp, stuðul ella ráðgeving um skattaviðurskifti sum sítt mest týðandi vinnuliga virksemi".

4. Í § 1, stk. 1, nr. 9 verður "stk. 3" broytt til: "stk. 4".

5. Í § 1, stk. 1 verður sum nr. 10 sett:
"10) Fyritøkur og persónar, sum á vinnuligum grundarlagi varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií listasøvn og uppboðshús, har virðið á transaktiónum ella á eini røð av innanhýsum samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira."

6. Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 3.* § 34 a er galdandi fyri útlendskar deildir hjá føroyskum fyritøkum."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

7. Í § 2, nr. 8, litra g verður aftan á "stýrandi" sett: "í".

8. § 2, nr. 9 verður orðað soleiðis:
"9) Veruligur eigari: Tann ella teir likamligu persónar, sum endaliga eiga kundan ella stýra honum, ella tann ella teir likamligu persónar, hvørs vegna ein transaktión ella virksemi verður gjørt, heruppií:
a) Fyri feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir:
i) Tann ella teir likamligu persónar í einari løgfrøðiligari eind, sum endaliga beinleiðis ella óbeinleiðis eiga ella hava ræði á nóg stórum parti av eigarapørtunum ella atkvøðurættindunum, ella sum á annan hátt hava ræði, undantikið eigarar av feløgum, har eigarapartarnir verða handlaðir á einum skipaðum marknaði ella einum líknandi marknaði, sum hevur upplýsingarskyldu sambært ES-rættinum ella samsvarandi altjóða standardum.
ii) Dagliga leiðslan, um eingin persónur er eyðmerktur undir smáa rómartali i, eftir at allir møguleikar eru royndir, ella um ivi er um, um tann ella teir veruligu persónarnir, sum eru eyðmerktir, eru veruligu eigararnir.
b) Fyri trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir:
i) Stovnarin ella stovnararnir.
ii) Umsitarin ella umsitararnir.
iii) Verjin ella verjarnir.
iv) Serliga njótunartilskilaði ella, um teir einstaklingar, sum hava gagn av løgfrøðiligu skipanini ella løgfrøðiligu eindini, ikki eru kendir enn, tann bólkurin av persónum, sum hevur høvuðsáhuga í, at løgfrøðiliga skipanin ella eindin er stovnað ella virkar.
v) Ein og hvør annar likamligur persónur, sum endaliga hevur ræði á trustinum við beinleiðis ella óbeinleiðis ognarskapi ella á annan hátt hevur ræði.
c) Nevndin og tann ella teir likamligu persónarnir í grunnum, ið eru í samsvarandi ella líknandi støðu sum tey í litra b, smá rómartøl ii-v nevndu, við teimum neyðugu frávikunum við atliti at serligu eyðkennunum við grunnum."

9. Í § 2 verða sum nr. 13-15 sett:
"13) Trustur: Ein eind, sum ikki er ein løgfrøðiligur persónur, og sum er stovnað eftir ynski hjá stovnaranum um at flyta ognir til ein umsitara til fyrimuns fyri ein ella fleiri njótunartilskilaðar.
14) Líknandi løgfrøðilig skipan: Eitt slag av løgfrøðiligari skipan, sum hevur samsvarandi bygnað ella funktión sum ein trustur, og sum er stovnað eftir ynski hjá stovnaranum um at flyta ognir til ein persón, ið hevur eina støðu, ið svarar til starvið hjá einum umsitara av einum trusti.
15) Umsitari av einum trusti ella ein persónur, ið røkir eina samsvarandi støðu í einari líknandi løgfrøðiligari skipan: Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ið hevur ræði á ognunum hjá trustinum ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan í samsvari við leiðbeiningar frá stovnara."

10. Í § 3, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Talan er um hvítvask, sbr. stk. 1, hóast tær gerðir, sum hava ført til fíggjarliga vinningin ella peningin, ið

skal hvítvaskast, vórðu framdar í einum øðrum landi.”

11. Í § 7, stk. 3, § 25, stk. 1, 1. pkt., stk. 3, 1. og 2. pkt., og stk. 5, § 27, og § 34, stk. 2 verður “Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet” broytt til: “Hvidvasksekretariatet”.

12. Í § 9, nr. 1 verður aftan á “hóskandi tíðir,” sett: “heruppií tá fyritøkan ella persónurin í viðkomandi álmanakkaárinum løgfrøðiliga hevur skyldu til at seta seg í samband við kundan við tí fyri eyga at kanna eina og hvørja viðkomandi upplýsing viðvíkjandi tí ella teimum veruligu eigarunum,”

13. Í § 10, stk. 1, nr. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Við álítandi og óheftari keldu skilst eitt nú elektronisk eyðmerkingaramboð, viðkomandi álitistænastur ella eitthvørt annað trygt slag av fjareyðmerkingartilgongd ella elektronisk eyðmerkingartilgongd, ið skikkaðir myndugleikar í landinum hava regulerað, viðurkent, góðkent ella góðtikið.”

14. Í § 10, stk. 1, nr. 3, 2. pkt. verður aftan á “ein løgfrøðiligur persónur,” sett: “heruppií grunnur, ella ein ikki løgfrøðiligur persónur, heruppií ein trustur ella ein líknandi løgfrøðilig skipan,”.

15. Í § 10, stk. 1, nr. 3 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt 3.-5. pkt. sett:
“Er tann veruligi eigarin ein njótunartilskilaður av ognini hjá einum trusti ella eini líknandi løgfrøðiligari skipan, sbr. § 2, nr. 9, litra b, smátt rómartal iv, ella ognini hjá einum grunni ella eini líknandi løgfrøðiligari skipan, sbr. § 2, nr. 9, litra c, skal fyritøkan ella persónurin fremja tey tiltøk, ið nevnd verða í 1. pkt., í seinasta lagi tá útgjalding fer fram, ella tá móttakarin útinnir sín rætt. Verður tann dagliga leiðslan eyðmerkt sum veruligur eigari, skal fyritøkan ella persónurin fremja tey neyðugu hóskandi tiltøkini fyri at føra eftirlit við samleikanum hjá tí ella teimum likamligu persónunum, ið eru dagliga leiðsla kundans, sbr. § 2, nr. 9, litra a, smátt rómartal ii. Fyritøkan ella persónurin skulu varðveita upplýsingar um tiltøkini, ið eru sett í verk, og um møguligar íkomnar trupulleikar í sambandi við útinnanina av eftirlitinum.”

16. Í § 13, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Verður eitt handilssamband stovnað við eitt felag ella aðra løgfrøðiliga eind ella ein trust ella líknandi løgfrøðiliga skipan, sum hevur skyldu til at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya, skal fyritøkan ella persónurin fáa til vegar skrásetingarprógv ella ein úrdrátt av upplýsingunum í kt-skipan Skráseting Føroya.”

17. Í § 14 verður “§ 13, stk. 5” broytt til: “§ 13, stk. 4”.

18. Aftan á § 14 verður sett:

“**§ 14 a.** Fær ein fyritøka ella persónur kunnleika til, at upplýsingarnar um veruligu eigararnar hjá kundanum, sum eru fingnar til vegar sambært hesum kapitli, ikki eru í samsvari við upplýsingarnar um veruligu eigararnar hjá kundanum, ið eru skrásettar í kt-skipan Skráseting Føroya, skal ósamsvarið og skjalprógv fyri hesum fráboðast Skráseting Føroya skjótast til ber.
Stk. 2. Fær ein skikkaður myndugleiki kunnleika til ósamsvar í upplýsingunum um veruligu eigararnar, ið eru skrásettar í kt-skipan

Skráseting Føroya, og tær upplýsingar um veruligu eigaraviðurskiftini, ið eru tøkar hjá myndugleikanum, skal ósamsvarið og skjalprógv fyri hesum fráboðast Skráseting Føroya skjótast til ber. Hetta er tó ikki galdandi, um tað í óneyðugan mun ger inntriv í virksemið hjá myndugleikanum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu tann tekniski parturin av fráboðanarskylduni verður lokin."

19. § 16, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar skulu gera herdar kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum stendur á yvirlitinum hjá Evropa-kommissiónini yvir triðjalond, har mett verður, at øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi. Tær herdu kundakunnleikamannagongdirnar skulu fevna um fylgjandi:

1) At fleiri upplýsingar verða útvegaðar um kundan og veruligar eigarar.
2) At fleiri upplýsingar verða útvegaðar um ætlaða slagið av handilssambandi.
3) At upplýsingar verða útvegaðar um, hvar peningurin og ognirnar stava frá, og hvar keldan til ognirnar hjá kundanum og veruliga eigaranum stava frá.
4) At upplýsingar verða útvegaðar um orsakirnar til tær ynsktu ella framdu transaktiónirnar.
5) At góðkenning við stovnan ella framhaldi av handilssambondum hjá tí persóni, ið er tilnevndur eftir § 6, stk. 2, verður útvegað.
6) At herða eftiransan við kundasambandinum við at økja um mongdina av kanningum og velja transaktiónsmynstur burturúr, sum tørva neyvari eftirkanning."

20. Í § 16 verður aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 3.* Afturat tiltøkunum, ið verða nevnd í stk. 2, skulu fyritøkur og persónar seta í verk eitt ella fleiri váðaavmarkandi tiltøk, tá likamligir persónar ella løgfrøðiligar eindir fremja transaktiónir, ið fata um lond, sum standa á listanum hjá Evropa-kommissiónini yvir triðjalond, har mett verður, at øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi. Hesi tiltøk skulu fevna um eitt ella fleiri av fylgjandi tiltøkum:

1) Nýta ískoytispartar av herdum kundakunnleikamannagongdum.
2) Seta í verk viðkomandi herdu fráboðanarmekanismur ella regluliga fráboðan av fíggjarligum transaktiónum.
3) Avmarka handilssambond ella transaktiónir við likamligar persónar ella løgfrøðiligar eindir í londum, ið eru eyðmerkt sum triðjalond, har øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Stk. 4. Afturat tiltøkunum, ið verða nevnd í stk. 3, skulu fyritøkur og persónar, í sambandi við handilssambond ella transaktiónir, ið fata um lond, sum standa á listanum hjá Evropa-kommissiónini yvir triðjalond, har øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, tá tað verður mett viðkomandi, tryggja, at fyrsta gjaldið verður framt gjøgnum eina kontu í navninum á kundanum í einum kredittstovni, ið skal lúka krøv um kundakunnleikamannagongdir, sum í minsta lagi svara til tær kundakunnleikamannagongdirnar, ið eru settar í hesi løgtingslóg."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 5.

21. § 17, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Listin hjá Fíggjareftirlitinum yvir persónar, sum eru fevndir av § 2, nr. 8 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme, er somuleiðis galdandi fyri persónar, sum

eru fevndir av § 2, nr. 8, í hesi løgtingslóg.”

22. Í § 18, stk. 1 verður “korrespondentsambandi, sum fer um landamørk, við respondentar frá londum” broytt til: “korrespondentsambandi, sum fer um landamørk, ið umfatar gjaldingar við einum respondentstovni”.

23. Í § 21, stk. 3 verður aftan á “umframt onnur týðandi skjalprógv” sett: “og dátur”.

24. Heitið á kapitli 5 verður orðað soleiðis:
“**Kanningarskylda, noteringsskylda, fráboðanarskylda, upplýsingarskylda og varðveitsluskylda**”

25. § 24, stk. 1 verður strikað, og í staðin verður sett:
“Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi løgtingslóg, skulu kanna bakgrundina fyri og endamálið við:
1) Øllum transaktiónum, sum:
   a) eru torgreiddar,
   b) eru óvanliga stórar,
   c) verða framdar í einum óvanligum mynstri, ella
   d) ikki hava eitt klárt fíggjarligt ella lógligt endamál.
2) Øllum óvanligum virksemi, sum ikki hevur eitt klárt fíggjarligt ella lógligt endamál.

Stk. 2. Fyritøkur og persónar skulu, har tað hevur týdning, víðka eftiransingina við kundanum við tí endamáli at staðfesta, um transaktiónirnar ella virksemið sýnast illgrunasom.”
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

26. Í § 24, stk. 3, sum verður stk. 4, verður “stk. 1 og 2” broytt til: “stk. 1-3”.

27. § 28 verður orðað soleiðis:

“**§ 28.** Hvidvasksekretariatet hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet er fregnartænasta í málum eftir hesi løgtingslóg. Ásetingarnar um Hvidvasksekretariatet í § 29, stk. 1 og 2, í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme eru somuleiðis galdandi í málum eftir hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Hvidvasksekretariatet hevur í samstarvi við aðrar myndugleikar ábyrgdina av at gera og dagføra váðametingar á hvítvaskøkinum við atliti til at eyðmerkja, meta um, skilja og avmarka aktuellar vandar fyri hvítvask av peningi.
Stk. 3. Hvidvasksekretariatet kann krevja allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at røkja uppgávurnar sambært stk. 1 við atliti til at fyribyrgja, uppdaga og munadygt stríðast ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi, frá fyritøkum og persónum, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, uttan so at fyritøkan ella persónurin sambært § 26, stk. 1-3 eru undantikin fráboðanarskylduni. Eftir áheitan frá Hvidvasksekretariatet skulu fyritøkur og persónar fevndir av hesi løgtingslóg beinanvegin geva Hvidvasksekretariatet allar neyðugar upplýsingar.
Stk. 4. Um atlit til rannsakanina ikki tala ímóti hesum, kann Hvidvasksekretariatet geva fyritøkuni, persóninum ella myndugleikanum, sum sambært § 25, stk. 1 ella § 27 hava latið inn fráboðan, boð um støðuna í málinum, heruppií um skuldseting er reist, um ein endalig avgerð er tikin, ella um málið er lagt til viks.
Stk. 5. Fráboðanir, sum eru móttiknar sambært stk. 4, mugu ikki latast víðari til óviðkomandi.”

28. Aftan á § 28 verður sett:

“**§ 28 a.** Hvidvasksekretariatet kann í sambandi við, at upplýsingar verða latnar víðari til fregnartænastuna á

fíggjarliga økinum í einum ES-landi, áseta avmarkingar og treytir fyri nýtsluna av hesum upplýsingunum.
Stk. 2. Hvidvasksekretariatet skal beinanvegin svara og í mest møguligan mun ganga einari áheitan á møti frá einari fregnartænastu á fíggjarliga økinum í einum ES-landi um loyvi til at lata upplýsingar víðari til skikkaðar myndugleikar ella stovnar, sum viðkomandi fregnartænasta hevur fingið frá Hvidvasksekretariatet, uttan mun til slagið av undirliggjandi lógarbroti, ið er knýtt afturat. Hvidvasksekretariatet kann ikki í tí sambandi nokta at ganga einari slíkari áheitan á møti, uttan so at endamálið við at lata upplýsingarnar víðari liggur uttanfyri tær uppgávurnar, sum eru lýstar í § 29, stk. 2, í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme, ella at ávísar orsakir eru til at halda, at tað kann hava við sær, at tað verður truplari at fyribyrgja, uppklára ella kanna revsiverdar gerðir ella fremja revsirættarlig tiltøk ella á annan hátt ikki er í samsvari við grundleggjandi meginreglur í føroyskum rætti.
Stk. 3. Ein hóskandi grundgeving skal fyriliggja, tá tað verður sýtt fyri at ganga áheitanum sambært stk. 2 á møti.
Stk. 4. Hvidvasksekretariatet skal yvirhalda møguligar ásettar avmarkingar og treytir fyri nýtslu av upplýsingum, sum Hvidvasksekretariatet fær frá einari fregnartænastu á fíggjarliga økinum í einum ES-landi. Hvidvasksekretariatet kann soleiðis bert nýta slíkar upplýsingar til tey endamál, sum upplýsingarnar eru útflýggjaðar til. Bert um fregnartænastan á fíggjarliga økinum í ES-landinum, sum hevur latið upplýsingarnar, frammanundan hevur givið samtykki til hetta, kann Hvidvasksekretariatet lata slíkar upplýsingar til skikkaðar myndugleikar ella stovnar ella nýta hesar upplýsingar til onnur endamál."

29. Í § 29, stk. 1, nr. 3 verður "§ 24 stk. 1 og 2" broytt til: "§ 24, stk. 1 og 3".

30. Í § 29 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Upplýsingar, skjøl og skrásetingar, sum nevnd í stk. 1, skulu latast víðari, tá Hvidvasksekretariatet ella aðrir skikkaðir myndugleikar venda sær til fyritøkur og persónar, fevnd av løgtingslógini, fyri at fáa upplýst, um hesi hava, ella tey seinastu 5 árini áðrenn fyrispurningin, hava havt handilssambond við nærri tilskilaðar persónar, og hvar hesi sambond eru ella hava verið. Víðarilatanin skal fara fram gjøgnum tryggar rásir og á ein hátt, ið tryggjar fullan trúnað um kanningarnar."

31. Aftan á § 30 verður sett:

"**§ 30 a.** Tann myndugleikin, ið hevur eftirlit við, at ein fyritøka ella persónur yvirheldur hesa løgtingslóg, kann nokta, at dótturfelag, deild ella umboðsstova hjá fyritøkum og persónum, ið hava heimstað í einum landi, ið stendur á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir triðjalond, sum eru í øktum vanda fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, verður stovnað í Føroyum.
Stk. 2. Tann myndugleiki, ið hevur eftirlit við, at ein fyritøka ella persónur yvirheldur hesa løgtingslóg, kann áseta reglur um, at fyritøkur og persónar, ið hava heimstað í einum landi, ið stendur á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir triðjalond, sum eru í øktum vanda fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, einans kunnu stovna eitt dótturfelag, deild ella umboðsstovu í Føroyum undir serligum treytum.

§ 30 b. Fyritøkur og persónar, fevnd av løgtingslógini, ið ynskja at stovna eina deild ella eina umboðsstovu í einum

landi, ið stendur á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir triðjalond, sum eru í øktum vanda fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, skulu geva tí myndugleika, ið hevur eftirlit við, at fyritøkan ella persónurin heldur hesa løgtingslóg, boð um hetta, umframt hesar upplýsingar:

1) Í hvørjum landi deildin ella umboðsstovan ynskir at verða stovnað.
2) Eina lýsing av virkseminum hjá deildini ella umboðsstovuni, undir hesum upplýsingar um bygnað og tað ætlaða virksemið.
3) Bústað hjá deildini ella umboðsstovuni.
4) Nøvnini á limunum í leiðsluni á deildini ella umboðsstovuni.

Stk. 2. Tann myndugleikin, ið hevur eftirlit við, at fyritøkan ella persónurin heldur hesa løgtingslóg, kann forbjóða fyritøkuni ella persóninum at stovna deildir ella umboðsstovur í einum landi, ið stendur á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir triðjalond, sum eru í øktum vanda fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Stk. 3. Tann myndugleiki, ið hevur eftirlit við, at ein fyritøka ella persónur yvirheldur hesa løgtingslóg, kann áseta reglur um, at fyritøkan ella persónurin skal taka hædd fyri, at tann ávísa deildin ella umboðsstovan fer at halda til í einum landi, ið ikki hevur nøktandi skipanir til tess at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi."

32. Aftan á § 32 verður í kapittul 6 sett:

"**§ 32 a.** Landsstýrismaðurin kann tilnevna ein myndugleika, sum hevur ábyrgdina av at almannakunngera nøvnini hjá likamligum og løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, ið eru sett á listar hjá ST yvir tiltøk. Nøvnini verða kunngjørd á heimasíðuni hjá myndugleikanum.

Stk. 2. Eitt navn, sum er almannakunngjørt sambært stk. 1, verður strikað av heimasíðuni hjá føroyska myndugleikanum, um navnið verður sett á eitt rættarskjal frá Evropeiska Samveldinum, sum er kunngjørt í ES-tíðindum, um avgerð verður tikin um, at navnið ikki skal verða sett á eitt slíkt ES-rættarskjal, ella um navnið verður strikað frá listanum hjá ST yvir tiltøk.

Stk. 3. Fyritøkur og persónar, fevnd av hesi løgtingslóg, hava skyldu til uttan óneyðugt drál at frysta ognir, sum eru ogn ella í varðveitslu hjá likamligum ella løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, hvørs nøvn eru almannakunngjørd á heimasíðuni hjá tí føroyska myndugleikanum sambært stk. 1. Skyldan at frysta ognir dettur burtur, um tann likamligi ella løgfrøðiligi persónurin, bólkurin ella eindin verða strikað av heimasíðuni."

33. Í § 33, stk. 1, 1. pkt., og § 34, stk. 1 verður "nr. 5-9" broytt til: "nr. 5-10".

34. Í § 33, stk. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fyritøkur og persónar skulu syrgja fyri, at fráboðanir til skipanina verða fylgdar upp, og skrivligt kunna skjalprógva, hvussu fráboðanirnar eru fylgdar upp."

35. Aftan á § 33 verður sett:

"**§ 33 a.** Ger ein fyritøka ella ein persónur, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 5-9, eina avtalu við einari treyt um tagnarskyldu við eitt starvsfólk ella fyrrverandi starvsfólk, skal tað standa í avtaluni, at avtalan ikki er til hindurs fyri, at starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið gevur almennum myndugleikum fráboðan um upplýsingar um brot ella møgulig brot á hesa løgtingslóg ella reglur, ásettar við heimild í løgtingslógini.

Stk. 2. Hóast stk. 1, er einki til hindurs fyri, at starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið gevur almennum

myndugleikum fráboðan um upplýsingar um brot ella møgulig brot á fíggjarligu lóggávuna, sjálvt um eitt slíkt forboð er partur av avtaluni millum starvsfólkið og fyritøkuna ella persónin. Sama er galdandi fyri fráboðan til skipanir eftir § 33."

36. Í § 34, stk. 1 verður "Starvsfólk" broytt til: "Starvsfólk ella fyrrverandi starvsfólk", og "starvsfólkið" broytt til: "starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið".

37. Í § 34, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Tað sama er galdandi fyri ásetan, tillutan og útgjaldi av skiftandi løn til starvsfólk ella fyrrverandi starvsfólk."

38. Í § 34, stk. 2 verður "starvsfólki" broytt til: "starvsfólki ella fyrrverandi starvsfólki", og "starvsfólkið" broytt til: "starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið".

39. Í § 34, stk. 3, 1. pkt. verður "Starvsfólk" broytt til: "Starvsfólk ella fyrrverandi starvsfólk".

40. Í § 34, stk. 3, 2. pkt. verður "starvsfólkið" broytt til: "starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið".

41. Aftan á § 34 verður í kapittul 7 sett:

"**§ 34 a.** Tann dagliga leiðslan í fyritøkum, ið eru fevndar av § 1, stk. 1, skal uttan óneyðugt drál geva evstu leiðsluni í fyritøkuni fráboðan um ávaringar um hvítvask og fígging av yvirgangi, sum eru móttiknar frá øðrum, heruppií útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum og ráðgevum umframt varskógvarum.
Stk. 2. Á sama hátt skulu lyklapersónar í fyritøkum, ið eru fevndar av § 1, stk. 1, uttan óneyðugt drál geva dagligu ella evstu leiðsluni fráboðan um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, sum eru móttiknar frá øðrum, heruppií útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum og ráðgevum umframt varskógvarum. Fær dagliga leiðslan eina fráboðan frá starvsfólkum um eina móttikna ávaring, skal tann dagliga leiðslan geva fráboðanina um ávaringina víðari til evstu leiðsluna í fyritøkuni."

42. Í § 36, stk. 1-6 verður "í verk eftir § 25, stk. 1" broytt til: "í verk eftir § 24, stk. 1".

43. Aftan á § 36 verður í kapittul 8 sett:

"**§ 36 a.** Starvsfólk, ið virka innan almennu umsitingina, hava skyldu til undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini at halda upplýsingar loyniligar, sum stava frá eini fráboðan eftir § 25.
Stk. 2. § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgevingarskyldu og §§ 27 og 30 um víðarilatan av upplýsingum millum fyrisitingarmyndugleikar í løgtingslóg um fyrisitingarlóg, eru ikki galdandi fyri upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1."

44. Aftan á § 36 a verður sum kapittul 8 a sett:

"**Kapittul 8 a**
Trustur og líknandi løgfrøðilig skipan, ið eru stovnað sambært lóggávu í øðrum londum

§ 36 b. Umsitarin av einum trusti ella ein persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal innheinta og varðveita upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum sambært § 36 d, heruppií upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum, tá umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt líknandi starv,

er stovnaður ella hevur bústað í Føroyum.

Stk. 2. Er umsitarin av einum trusti ella ein persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari løgfrøðiligari skipan, stovnaður ella hevur bústað uttan fyri ES, skal umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv, innheinta og varðveita upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, heruppií upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum, tá umsitarin hjá trustinum ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan:

1) stovnar eitt handilssamband sambært § 2, nr. 3, í navninum á trustinum ella tí samsvarandi løgfrøðiligu skipanini, ella
2) ognar sær fastogn í navninum á trustinum ella teirri samsvarandi løgfrøðiligu skipanini.

Stk. 3. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal skráseta upplýsingarnar eftir stk. 1 ella 2 í kt-skipan Skráseting Føroya, skjótast gjørligt eftir at umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv, hevur fingið kunnleika til, at ein persónur er vorðin veruligur eigari. Ein og hvør broyting av teimum upplýsingum, sum eru skrásettar um teir veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast gjørligt, eftir at umsitarin av trustinum ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, hevur fingið kunnleika til broytingina.

Stk. 4. Eru umsitararnir av trustinum ella persónarnir, ið røkja eitt líknandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, stovnaðir ella búsitandi í ymiskum ES-londum, ella stovnar ein umsitari ella ein persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv, fleiri handilssambond í navninum á trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini í ymiskum ES-londum, kann eitt skrásetingarprógv ella ein úrdráttur av upplýsingunum um veruligan eigaraskap frá skránni hjá einum ES-limalandi koma í staðin fyri skráseting av veruligu eigarunum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini í kt-skipan Skráseting Føroya.

Stk. 5. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal í minsta lagi einaferð árliga eftirkanna, um broytingar eru í teimum skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu eindini.

Stk. 6. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal varðveita skjalprógv fyri teimum upplýsingunum, ið eru innheintaðar um veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, í 5 ár eftir, at tann veruligi eigaraskapurin heldur uppat. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal harumframt varðveita skjalprógv fyri teimum upplýsingunum, ið eru innheintaðar um royndirnar at eyðmerkja veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, í 5 ár eftir royndina at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Stk. 7. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal eftir áheitan útflýggja Hvidvasksekretariatet upplýsingar um veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, heruppií um umsitaran ella persónin, ið røkir eitt samsvarandi starv, royndirnar at eyðmerkja veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu eindini. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi

løgfrøðiligari skipan, skal harumframt eftir áheitan útflýggja tær nevndu upplýsingarnar til aðrar skikkaðar myndugleikar, tá hesir myndugleikarnir meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri at røkja teirra eftirlitsuppgávur og eftiransingaruppgávur.
Stk. 8. Hvidvasksekretariatet og aðrir skikkaðir myndugleikar kunnu uttan kostnað geva upplýsingar um veruligar eigarar, ið eru skrásettar sambært stk. 3, ella innheintaðar sambært stk. 7, víðari til skikkaðar myndugleikar og fíggarligar fregnartænastur í ES-londum.
Stk. 9. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um skráseting, atgongd og almannakunngerð av upplýsingum sambært stk. 1-4 og 6 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal skráseta í kt-skipanini.

§ 36 c. Sum veruligur eigari av einum trusti ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan er at rokna tann ella teir likamligu persónarnir, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði á trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini ella á annan hátt hava heimildir, sum minna um eigaraskap, heruppií:

1) stovnarar,
2) umsitarar ella persónar, ið røkja eitt samsvarandi starv,
3) verjar, um hesir eru at finna, og
4) serliga njótunartilskilaðir persónar ella, um trusturin ella líknandi løgfrøðiliga skipanin ikki kenna teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, í hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað ella virkar.

§ 36 d. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eina samsvarandi støðu í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, sum skal innheinta, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligar eigarar sambært § 36 b, skal fráboða persónum og fyritøkum, sum sambært hesi løgtingslóg skulu gera kundakunnleikamannagongdir, um sína støðu og rættstundis geva upplýsingar um eigaraviðurskifti hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini, tá ið umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv, stovnar handilssambond ella útinnir hissini transaktiónir vegna trustin ella ta líknandi løgfrøðiligu skipanina, sum fara upp um støddarmørkini sambært § 9.
Stk. 2. Fær Skráseting Føroya fráboðan um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum eftir § 14 a um veruligu eigararnar av einum trusti ella eini líknandi løgfrøðiligari skipan, setur Skráseting Føroya eina kanning í verk av hesum viðurskiftunum, sbr. § 36 b, stk. 7 og § 36 f, stk. 1.
Stk. 3. Skráseting Føroya kann samstundis sum kanningin eftir stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv, skal hava møguleika til at mótmæla frágreiðingina, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngerð av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið.

§ 36 e. Skráseting er ikki loyvd, um tað, ið eftir ætlan skal skrásetast, ikki lýkur treytirnar eftir hesi løgtingslóg, eftir reglum, ið eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg ella eftir viðtøkunum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini. Skráseting er heldur ikki loyvd, um avgerðin, ið er grundarlag fyri skrásetingini, ikki er tikin í samsvari við ásetingar í hesi

løgtingslóg, við reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg ella við tað, sum ásett er í viðtøkunum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini.
Stk. 2. Fráboðari, sum skrásetur viðurskifti í kt-skipan Skráseting Føroya, ella, sum letur inn fráboðan um hesi viðurskifti til kt-skipan Skráseting Føroya, stendur til svars fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd, heruppií at hóskandi fulltrú er tøk, og at skjalprógvini í sambandi við skrásetingina ella fráboðanina eru galdandi.
Stk. 3. Stk. 1 og 2 eru eisini galdandi fyri skjøl o.a., sum verða almannakunngjørd í kt-skipan Skráseting Føroya, ella skjøl, sum verða latin Skráseting Føroya at almannakunngera o.a. eftir hesi løgtingslóg.

§ 36 f. Skráseting Føroya kann sum skrásetingarmyndugleiki krevja tær upplýsingar, ið eru neyðugar, til tess at taka støðu til, um løgtingslógin, reglur, ásettar við heimild í løgtingslógini, og viðtøkurnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini eru hildnar.
Stk. 2. Við skráseting og fráboðan eftir reglum, ásettar við heimild í hesum kapitli, kann Skráseting Føroya í upp í 5 ár eftir dagfestingina av skrásetingini krevja váttan fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd. Verða treytirnar í 1. pkt. ikki loknar, ásetur Skráseting Føroya eina freist at vátta hesi viðurskifti."

45. Í § 37, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Hetta er tó ikki galdandi fyri § 34."

46. Í § 38, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Upplýsingar, sum hava stóran týdning fyri eftirlitið hjá Tryggingareftirlitinum, skulu latast beinanvegin og uttan at biðið er um tær frammanundan."

47. Í § 38 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Fyritøkur og persónar, sum hava latið upplýsingar eftir stk. 1, skulu skjótast gjørligt rætta upplýsingarnar, sum eru latnar Tryggingareftirlitinum, um fyritøkan ella persónurin eftirfylgjandi staðfestir fylgjandi:
1) Upplýsingarnar vóru ikki rættar, tá tær vórðu latnar.
2) Upplýsingarnar eru seinni vorðnar misvísandi."

Stk. 2-5 verða eftir hetta stk. 3-6.

48. Í § 38, stk. 5, sum verður stk. 6, verður "stk. 1 og 4" broytt til: "stk. 1 og 5".

49. Í § 38 verður sum stk. 7 sett:
"*Stk. 7.* Tryggingareftirlitið kann áseta nærri reglur um innlating av upplýsingum, sum eru neyðugar, tá Tryggingareftirlitið skal gera váðametingar av fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av hesi løgtingslóg."

50. Aftan á § 40 verður sett:

"**§ 40 a.** Tryggingareftirlitið kann áleggja einari fyritøku ella persóni, ið er fevndur av § 1, stk. 1, nr. 1-4, ikki at fáa sær nýggj kundaviðurskifti, tá ið eitt álvarsamt brot á ásetingar í hesi lóg ella reglur ásettar sambært løgtingslógini er staðfest. Er brotið heilt ella partvís framt í einari útlendskari deild hjá einari fyritøku, kann áleggingin víðkast til at fevna um deildina.
Stk. 2. Ein álegging eftir stk. 1 heldur uppat, tá fyritøkan ella persónurin mótvegis Tryggingareftirlitinum skjalprógvar, at brotið er hildið uppat."

51. Í § 43, stk. 1, 1. og 2. pkt. verður "stk. 5" broytt til: "stk. 6".

52. Í § 43, stk. 1, 3. pkt. verður "stk. 2" broytt til: "stk. 3".

53. Í § 43 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Almannakunngjørd tiltøk verða verandi á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum í 5 ár eftir almannakunngeringina. Persónsupplýsingar, fevndar av almannakunngeringini, mugu tó ikki verða verandi á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum í longri tíð enn neyðugt."
Stk. 2-5 verða eftir hetta stk. 3-6.

54. Í § 43, stk. 4, 1. pkt., sum verður stk. 5, 1. pkt., verður "stk. 5" broytt til: "stk. 6".

55. Í § 43, stk. 5, 1. pkt., sum verður stk. 6, 1. pkt., verður "stk. 1-4" broytt til: "stk. 1 og 3-5".

56. Aftan á § 44, men áðrenn yvirskriftina yvir § 45, verður sett:

"**§ 44 a.** Starvsfólk hjá Tryggingareftirlitinum mugu ikki lata upplýsingar víðari um ein persón, tá hesin hevur latið Tryggingareftirlitinum fráboðan um eina fyritøku ella persón fyri brot ella møguligt brot á hesa løgtingslóg, reglur givnar sambært løgtingslógini ella lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at persónsupplýsingar verða latnar víðari sambært § 44, stk. 3.
Stk. 3. Øll, sum sambært stk. 2 móttaka persónsupplýsingar, sbr. tó § 44, stk. 5, eru við atliti at hesum upplýsingum áløgd ta í stk. 1 umrøddu tagnarskyldu."

57. Í § 45, stk. 1, § 47, stk. 1 og 2 og § 48 verður "nr. 5-8" broytt til: "nr. 5-8 og 10".

58. Í § 45, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Hetta er tó ikki galdandi fyri § 34."

59. § 46, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Skráseting Føroya kann taka aftur skrásetingina av eini fyritøku ella persóni eftir stk. 1, um nýggir limir í evstu ella dagligu leiðsluni í fyritøkuni ella nýggir veruligir eigarar av fyritøkuni ikki geva Skráseting Føroya tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at Skráseting Føroya kann meta um, hvørt hesar eru fevndar av stk. 2 ella 3."

60. Í § 46 verður sum stk. 8 sett:
"*Stk. 8.* Skráseting Føroya kann taka aftur skrásetingina av eini fyritøku ella persóni eftir stk. 1, um fyritøkan ella persónurin ger seg sekan í grovum ella endurtakandi brotum á hesa løgtingslóg."

61. Í § 50, stk. 1, 1. pkt. og stk. 4, 1. pkt. verður "stk. 5" broytt til: "stk. 6".

62. § 50, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Avgerðir um at lata løgregluni mál til eftirkanningar almannakunngerast sum samandráttur, sbr. tó stk. 6."

63. Í § 50, stk. 1, 3. pkt. verður "stk. 2" broytt til: "stk. 3".

64. Í § 50 verður aftan á stk. 1 sum nýtt sett:
"*Stk. 2.* Almannakunngjørd tiltøk verða verandi á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya í 5 ár eftir almannakunngeringina. Persónsupplýsingar, fevndar av almannakunngeringini, mugu tó ikki verða verandi á heimasíðuni hjá

Skráseting Føroya í longri tíð enn neyðugt.”
Stk. 2-7 verða eftir hetta stk. 3-8.

65. Í § 50, stk. 3, 3. pkt., sum verður stk. 4, 3. pkt., verður “Tryggingareftirlitinum” broytt til: “Skráseting Føroya”.

66. Í § 50, stk. 5, 1. pkt. og stk. 6, 1. pkt., sum verða stk. 6, 1. pkt. og stk. 7, 1. pkt., verður “stk. 1-4” broytt til: “stk. 1-5”.

67. Í § 50, stk. 6, 1. pkt., sum verður stk. 7, 1. pkt. verður “stk. 5, 1. pkt.” broytt til: “stk. 6, 1. pkt.”.

68. Í § 51, stk. 3 verður aftan á nr. 3 sum nýtt nr. sett:
“4) TAKS, tá víðarilating fer fram fyri at TAKS kann kanna møgulig brot á tolllóggávuna, avgjaldslóggávuna og skattalóggávuna.”
Nr. 4-14 verða eftir hetta nr. 5-15.

69. Í § 51, stk. 4 verður “stk. 3, nr. 14” broytt til: “stk. 3, nr. 15”.

70. Í § 51, stk. 5 verður “nr. 1-13” broytt til: “nr. 1-14”.

71. Í § 51, stk. 6 verður “stk. 3, nr. 1, 2, 7, 8, 10, 12, 13 og 14” broytt til: “stk. 3, nr. 1, 2, 8, 9, 11 og 13-15”.

72. Aftan á § 51 verður í kapittul 9 sett:

“**§ 51 a.** Starvsfólk hjá Skráseting Føroya mugu ikki lata upplýsingar víðari um ein persón, tá hesin hevur latið Skráseting Føroya fráboðan um eina fyritøku ella persón fyri brot ella møguligt brot á hesa løgtingslóg, reglur sambært løgtingslógini ella lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler, sbr. tó stk. 2.

Stk. 2. Stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at persónsupplýsingar verða latnar víðari sambært § 51, stk. 3.
Stk. 3. Øll, sum sambært stk. 2 móttaka persónsupplýsingar, sbr. tó § 51, stk. 5, eru við atliti at hesum upplýsingum áløgd ta í stk. 1 umrøddu tagnarskyldu.

TAKS

§ 51 b. TAKS kann hóast § 151 í skattalógini lata upplýsingar víðari til myndugleikar, sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, um upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri uppgávuna hjá myndugleikunum at fyribyrgja og forða fyri hvítvask og fígging av yvirgangi.
Stk. 2. Biður ein myndugleiki, ið luttekur í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, um upplýsingar frá TAKS, skal TAKS hóast § 151 í skattalógini, lata víðari upplýsingarnar, um upplýsingarnar hava týdning fyri uppgávuna hjá myndugleikanum at fyribyrgja ella forða fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.”

73. Aftan á § 55 verður í kapittul 10 sett:

“**§ 55 a.** Persónar, ið virka innan almennu fyrisitingina, og sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, hava undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini skyldu til at halda trúnaðarupplýsingar, sum verða móttiknar í sambandi við samstarvið, loyniligar, sbr. tó stk. 3.
Stk. 2. Tagnarskyldan í stk. 1 er eisini galdandi í mun til tann likamliga ella løgfrøðiliga persónin, sum upplýsingarnar viðvíkja, hóast eina møguliga rættarliga skyldu at lata upplýsingarnar víðari til viðkomandi sambært ásetingunum í fyristingarlóggávuni ella dátuverndarlóggávuni, sbr. tó stk. 3.

Stk. 3. Upplýsingar, fevndar av stk. 1, kunnu eftir samtykki frá tí myndugleikanum, sum hevur latið upplýsingarnar, verða partur av málsviðgerðini hjá tí móttakandi myndugleikanum. Fyriliggur eitt samtykki, eru ásetingarnar, sum vanliga eru galdandi fyri tann móttakandi myndugleikan, og sum vikið er frá sambært stk. 1 og 2, aftur galdandi."

74. Í § 59, stk. 1, 1. pkt. verður "stk. 3, 1.-4. pkt." broytt til: "stk. 4, 1.-4. pkt."

75. § 59, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Tilætlað brot ella brot framd av grovum ósketni á § 5, § 6, stk. 1 og 2, § 7, stk. 1-4 og 6, §§ 8 og 9, § 10, stk. 1 og 2, og stk. 3, 1., 3. og 4. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., stk. 3, stk. 4, 2. pkt., og stk. 5, §§ 14 og 15, § 16, stk. 1-4, §§ 17-19, § 20, stk. 1, 2. pkt., § 21, stk. 2 og 3, § 24, stk. 1-3, § 25, stk. 1 og 3, 1. pkt., § 28, stk. 3 og 5, §§ 29 og 30, § 30, b, stk. 1, § 33, stk. 1, § 34, stk. 1 og 2, § 34 a, § 36, stk. 1, § 38, stk. 1, § 45, stk. 2, § 46, stk. 1 og § 47, stk. 1 verða revsað við sekt."

76. § 59, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Er talan um serliga grov ella umfatandi brot á § 5, § 8, stk. 2, § 9, § 10, stk. 1 og 2 og stk. 3, 2. og 3. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., og stk. 3 og 5, § 16, stk. 1-4, §§ 17-19, § 20, stk. 1, 2. pkt., § 24, stk. 1, § 25, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 29 og 30 og § 38, stk. 2 kann revsingin vaksa til fongsul upp í 2 ár. "

77. Í § 59, stk. 5 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fyrningarfreistin er tó 10 ár fyri brot á § 6, stk. 1 og 2, § 9, § 10, stk. 1 og 2 og stk. 3, 1., 3., og 4. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., stk. 3 og 4, § 14, § 16, stk. 1-4, § 17, stk. 1-6, §§ 18 og 19, § 21, stk. 2 og 3, § 23, stk. 1, 2. pkt., og stk. 2 og 3, § 24, stk. 1 og 2, § 25, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 29, 30 og 30 b, § 31, 1. pkt., §§ 34 a og § 38, stk. 1 og 2."

78. Aftan á § 59 verður sett:

"**§ 59 a.** Um eitt brot á § 6, stk. 1 og 2, § 7, stk. 1-4 ella 6, § 8, stk. 1 ella 2, § 9, § 10, stk. 1, 2 ella 3, 1., 3. ella 4. pkt., § 11, § 13, stk. 1, stk. 2, 2. pkt., stk. 3, stk. 4, 2. pkt., ella stk. 5, § 14, § 16, stk. 1 ella 2, § 17, stk. 1-6, § 18, § 19, § 21, stk. 2 ella 3, § 23, stk. 1, 2. pkt., ella stk. 2 ella 3, § 24, stk. 1 ella 2, § 25, stk. 1 og 3, stk. 4, 1. pkt., og stk. 6, 1. pkt., §§ 29, 30 ella 46, stk. 1 ikki vildi ført til hægri revsing enn sekt, kann Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið í einum sektaruppskoti boða frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarviðgerð, um likamligi ella løgfrøðiligi persónurin, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at vera til reiðar at gjalda sektina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið skal, áðrenn eitt sektaruppskot verður handað, fáa eitt samtykki frá National Enhed for Særlig Kriminalitet, um Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið metir, at eitt brot gevur høvi til eina ávísa meting, ella at tað kann verða vikið frá útgangsstøðinum fyri støddini á sektini. "

79. Í § 61, stk. 1 verður "stk. 1 og 4" broytt til: "stk. 1 og 5".

80. Í § 61, stk. 2 verður "§ 46, stk. 5 og 7" broytt til: "§ 46, stk. 7", og "dagligbøtur" broytt til: "dagbøtur".

81. Í § 61 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Um ein umsitari av einum trusti ella ein persónur, ið røkir eina

samsvarandi støðu í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, ikki útinnir tær skyldur, sum tey eftir løgtingslógini hava sambært § 36 a, stk. 3, 4, 6 og 7, kann Skráseting Føroya sum tvingsilsráð áleggja umsitaranum ella persóninum, ið røkir eina samsvarandi støðu, dagbøtur ella vikubøtur."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

82. Í § 61 verður sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Um ein fyritøka ella persónur ikki útinnir tær skyldur, sum tey hava sambært § 28, stk. 3, kann Hvidvasksekretariatet sum tvingsilsráð áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersóninum hjá fyritøkuni dagbøtur ella vikubøtur."

83. Í skjali 1, nr. 3 verður "Landafrøðiligir váðar:" broytt til: "Landsfrøðiligir váðar, heruppií skráseting, stovnan og bústaður í:".

84. Í skjali 2, nr. 1 verður sum litra g sett:
"g) Viðskiftafólkið er ein triðjalandsborgari, ið søkir um uppihaldsloyvi ella statsborgaraskap innan fyri ríkisfelagsskapin ella einum øðrum ES-landi ella EBS-landi í býti fyri kapitalflutning, keyp av ogn ella ríkisskuldarbrøv ella íløgu í feløg í tí ávísa ES-landinum ella EBS-landinum."

85. Í skjali 2, nr. 2 verður litra c orðað soleiðis:
"c) Handilssambond ella transaktiónir, uttan beinleiðis kontakt, uttan ávís trygdartiltøk sum t.d. elektronisk eyðmerkingaramboð, viðkomandi álitistænastur ella eitthvørt annað trygt slag av fjareyðmerkingargongd ella elektronisk eyðmerkingargongd, ið er skipað, viðurkend, góðkend ella góðtikin av teimum skikkaðu myndugleikunum í landinum"

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2023.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær § 1, nr. 18 kemur í gildi.
Stk. 3. § 1, nr. 77 er galdandi fyri lógarbrot, sum eru framd, áðrenn lógin kemur í gildi. Hetta er tó ikki galdandi, um lógarbrotið eftir higartil galdandi reglum er fyrnað.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

3.1. Orsakir til uppskotið

Hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi fer oftast fram í altjóða høpi, og Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force) um at fyribyrgja hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi. Føroyar hava, sum partur av altjóða samstarvinum, skyldu til at tryggja, at FATF-tilmælini verða framd í føroyskari lóggávu.

FATF varð sett á stovn í 1989, og talan er um eitt millumtjóða samstarv innan OECD, ið m.a. ger tilmælir um tiltøk at fyribyrgja hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi. Umframt at vera partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF, eru Føroyar limur í Global Forum, sum leypandi ger eftirlit í limalondunum.

Londini í ES, heruppií Danmark, fremja FATF tilmælini innan karmarnar av ES-tingsins og Ráðsins direktivi 2015/849/ES frá 20. mai 2015 um fyribyrgjandi tiltøk móti nýtslu av fíggjarligu skipanini til hvítvask ella fígging av yvirgangi (í viðmerkingunum nevnd 4. hvítvaskdirektivið) og ES-tingsins og Ráðsins direktiv 2018/843 ES frá 30. mai 2018 (5. hvítvaskdirektivið).

Við hesum uppskoti verður lagt upp til, at hvítvasklógin verður dagførd soleiðis, at hon verður í samsvari við ES-tingsins og Ráðsins direktiv 2015/849/ES frá 20. mai 2015 um fyribyrgjandi tiltøk móti nýtslu av fíggjarligu skipanini til hvítvask av pengum ella fígging av yvirgangi (4. hvítvaskdirektiv), umframt ES-tingsins og Ráðsins direktiv 2018/843 ES frá 30. mai 2018 (5. hvítvaskdirektiv).

FATF-tilmælini fevna um fíggjarligar fyritøkur, m.a. peningastovnar, íløgufeløg, realkredittstovnar og lívstryggingarfeløg. Harumframt fevna tilmælini um ávísar fyritøkur, sum ikki eru fíggjarligar fyritøkur, m.a. advokatar og grannskoðarar og ognarmeklarar.

Í Føroyum eru tvær hvítvasklógir í gildi.

Á yvirtiknum málsøkjum, ið eru lívstryggingarfeløg og tvørgangandi pensjónskassar, tryggingarmeklarar, realkredittstovnar, grannskoðarar og ognarmeklarar o.o. er løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) galdandi.

Á ikki yvirtiknum málsøkjum, m.a. á bankaøkinum er “Anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)” galdandi.

Í januar mánaði í 2023 almannakunngjørdi Hvidvasksekretariatet eina serstaka váðameting fyri Føroyar. Ein av niðurstøðunum var, at tað verður mett at vera stórur vandi fyri, at Føroyar verða brúktar í sambandi við hvítvask m.a. orsakað av, at tað gongur ov seint við at dagføra hvítvasklóggávuna. Eisini av hesi orsøk hevur tað týdning, at hvítvasklóggávan nú verður dagførd.

Lagt verður nú upp til eina dagføring av bæði løgtingslógini, sum er galdandi fyri yvirtikin

málsøki og lógini, sum er galdandi fyri øki, sum ikki eru yvirtikin.

Samstundis, sum hetta lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið, verður eisini lagt fyri Løgtingið *uppskot til ríkislógartilmæli um ígildissetan av anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) og lov om finansiel virksomhed*.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi kom í gildi tann 1. juli 2021.

Í almennu viðmerkingunum til uppskotið (løgtingsmál 017/2020) stendur m.a., at lógaruppskotið byggir á 4. hvítvaskdirektivið hjá ES, og at endamálið við uppskotinum er at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi. Eisini stendur, at uppskotið skal viðvirka til, at tað verður forðað fyri, at brotsfólk misbrúka føroyskar fyritøkur og fíggjarligu skipanina til at hvítvaska pening og at fíggja yvirgang soleiðis, at tað verður forðað fyri skaða á fíggjarliga støðufestið og álitið á fíggjarligu skipanina.

Við galdandi løgtingslóg bleiv økið løgskipað av nýggjum, og farið varð frá einari í høvuðsheitum reglubundnari skipan til eina meira váðagrundaða skipan. Lagt varð upp til, at virksemið hjá fyritøkum, persónum og hjá myndugleikum skuldi gerast meira miðvíst og virkið soleiðis, at orkan bleiv nýtt, har váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størstur.

Løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi byggir á donsku hvítvasklógina, men bert ásetingar, sum eru viðkomandi fyri yvirtikin málsøki eru tiknar við í hvítvasklógina. Ásetingarnar í donsku hvítvasklógini, sum viðvíkja ikki yvirtiknum málsøkjum, eru settar í gildi í Føroyum við Anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) t.e. m.a. á bankaøkinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra hvítvasklógina, so lógin verður heilt í samsvari við 4. hvítvaskdirektivið, og at hon harafturat verður dagførd í samsvari við 5. hvítvaskdirektivið. Yvirskipað er endamálið at seta í verk skipanarlig tiltøk, sum styrkja verandi karmar um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í hvítvasklógini verður lagt upp til eina røð av broytingum, har høvuðsbroytingarnar í stuttum eru hesar:

- Nýtsluøki lógarinnar verður víðkað soleiðis, at listahandlarar t.e. persónar, sum vinnuliga hava í varðveitslu, hava handil við ella miðla handil við listaverkum, verða fevndir av hvítvasklógini, tá virðið á transaktiónum ella á eini røð av innanhýsum samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira.

- Ásett verður krav um skráseting av veruligu eigarunum av útlendskum trustum ella líknandi løgfrøðiligum skipanum og aðrar reglur í hesum sambandi. Endamálið er at forða fyri, at persónar skulu kunna fjala revsiverd viðurskifti handan feløg av ymiskum slagi.

- Broytingar verða gjørdar í varskógvaraskipanini soleiðis, at starvsfólk, sum starvast í fyritøkum ella hjá persónum, sum hava skyldu til at hava eina varskógvaraskipan, fáa betri verju. Dentur verður lagdur á, at arbeiðsgevarar ikki skulu kunna skipa starvsviðurskiftini soleiðis, at tað kann forða fyri, at starvsfólk brúka varskógvaraskipanina, tá staðfest verður ella illgruni er um óreglusemi í fyritøkuni.

- Ásett verður, at dagliga leiðslan og lyklapersónar í fyritøkuni hava eina skyldu til uttan óneyðugt drál at fráboða evstu leiðsluni um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, tá slíkar ávaringar um hvítvask koma frá útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum, konsulentum ella varskógvarum.

- Skotið verður upp at áseta serstakar reglur um tagnarskyldu fyri starvsfólk, sum starvast hjá almennum myndugleikum. Endamálið er at verja starvsfólk, sum starvast í fyritøkum, ið eru fevndar av hvítvasklógini, og sum hava skyldu til sambært § 25 í lógini at senda fráboðanir til Hvidvasksekretariatet.

- Upplýsingarskyldan og rættingarskyldan hjá tryggingarfeløgum o.o., sum eru undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum, verður víðkað.

- Tryggingareftirlitið fær heimild til at áleggja fyritøkum ella persónum ein fyribils steðg í at fáa sær nýggj kundasambond, tá tað eru staðfest álvarsom brot á ásetingar í hvítvasklóggávuni.

- Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið fáa heimild til at áleggja fyrisitingarlig sektaruppskot í málum, har brotið ikki vildi ført til hægri revsing enn sekt.

- Fyri grov brot á hvítvasklógina fer fyrningarfreistin úr 5 árum upp í 10 ár.

- Ásetingin um myndugleikauppgávurnar o.a. hjá Hvidvasksekretariatet verður umorðað, so tað meira nágreiniliga gongur fram, hvørjar uppgávurnar eru, og haraftrat verður ein nýggj áseting í lógini, har ásett verður, hvussu Hvidvasksekretariatet kann samstarva við samsvarandi myndugleikar í ES-londum.

- Onkrar ásetingar verða strikaðar, har óneyðug dupultregulering er í hvítvasklógini og í hvidvaskloven m.a. ásetingar um lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum.

1.3.1 Listahandlarar

Í dag eru listahandlarar ikki fevndir av hvítvasklógini.

FATF hevur í frágreiðingini *Professional Money Laundering* frá juli 2018 víst á, at handil og miðlan av handli við listaverkum, er eitt øki, sum tað eigur at verða hildið eitt vakið eyga við, hvat hvítvaski og fígging av yvirgangi viðvíkur.

Eitt av endamálunum við 5. hvítvaskdirektivinum er at tryggja, at listahandlaravinnan verður fevnd av hvítvasklóggávuni fyri á tann hátt at tryggja, at hendan vinnan ikki verður misnýtt til hvítvask og fígging av yvirgangi.

Ásetingarnar í 5. hvítvaskdirektivinum fevna um fyritøkur og persónar, sum vinnuliga handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií tá tað fer fram á listasøvnum og uppboðsøluhúsum, har virðið á transaktiónini ella fleiri innanhýsis tengdum transaktiónum er á 10.000 euro ella meira.

Tí verður nú lagt upp til, at nýtsluøki hvítvasklógarinnar verður víðkað til eisini at fevna um fyritøkur og persónar, sum vinnuliga hava í varðveitslu, hava handil við ella miðla handil við listaverkum. Skotið verður upp, at listahandlarar verða fevndir av ásetingunum í hvítvasklógini, og at teir koma undir eftirlitisøkið hjá Skráseting Føroya, tá ið teir varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií listasøvn og uppboðshús, har virðið á transaktiónum ella eini røð av innanhýsum samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira.

Hóast markið í 5. hvítvaskfyriskipanini er á 10.000 euro verður skotið upp, at markið í hvítvasklógini verður 50.000 kr., sum er í samsvari við kontantgjaldsbannið í lógini.

Kontantgjaldsbann er í dag ásett í § 5 í hvítvasklógini. Sambært ásetingini kunnu persónar og fyritøkur, sum ikki eru fevnd av hvítvasklógini og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme, ikki taka ímóti kontantgjaldingum á 50.000 kr. ella meira, og er hetta galdandi uttan mun til, um gjaldingin er í einum ella sum fleiri gjaldingar, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar. Mett verður, at tað er ein fyrimunur, at mørkini fyri, nær listahandlarar verða fevndir av lógini og markið fyri kontaktgjaldingum eru tað sama.

Listahandlarar eru bert fevndir av lógini, um talan er um *vinnuliga* varðveitslu, handil og miðlan av handli við listaverkum, har virðið av transaktiónini ella av fleiri innanhýsis samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira. Annað virksemi, sum persónurin ella fyritøkan hevur, verður ikki fevnt av hvítvasklógini. Eitt nú verður søla av leysafæi, sum ikki er fevnt av allýsingini í hvítvasklógini av einum *listaverki*, ikki fevnd av krøvunum í hvítvasklógini. Tað sama er galdandi fyri vinnuliga varðveitslu, handil við ella miðlan av handli við listaverkum, tá virðið er undir 50.000 kr.

Fyri at talan skal vera um *vinnuligt virksemi* skal talan vera um virksemi, sum verður bjóðað út til triðjamann, ella talan skal vera um virksemi, sum er av slíkari støddd, at talan verður um ein týðandi part av umsetninginum hjá fyritøkuni ella persóninum.

Tá listahandlarar verða fevndir av hvítvasklógini áliggur tað teimum at yvirhalda reglurnar í hvítvasklógini um m.a. váðameting og váðastýring, um kundakunleikamannagongdir o.a.

1.3.2. Trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir

Trustar eru ikki viðurkendir í føroyska vinnufelagsrættinum, og eru tískil ikki fevndir av føroysku vinnufelagslóggávuni. Hugtakið “trust” hevur sín uppruna í enskum rætti, og er ikki tað sama sum ein føroyskur grunnur. Trustar virka í dag sambært lóggávuni í eini røð av teimum sokallaðu common law londunum, heruppií USA, Kanada, Avstralia, Ný Sælandi. Trustlíknandi skipanir finnast eisini í eini røð av øðrum londum, heruppií Suður Afrika, Ísrael, Japan, Kolumbia, Meksiko, Panama, Peru og Venesuela.

Í føroyskum rætti er ikki eitt alment krav um skráseting av trustum, sum virka úr Føroyum. Trustar verða bert skrásettir eftir skattalóggávuni, um teir skulu mvg skrásetast orsakað av vinnuligum virksemi.

Sambært ásetingini í grein 30 í 4. hvítvaskdirektivinum skulu veruligu eigararnir av feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum skrásetast, og sambært grein 31 í 4. hvítvaskdirektivinum skulu veruligu eigararnir av trustum og líknandi løgfrøðiligum eindum skrásetast, um eindirnar eru fevndar av lóggávu í landinum. Reglur samsvarandi grein 30 eru ásettar í føroyskari serlóggávu, sum viðvíkur ávísu sløgunum av feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum, sum reglur um skráseting av veruligum eigarum skulu galda fyri. Av tí, at vit onga lóggávu hava um trustar og líknandi løgfrøðiligar eindir, og slíkir tí ikki kunnu skipast eftir føroyskari lóggávu, eru ásetingar samsvarandi grein 31 ikki settar í gildi í føroyskari lóggávu. Grein 31 í 4. hvítvaskdirektivinum bleiv við 5. hvítvaskdirektivinum broytt soleiðis, at krav er um, veruligu eigararnir eru skrásettir í tí landinum, har umsitarin av trustinum ella persónurin, sum røkir eitt samsvarandi starv í eini líknandi løgfrøðiligari skipan, er búsitandi ella er etableraður.

Av tí, at eingin serlóggáva er í Føroyum um trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir, verður skotið upp, at reglur verða ásettar í hvítvasklógini, har tað m.a. verður álagt trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum eina skyldu at skráseta seg.

Skotið verður upp at áseta eina allýsing av trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum í hvítvasklógini. Skotið verður eisini upp at seta í verk eina skyldu at skráseta veruligar eigarar hjá útlendskum trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum. Veruligir eigarar av trustum skulu skrásetast, tá umsitarin ella persónurin, ið røkir eina samsvarandi støðu, hevur bústað ella er etableraður í Føroyum. Ein trustur ella líknandi løgfrøðilig skipan skal eisini skrásetast í Føroyum í teimum førum, har umsitari ella persónur, ið røkir eina samsvarandi støðu, hevur bústað ella er etableraður uttanfyri ES, tá umsitarin ella ein persónur, sum røkir samsvarandi støðu hevur eitt handilssamband ella keypir fastogn í Føroyum.

Ítøkiliga viðførir skipanin, at umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eina samsvarandi støðu í einum líknandi løgfrøðiligari skipan, skal hava kunnleika til veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, heruppií um slagið og vavið av rættindunum hjá teimum veruligu eigarunum. Hesar upplýsingar skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya skjótast gjørligt eftir, at umsitari hevur fingið kunnleika til, at persónurin er vorðin veruligur eigari ella ikki longur er veruligur eigari.

Skipanin viðførir, at ein umsitari av einum trusti og ein persónur, ið røkir eina samsvarandi støðu í einum líknandi løgfrøðiligari skipan, verður fevndur av skylduni til at fráboða upplýsingar til skránna yvir veruligar eigarar hjá Skráseting Føroya, sum verður víðkað til at fevna um trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir.

Veruligir eigarar av trustum verða í uppskotinum allýstir sum tann ella teir likamligu persónarnir, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði á trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini ella á annan hátt hava heimildir, sum minna um eigaraskap, heruppií
- stovnarar,
- umsitarar,
-verjar, um hesir eru at finna, og
- serliga njótunartilskilaðir persónar ella, um teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, ikki eru kendir enn av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, í hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað ella virkar.

Lagt verður upp til, at landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri krøv til skráseting, heruppií hvørjar upplýsingar skulu skrásetast, og hvør kann ella skal skráseta tær. Hetta svarar til tað, sum er galdandi fyri skráseting av veruligum eigarum hjá feløgum og øðrum løgfrøðiligum eindum, t.d. partafeløgum, har skipanin er ásett í kunngerð um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya.

Umsitarar av trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum skulu eftir áheitan útflýggja upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, heruppií um umsitaran ella persónin, ið røkir eina samsvarandi støðu, royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu eindini, til Hvidvasksekretariatet, Skráseting Føroya og aðrar skikkaðar myndugleikar. Til Skráseting Føroya og aðrar skikkaðar myndugleikar, skal talan tó vera um upplýsingar, ið verða mettar neyðugar við atliti at eftirlitsuppgávunum og eftiransingaruppgávunum hjá Skráseting Føroya og skikkaðu myndugleikunum. Um hetta ikki er tilfeldið, kann tann skikkaði myndugleikin bert fáa eigaraupplýsingar, sum eru almennar.

Skotið verður upp at seta inn revsiásetingar, sum geva møguleika fyri at áleggja umsitara ella persóni, ið røkir eina samsvarandi støðu, sekt fyri ikki at halda skylduna um at skráseta upplýsingar um veruliga eigaran hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini í kt-skipan Skráseting Føroya, ella skylduna til eftir áheitan at lata hesar upplýsingar til Hvidvasksekretariatet ella aðrar skikkaðar myndugleikar í sambandi við eftirlitsuppgávur og eftiransingaruppgávur hjá myndugleikanum. Mett verður, at revsing við sekt er tað revsitiltakið, ið er best egnað til at trygga, at ein umsitari av einum trusti ella persónar, ið røkja eina samsvarandi støðu í eini líknandi løgfrøðiligari skipan, lúka kravið um skráseting og víðarilatan av upplýsingum um veruligar eigarar.

1.3.3. Fráboðan um ósamsvar í upplýsingum um veruligar eigarar
Persónar og fyritøkur, ið eru fevnd av hvítvasklógini, hava í dag ikki eina skyldu til sambært hvítvasklógini at fráboða ósamsvar í skrásettum upplýsingum um veruligu eigararnar hjá einum felagi ella øðrum løgfrøðiligum persóni.

Fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av hvítvasklógini, hava í dag skyldu til at útinna kundakunnleikamannagongdir. Hetta merkir, at tey skulu kanna samleikaupplýsingar hjá veruligu eigarunum hjá teirra kundum, sbrt. kapittul 3 í hvítvasklógini.

Í § 2, nr. 9 í hvítvasklógini verður hugtakið “veruligur eigari” nágreinað. Tað eru somuleiðis ásetingar um veruligar eigarar í serlóggávu, heruppií í vinnufelagslógini, lógini um

vinnurekandi grunnar, lov om finansiel virksomhed o.a. Soleiðis eru ásetingar um veruligar eigarar settar í gildi fyri ein stóran hóp av fyritøkum, grunnum o.ø., sum skulu savna saman, varðveita og skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar og harvið gera “kenn teg sjálvan mannagongdir”.

Í hesum uppskoti verður skotið upp at seta í gildi krav um, at persónar og fyritøkur, sum hava skyldu til at útinna kundakunnleikamannagongdir, og skikkaðir myndugleikar skulu geva fráboðan um møguligt ósamsvar í upplýsingum um veruligu eigararnar hjá feløgum og øðrum løgfrøðiligum persónum umframt trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum.

Fyritøkur og persónar kunnu eitt nú fáa kunnleika til ósamsvar í upplýsingunum í sambandi við kundakunnleikamannagongdirnar, har fyritøkan ella persónurin ger eina sjálvstøðuga meting av, hvør veruligi eigari kundans er. Í sambandi við metingina kann samanberast við eitt skrásetingarprógv ella skjal við upplýsingum við veruligu eigarunum, sum er heintað úr skránni hjá Skráseting Føroya.

Skotið verður upp, at ein fráboðan um ósamsvar í upplýsingunum skal fara fram skjótast gjørligt soleiðis, at upplýsingarnar um veruligu eigararnar til eina og hvørja tíð eru tíðarbærar. Hetta er eisini ein orsøk til, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar í dag hava skyldu til skjótast gjørligt at skráseta upplýsingar um teirra veruligu eigarar í skránni hjá Skráseting Føroya.

Fráboðanin skal sendast til Skráseting Føroya. Um fráboðanin viðvíkur einari fyritøku, grunni ella felagi, sum er undir eftirliti av einum øðrum myndugleika enn Skráseting Føroya, skipar Skráseting Føroya soleiðis fyri, at fráboðanin verður latin myndugleikunum, sum hava eftirlitsheimildir mótvegis viðkomandi fyritøku, grunni ella felagi.

1.3.4. Varskógvarar (whistleblowers) betri verju

Í kapittul 7 í hvítvasklógini eru ásetingar um varskógvarskipan fyri starvsfólk, sum starvast í fyritøkum ella hjá persónum, sum eru fevndir av § 1, stk. 1, nr. 5-9 í galdandi hvítvasklóg.

Sambært § 33 í galdandi hvítvasklóg skulu hesar fyritøkur og persónar hava eina varskógvaraskipan:

- Grannskoðarar og grannskoðanarfyritøkur, góðkendar sambært grannskoðaralógini.

- Ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur.

- Fyritøkur og persónar, sum annars vinnuliga lata somu veitingar, sum teir í nr. 5-6 í hvítvasklógini og í § 1, stk. 1, nr. 14 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme nevndu persónsbólkar, undir hesum grannskoðarar, sum ikki eru góðkendir eftir grannskoðaralógini, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar.

- Útbjóðarar av tænastuveitingum til fyritøkur, sbr. § 2, nr. 12 í hvítvasklógini.

- Útbjóðarar av spølum.

Varskógvaraskipanin skal tryggja, at starvsfólk gjøgnum eina serliga óhefta og sjálvstøðuga rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklógina ella reglur settar í gildi við heimild í hvítvasklógini.

Eftirlitsmyndugleikin kann í serligum førum, har myndugleikin metir, at tað er nyttuleyst at seta slíka skipan í verk, geva undantak frá kravinum um at hava eina varskógvaraskipan.

Kravið um at hava eina slíka skipan er ikki galdandi fyri fyritøkur, sum hava fimm starvsfólk ella færri.

Varskógvaraskipanin er soleiðis háttað, at fyritøkur og persónar ikki mugu útseta starvsfólk fyri ólagaligari viðferð ella fyri ólagaligum fylgjum orsakað av, at starvsfólkið hevur fráboðað brot ella møgulig brot á hvítvasklógina ella reglur settar í gildi við heimild í lógini, til ein eftirlitsmyndugleika ella eina varskógvaraskipan í fyritøkuni. Tað sama er galdandi, um starvsfólkið innanhýsis hevur fráboðað sín illgruna um hvítvask ella fígging av yvirgangi, ella hevur fráboðað Hvidvasksekretariatet um hetta.

Starvsfólk, ið verða fyri ólagaligari viðferð ella fylgjum, kunnu verða tildømd eina samsýning. Tað kann ikki, til skaða fyri starvsfólkið, verða vikið frá reglunum um verju av starvsfólkum, sum fráboða brot ella møgulig brot. Tað hevur stóran týdning, um skipanin skal virka eftir ætlan, at tað ikki verða settar forðingar fyri, at starvsfólk nýta varskógvaraskipanina.

Lagt verður nú upp til broytingar í hvítvasklógini soleiðis, at varskógvaraskipanin verður styrkt.

Skotið verður upp, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av reglunum um varskógvaraskipan í hvítvasklógini, eftir áheitan frá einum eftirlitsmyndugleika, skrivliga skulu kunna skjalprógva, hvussu persónurin ella fyritøkan hava handfarið fráboðanir til varskógvaraskipanina. Heldur ein persónur ella fyritøka ikki hesa skylduna, kann viðkomandi sambært § 59, stk. 1, 2. pkt. revsast við sekt.

Dentur verður lagdur á, at arbeiðsgevarar ikki skulu kunna skipa starvsviðurskiftini soleiðis, at tað verður forðað fyri, at starvsfólk brúka varskógvaraskipanina í fyritøkuni ella fráboða eftirlitsmyndugleikunum, tá staðfest verður ella illgruni er um óreglusemi.

Skotið verður tí upp, at tað í teimum førum, har ein fyritøka ella persónur ger avtalu um tagnarskyldu við eitt starvsfólk ella eitt fyrrverandi starvsfólk, skal tað vera ásett í avtaluni, at hetta ikki forðar starvsfólkinum í at boða almennu myndugleikunum frá um brot ella møgulig brot á lóggávuna.

Ásett verður, at persónurin ella fyritøkan, ið er fevnd av hvítvasklógini, við ásetan, tillutan ella útgjalding av skiftandi løn til starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið ikki má avmarka tann skiftandi lønarpartin grundað á, at starvsfólkið ella fyrrverandi starvsfólkið hevur fráboðað einum eftirlitsmyndugleika, innanhýsis varskógvaraskipanini ella Hvidvasksekretariatet sín illgruna um hvítvask ella fígging av yvirgangi. Tað ber ikki at víkja frá hesum reglunum til bága fyri núverandi ella fyrrverandi starvsfólkið.

Harumframt verður skotið upp, at heldur ikki fyrrverandi starvsfólk mugu verða útsett fyri ólagaligari viðferð ella fylgjum av, at fyrrverandi starvsfólkið hevur fráboðað einum

eftirlitsmyndugleika ella einari innanhýsis varskógvaraskipan um brot ella illgruna um brot á hvítvasklógina. Tað verður eisini skotið upp, at fyrrverandi starvsfólk kunnu verða tildømd eina samsýning, um rættindi hjá viðkomandi eru sett til viks.

1.3.5. Fráboðanarskylda viðvíkjandi ávaringum um hvítvask og fígging av yvirgangi
Í dag hevur dagliga leiðslan ella lyklapersónar í fyritøkuni ikki beinleiðis nakra skyldu til at boða evstu leiðsluni í fyritøkuni frá um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, sum eru móttiknar frá eitt nú útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum ella frá varskógvarum. Fráboðanir um hvítvask er ábyrgdarøkið hjá dagligu leiðsluni, meðan nevndin hevur til uppgávu at arbeiða yvirskipað og strategiskt.

Lagt verður nú upp til, at tað verður áløgd dagligu leiðsluni og lyklapersónum í fyritøkuni ein skylda til uttan óneyðugt drál at fráboða evstu leiðsluni um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi. Skotið verður upp staðiliga at áseta hesa skylduna í hvítvasklógina. Skyldan at fráboða er galdandi fyri allar fráboðanir um hvítvask og fígging av yvirgangi, sum verða móttiknar, og er talan ikki einans um fráboðanir frá útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum og ráðgevum ella frá varskógvarskipanini, men eisini fráboðanir frá fyritøkum og persónum við minni kunnleika til fyritøkuna.

Viðvíkjandi lyklapersónum verður mett, at teirra skylda at fráboða kann útinnast á tann hátt, at fráboðanin kann verða latin dagligu leiðsluni sambært vanligu mannagongdunum í fyritøkuni. Móttekur dagliga leiðslan eina slíka fráboðan, hevur hon skyldu til at senda fráboðanina víðari til evstu leiðsluna.

1.3.6. Víðkað upplýsingarskylda og rættingarskylda
Tryggingarfeløg o.o., sum eru fevnd av løgtingslóg um tryggingarvirksemi, hava í dag eina skyldu til at lata Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri virksemi eftirlitsins, sbr. § 193, stk. 1 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi. Eisini hava tryggingarfeløg o.o. skyldu til av sínum eintingum at lata Tryggingareftirlitinum upplýsingar um viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri framhaldandi raksturin av tryggingarfelagnum, sbr. § 59, stk. 1 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Sambært § 38, stk. 1 í hvítvasklógini skulu fyritøkur og persónur, sum eru fevnd av § 1, stk. 1, nr.1-4 í hvítvasklógini og veitarar og undirveitarar hjá teimum, lata Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum eru neyðugar í sambandi við eftirlitið sambært hvítvasklógini.

Í dag er eingin áseting í hvítvasklógini, har tað staðiliga verður álagt fyritøkum og persónum, sum eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-4 í hvítvasklógini, av sínum eintingum at upplýsa Tryggingareftirlitinum um viðurskifti, sum generelt kunnu hava áhuga í sambandi við eftirlit Tryggingareftirlitsins við fyritøkuni ella persóninum. Tað finst heldur ikki nøkur áseting í lógini, har álagt verður fyritøkuni ella persóninum at rætta upplýsingar, sum eru latnar Tryggingareftirlitinum, tá fyritøkan ella persónurin seinni verða varug við, at upplýsingarnar ikki vóru rættar ella kunnu hava verið misvísandi. Tó verður galdandi lóggáva tulkað soleiðis, at ein rættingarskylda er ein partur av ásettu upplýsingarskylduni. Av tí, at lóggávan bert verður tulkað á henda hátt, og rættingarskyldan ikki staðiliga er ásett, ber tað ikki til at revsa fyri brot á skylduna at rætta upplýsingarnar.

Verður upplýsingar- og rættingarskyldan víðkað, verður mett, at vandin fyri, at tryggingarfeløg o.o. lata verða við at kunnu Tryggingareftirlitið um trupul viðurskifti, verður minni.

Skotið verður tí upp at víðka upplýsingarskylduna soleiðis, at upplýsingar, sum hava stóran týdning fyri eftirlitið hjá Tryggingareftirlitnum, skulu latast beinanvegin og uttan at biðið er um tær frammanundan.

Eisini verður nú skotið upp, at tað fyri tryggingarfeløg o.o, verður ein lógaráløgd skylda at rætta upplýsingar, sum er latnar Tryggingareftirlitinum, um fyritøkan ella persónurin seinni staðfesta, at upplýsingarnar ikki vóru rættar ella góvu eina misvísandi mynd av viðurskiftunum.

Verður upplýsingar- ella rættingarskyldan ikki yvirhildin, kann hetta viðføra revsing við sekt.

1.3.7. Fyribils steðgur fyri nýggjum kundum, tá álvarsom brot eru á hvítvasklóggávuna
Sambært § 39 í hvítvasklógini kann Tryggingareftirlitið áleggja teimum fyritøkum og persónum, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-4, innanfyri eina freist, sum Tryggingareftirlitið hevur ásett, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á ásetingar í hvítvasklóggávuni. Eisini kann Tryggingareftirlitið sambært § 40 í hvítvasklógini í nøkrum førum áleggja fyritøkum at koyra tann frá, sum fyritøkan hevur útnevnt at hava hvítvask sum ábyrgdarøki í fyritøkuni.

Tað verður mett vera eitt munagott tiltak í stríðnum móti fíggjarligum brotsverkum, um Tryggingareftirlitið hevur møguleika til at koma við einari álegging um, at fyritøkan fyribils ikki kann fáa sær nýggj kundaviðurskifti, um álvarsom brot á týðandi hvítvaskreglur eru staðfest í fyritøkuni. Eftirlitsmyndugleikarnir í fleiri øðrum londum í Europa hava slíka heimild, men eingin slík heimild er at finna í føroysku hvítvasklógini. Ein slík heimild hevði tryggjað Tryggingareftirlitinum munagóðar inntrivsmøguleikari í slíkum førum, har álvarsom brot eru á hvítvasklógina, eitt nú tá krøvini um kundakunnleikamannagongdir ikki eru yvirhildin. Ein álegging um ikki at fáa sær nýggj kundaviðurskifti kann vera galdandi, inntil fyritøkan skjalprógvar, at viðurskiftini eru komin í rættlag. Hetta átak hevði eggjað fyritøkuni til sum skjótast at fáa viðurskiftini í rættlag, sum hava ført til áleggingina.

Skotið verður upp, at Tryggingareftirlitið skal kunna áleggja einari fyritøku ella persóni, sum eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-4 ikki at fáa sær nýggj kundaviðurskifti, tá álvarsamt brot á ásetingar í hvítvasklóggávuni er staðfest. Um brotið heilt ella partvíst er framt í útlendskari deild hjá fyritøkuni, kann áleggingin víðkast til at fevna um deildina. Áleggingin heldur uppat, tá fyritøkan ella persónurin skjalprógvar, at brotið er hildið uppat. Talan er um eitt týðandi inntriv í virksemið hjá fyritøkuni ella persóninum, og tí verður lagt upp til, at Tryggingareftirlitið skjótast gjørligt ger eina meting, hvørt tað er nóg væl skjalprógvað, at brotið er hildið uppat, og boðar fyritøkuni ella persóninum frá sínari meting.

1.3.8. Listi yvir politiskt ábærar persónar
Í løtuni er dupultregulering viðvíkjandi lista við nøvnum á persónum, sum eftir hvítvasklóggávuni eru politiskt ábærir persónar.

Hugtakið politiskt ábærir persónar, sbrt. § 2, nr. 8 í hvítvasklógini, eru persónar, sum hava ella hava havt høgtstandandi alment starv. Tað er t.d. stjórnarleiðarar, tinglimir, dómarar, tænastumenn ella líknandi í leiðandi almennum starvi, leiðarar í politiskum flokkum og leiðslan í almennum feløgum.

Eftir § 17, stk. 4 og 5 í hvítvasklógini verða sett herd krøv til kundakunnleika (legitimatión yvirvøku o.a.), um kundin er ein politiskt ábærur persónur.

Í § 17, stk. 7 og 8 í hvítvasklógini er ásett, at landsstýrismaðurin ger og almannakunnger ein lista við nøvnum á persónum, sum eru fevndir av § 2, nr. 8, og at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um yvirlitið, nevnt í stk. 7, heruppií reglur um fráboðan, almannakunngering o.a.

Somu heimildir eru í § 18, stk. 7 og 8 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) (hereftir hvítvaskfyriskipanin). Við heimild í hesum hevur Fíggjareftirlitið gjørt ein lista yvir politiskt ábærar persónar, sum áhaldandi skal dagførast í samráð við viðkomandi føroyskar myndugleikar. Listin fevnir um føroyskar politiskt ábærar persónar sambært Bekendtgørelse nr. 1960 af 19. oktober 2021 om indberetning og offentliggørelse af oplysninger om politisk eksponerede personer på Færøerne.

Sum lóggávan er nú, skulu ymiskir myndugleikar gera hvør sín lista við somu nøvnum á politiskt ábærum persónum, og stovnar o.o. skulu boða frá til tveir ymiskar myndugleikar um nøvn á somu persónum.

Skotið verður tí upp at strika ásetingina í § 17, stk. 7 í hvítvasklógini og í staðin áseta, at listin, sum Fíggjareftirlitið hevur gjørt um politiskt ábærar persónar í Føroyum, verður nýttur. Tilvísingin merkir, at eisini tær fyritøkur, sum eru fevndar av hvítvasklógini, t.d. tryggingarfeløg, og sum eru undir herdum krøvum til kundakunnleika til politiskt ábærar persónar, skulu nýta listan, sum Fíggjareftirlitið hevur gjørt.

Landsstýrið er farið undir at kanna, eisini í samráði við avvarðandi danskar myndugleikar, um tað er møguligt at avmarka skaran av persónum, sum mugu metast sum politikst ábærir, t.d. soleiðis at skarin fyri politiskar flokkar verður eyðmerktur til fólkavaldar politikarar og sjálvar floksleiðslurnar, og ikki eitt nú nevndarlimir í politiskum lokalfeløgum.

1.3.9. Fyrisitingarlig sektaruppskot

Ásetingar um revsing fyri brot á hvítvasklógina eru at finna í § 59 í hvítvasklógini. Sambært § 59, stk. 1 og 2 kann talan verða um revsing við sekt ella fongsul. Sambært § 59, stk. 4 kunnu løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

Eftir galdandi lóg er ikki møguleiki fyri, at brot á hvítvasklógina kunnu verða revsað við fyrisitingarligum sektaruppskoti.

Um Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið staðfestir brot á eina áseting í hvítvasklógini, sum er revsiáløgd, boðar stovnurin løgregluni og ákæruvaldinum frá hesum, sum síðani metir um, hvørt grundarlag er fyri at kanna málið. Tá málið er kannað, metir ákæruvaldið um, hvørt eitt revsimál eigur at verða lagt fyri dómstólarnar. Í málum, har tað verður mett, at brotið ikki kann føra við sær hægri revsing enn sekt, og har ákærdi játtar seg sekan í brotinum, kann

ákæruvaldið enda málið við uttanrættarligum sektaruppskoti, sbrt. § 878 í rættargangslógini, um tann ákærdi, innan eina nærri ásetta freist, sigur seg at vera til reiðar at rinda ta í sektaruppskotinum ásettu sektina.

Sambært § 59, stk. 1 í hvítvasklógini kann brot á eina røð av ásetingum í lógini verða revsað við sekt uttan so, at hægri revsing kann verða áløgd eftir revsilógini, ella talan er um serliga grov ella umfatandi brot á ásetingar, sum eru nevndar í § 59, stk. 2 í hvítvasklógini, og hesi brot eru framd við vilja.

Í § 59, stk. 3 í hvítvasklógini er ásett, at tað, tá sektin verður ásett, verður lagdur dentur á fíggjarligu viðurskiftini hjá gerningspersóninum. Fyri brot framd av fyritøkum verður dentur lagdur á nettosøluna hjá fyritøkuni, tá brotið varð framt.

Nærri vegleiðing um ásetan av sekt fyri brot á hvítvasklógina er at finna í viðmerkingunum til hvítvasklógina.

Skotið verður nú upp, at tað frameftir skal bera til at áleggja fyrisitingarligar sektir.

Í útgangsstøði er tað ein treyt fyri, at fyrisitingarligar sektir kunnu áleggjast, at brotini sum heild eru einsháttað, ikki eru torgreidd og uttan próvlig ivamál. Revsistøðið eigur harafturat at vera greitt. Brotini eiga sum heild at vera greið, og tað skal bera til at staðfesta tey beinanvegin, og tað eigur at kunna verða tikin avgerð í málinum, heruppií at áseta støddina á sektini, uttan at vera neyðugt at gera nakrar metingar av týdningi áðrenn.

Lagt verður upp til at áseta eina § 59 a í hvítvasklógina, har heimilað verður Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitinum at áleggja fyrisitingarligar sektir í sambandi við, at likamligir ella løgfrøðiligir persónar hava framt brot á ásetingar í hvítvasklógini. Heimildin kann verða nýtt í málum, har brotið verður mett ikki at hava við sær hægri revsing enn sekt, og um tann, sum hevur framt brotið játtar seg sekan í brotinum, og boðar frá, at viðkomandi innan eina nærri ásetta freist er sinnaður at rinda sektina, sum er ásett í sektaruppskotinum. Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið kunnu sostatt geva fyrisitingarligar sektir fyri brot á tær ásetingar, sum eru nevndar í § 59 a, stk. 1.

Tað er ein treyt fyri at geva fyrisitingarliga sekt, at rættleikin í, at persónurin játtar seg sekan, er styrktur av teimum upplýsingunum, sum fyriliggja í málinum, og av upplýsingum annars, og at tað tí ikki er nakað ivamál um, at revsing kann verða áløgd uttan eina veruliga revsirættarsak. Hetta samsvarar við meginreglurnar fyri ájáttanarmál við dómstólarnar, sbr. § 877, stk. 1, nr. 1 og 3 í rættargangslógini. Hetta merkir, at Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið ikki kann geva fyrisitingarligt sektaruppskot í einum máli, har viðkomandi hevur játtað seg sekan, um upplýsingarnar í málinum týða uppá, at viðkomandi ikki hevur framt lógarbrotið.

Harafturat er tað ein treyt fyri at geva fyrisitingarligt sektaruppskot, at talan er um eitt greitt brot, hóast talan er um eitt brot á eina áseting, har tað krevst, at ein meting verður gjørd. Tað er greitt nærri frá dømum um slík brot í serligu viðmerkingunum í uppskotinum.

Tá støddin á sektini skal ásetast verður, eins og eftir galdandi reglum, ein meting gjørd av møguleikunum hjá viðkomandi fyritøku at gjalda sektina. Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið skal harvið meta um, hvørja styrki fyritøkan hevur, tá mál um fyrisitingarliga sekt verður fyrireikað.

Við uppskotinum verður lagt upp til, at Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið kunnu geva fyrisitingarlig sektaruppskot, tá fyritøkur hava brotið týðandi ásetingar í hvítvasklógini, og harafturat at geva fyrisitingarlig sektaruppskot fyri brot av meira formligum slagi, t.d. um fyritøkan manglar at hava ein skrivligan politikk. Eisini kann fyrisitingarlig sekt verða givin í førum, har ein fyritøka bæði brýtur týðandi ásetingar og ásetingar um meira formlig viðurskifti.

Skotið verður upp, at Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið, áðrenn eitt fyrisitingarligt sektaruppskot verður handað, hevur fingið eitt samtykki frá SØIK, um Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið metir, at eitt brot ikki er greitt, men gevur høvi til at gera eina meting, ella at vikið eigur at verða frá útgangsstøðinum fyri støddini á sektini. Lagt verður upp til, at Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið í ivamálum vísa varsemi í sambandi við slíka meting, og ráðføra seg við SØIK, um ivi er. Tað verður lagt upp til, at SØIK í slíkum føri ansar eftir, at:

- Lógarbrotið hóskandi kann verða avgjørt við einari fyrisitingarligari sekt, heruppií at treytirnar í § 59 a, stk. 1 í uppskotinum eru loknar.
- Um innihaldið í sektaruppskotinum lýkur treytirnar í § 59 a, stk. 2 í uppskotinum.
- Um tað er hóskandi at enda málið við fyrisitingarligari sekt, ella um hetta kann hava ávirkan á onnur mál móti viðkomandi, sum eru í gongd.
- Um rætta meginregla verður nýtt í sambandi við, at sektin verður ásett, heruppií í teimum føri, har møguleiki er fyri at velja millum fleiri meginreglur fyri ásetan av sekt.
- Um rætta støðið fyri sektini er valt, tá tað í málinum eru ítøkiligar herðandi ella linnandi umstøður.

Eru ein ella fleiri av treytunum loknar, og metir SØIK tí, at tað er ivingarsamt við atliti til rættartrygdina, at Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið gevur fyrisitingarliga sekt, kann SØIK nokta at geva sítt samtykki til hetta.

SØIK skal svara Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitinum so skjótt sum til ber, tó við fyriliti fyri, hvat slag og stødd av máli talan er um. Vanliga er hetta innan 10 dagar. Tað er ein fyritreyt, at Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið hevur fyrireikað eitt tilmæli um avgerð saman við einari neyvari lýsing av málinum, har víst verður til viðkomandi prógv í málinum, sum verður sent til SØIK.

Í teimum førum, har eitt brot ikki er greitt, og Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið metir, at týðandi ivamál eru um prógvini í málinum, skal málið latast løgregluni og ákæruvaldinum. Tað sama ger seg galdandi í málum, tá Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið metir, at likamligur ella løgfrøðiligur persónur hevur handlað á ólógligan hátt, men har tað krevst ein neyv kanning, og at fleiri prógv verða fingin til vegar enn tey prógvini, sum Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið hevur innheintað í sambandi við eftirlitið. Hetta er eisini galdandi fyri mál, har ivi er um ásetan av ítøkiligu sektini, eitt nú í førum, har tað ikki ber til at rokna sektina eftir meginregluni, sum er galdandi fyri útrokning av sektini fyri brot á ta ítøkiligu ásetingina, sum málið snýr seg um.

Í málum, har tað verður mett, at grundarlag er fyri bæði at geva løgfrøðiligu persóninum eina sekt, og at døma fysiska persónin við fongsulsrevsing, skal alt málið latast løgregluni og ákæruvaldinum við atliti til, at alt málið kann verða viðgjørt undir einum. Tað sama er galdandi í málum, har tað verður mett, at tað kunnu verða framd onnur brot á ásetingar í

hvítvasklógini, sum ikki eru fevnd av ásetingini um fyrisitingaliga sekt, og mál, har brotið er grovt, og tað kann geva orsøk til at halda, at talan er um brot á revsilógina.

Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið skal í sambandi við, at málið verður upplýst leypandi meta um, hvørt málið eigur at verða latið løgregluni ella ákæruvaldinum m.a. við atliti til at tryggja, at tað ikki gerst trupult at tryggja prógvini til nýtslu í málinum ella í øðrum málum.

Tað verður ikki lagt upp til, at uppskotið skal hava við sær nakrar broytingar í verandi heimildum hjá løgregluni og ákæruvaldinum at seta fram skuldseting ella ákæru í málum um brot á hvítvasklógina. Løgreglan og ákæruvaldið kunnu sostatt framhaldandi í øllum málum av sínum eintingum taka avgerð um at fara undir eitt revsimál. Somuleiðis hava Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið eisini framvegis møguleika til at melda eitt møguligt brot á hvítvasklógina til løgregluna, um møguleiki ikki er fyri at geva fyrisitingarliga sekt. Lagt verður upp til, at Skráseting Føroya ella Tryggingareftirlitið í útgangsstøði gevur fyrisitingarliga sekt, um treytirnar eru loknar, heldur enn at melda málið til SØIK.

1.3.10. Fyrningarfreist

Sambært § 92 í revsilógini verður eitt lógarbrot ikki revsað, um málið er fyrnað.

Meginreglan í revsilógini er, at fyrningarfreistin er treytað av revisrammuni fyri ávísa lógarbrotið. Sambært § 93, stk. 1 í revislógini er fyrningarfreistin 2 ár, tá heimild ikki er fyri hægri revsing enn 1 ára fongsulsrevsing, at fyrningarfreistin er 5 ár, tá heimild ikki er fyri hægri revsing enn 4 ára fongsulsrevsing. Fyrningarfreistin er 10 ár, tá heimild ikki er fyri hægri revsing enn fongsul í 10 ár, og fyrningarfreistin er 15 ár, tá heimild ikki er fyri hægri revsing enn fongsul í ávísa ásetta tíð.

Harafturat eru serstakar fyrningarfreistir ásettar í revsilógini fyri ávís lógarbrot, sum víkja frá meginregluni í § 93, stk. 1 í revsilógini. Sambært § 93, stk. 2 eru serstakar fyrningarfreistir galdandi í ymiskum málum um fíggjarsvik. Hevur ein í sambandi við somu gerð framt fleiri lógarbrot, og tað eru galdandi ymiskar fyrningarfreistir fyri lógarbrotini, skal tann longsta av fyrningarfreistunum galda fyri øll lógarbrotini, sbrt. § 93, stk. 3 í revsilógini.

Í dag er ein 5 ára fyrningarfreist galdandi í málum um brot á ásetingar í hvítvasklóggávuni. Revsiramman sambært hvítvasklógini er 6 mánaðar fongsul, tá talan er um serliga grov ella umfatandi brot. Harvið víkir 5 ára fyrningarfreistin í hvítvasklógini frá vanligu 2 ára fyrningarfreistini í revsilógini.

Revsilógin varð við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019 um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven broytt soleiðis, at § 290 a um hvítvask bleiv ásett í lógini. Sambært ásetingini verður hvítvask revsað við sekt ella fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðir. Fyri eitt slíkt lógarbrot er fyrningarfreistin 5 ár, sbrt. 93, stk. 1, nr. 2 í revsilógini. Revsingin kann sambært § 290 a hækka til fongsul í 8 ár, um talan er um grovt hvítvask. Í slíkum førum er fyrningarfreistin 10 ár, sbrt. § 93, stk. 1, nr. 3 í revsilógini.

At uppklára brot á hvítvasklóggávuna er vanliga tíðarkrevjandi, tí tað krevst vanliga, at eitt umfatandi tilfar verður gjøgnumgingið og kanningar, sum taka langa tíð, verða gjørdar fyri at uppklára lógarbrotið, vavið á lógarbrotinum og ábyrgdarpersónar. Hvítvasklógin hevur til endamáls at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi, og kann tað hava við sær stórar

avleiðingar fyri samfelagið. Tað hevur týdning fyri álitið á fíggjarligu skipanirnar og fyri fyribyrgjan av brotum á hvítvasklóggávuna, at revsiábyrgd kann verða áløgd í sambandi við lógarbrot, hóast hesi ikki verða uppklárað fyrr enn væl seinni.

Skotið verður tí upp at broyta reglurnar um fyrning í hvítvasklógini soleiðis, at fyrningarfreistin verður 10 ár í málum um grov brot á hvítvasklógina. Hetta samsvarar við fyrningarfreistina í málum um hvítvask av serliga grovum slag sambært § 290 a í revsilógini. Hetta samsvarar eisini við fyrningarfreistina í málum um serliga grov brot á skatta- og avgjaldslógina, sbrt. § 289 í revsilógini.

Tá fyrningarfreistin fer frá 5 árum upp í 10 ár fyri ávís brot á hvítvasklógina, verður tað viðvirkandi til, at møguleikarnir at handhevja og revsa fyri brot á lógina verða betraðir.

1.3.11. Tagnarskyldan hjá starvsfólkum, sum starvast hjá almennum myndugleikum
Um illgruni er um hvítvask, skulu fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av lógini, beinanvegin boða Hvidvasksekretariet frá, um fyritøkan ella persónurin vita, hava illgruna um ella rímiliga orsøk til at halda, at ein transaktión, fíggjarmiðlar ella virksemi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi.

Fyritøkur og persónar, leiðsla og starvssett í hesum fyritøkum og hjá hesum persónum umframt grannskoðarar og onnur, ið útinna uppgávur ella hava útint uppgávur fyri fyritøkuna ella persónin hava skyldu til at halda tað loyniligt, at ein fráboðan er latin Hvidvasksekretariatet, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning fer at verða sett í verk fyri at fáa greiði á, um ein fráboðan skal latast, sbr. § 36, stk. 1 í hvítvasklógini.

Upplýsingar um eina slíka fráboðan kunnu tó eftir áheitan verða latnar teimum myndugleikum og felagsskapum, sum ansa eftir, at hvítvasklógin verður yvirhildin ella til rættarhandhevjandi endamál, sbr. § 36, stk. 2 í hvítvasklógini.

Hvidvasksekretariatet hevur til uppgávu at taka ímóti, greina og lata víðari upplýsingar um illgrunasamar transaktiónir, og í praksis verða upplýsingar latnar víðari til løgregluna og til aðrar viðkomandi myndugleikar, heruppií TAKS.

Í sambandi við eina slíka víðarilatan av upplýsingum kann tað gerast ein trupulleiki, um ein myndugleiki seinni útflýggjar eina slíka fráboðan, tí hetta kann t.d. avdúka, at eitt hvítvaskeftirlitsmál er farið í gongd orsakað av einari fráboðan frá t.d. einum peningastovni.

Eftir núgaldandi reglum kann partsinnlit verða latið sambært fyrisitingarlógini í upplýsingar, sum Hvidvasksekretariatet hevur latið víðari til aðrar almennar myndugleikar. Tó eru tagnarskylduásetingar longu ásettar í hvítvasklógini fyri Tryggingareftirlitið og fyri Skráseting Føroya.

Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet, heruppií upplýsingar í einari fráboðan eftir § 25 í hvítvasklógini, kunnu í útgangsstøði ikki vera einasta grundarlag fyri, at ein myndugleiki t.d. TAKS kann taka eina ávísa avgerð í einum skatta- ella avgjaldsmáli. Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet eru í útgangsstøði ikki partur av tí grundarlagi, sum ein møgulig avgerð hjá t.d. TAKS verður tikin á. Í útgangsstøði eru tað bert tær upplýsingar, sum myndugleikin seinni fær til vegar, sum verða grundarlag undir eini avgerð eftir t.d. skattalóggávuni,

avgjaldslóggávuni ella tollóggávuni, og sum tann skrásetti harvið hevur áhuga í at verða gjørdur kunnugur við. Áðrenn ein fyrisitingarlig avgerð verður tikin, skal partshoyring fara fram eftir § 18 í fyrisitingarlógini um tær upplýsingar, sum parturin ikki er kunnugur við, og sum hava týdning fyri avgerðina í málinum. Tað eru ikki sjálvar upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet, sum verða grundarlagið fyri avgerðini.

Sambært § 15, stk. 1 í fyrisitingarlógini kann rætturin til innlit í upplýsingar verða avmarkaður. Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet kunnu helst í nógvum førum verða undantiknar innliti eftir hesi ásetingini, men parturin kann fáa innlit í aðrar upplýsingar í skjølunum orsakað av regluni um ekstrahering. Harvið er møguleiki fyri, at tað í einum máli, ið er fráboðað eftir hvítvasklógini, kann verða eyðmerkt, hvør persónur ella fyritøka hevur fráboðað. Aleina útfrá slagnum av upplýsingum kann tað vera møguligt at eyðmerkja, at t.d. peningastovnurin hjá viðkomandi hevur latið myndugleikunum upplýsingarnar.

Tað verður ikki mett rætt, at persónar, sum í sínum starvi hava eina fráboðanarskyldu eftir hvítvasklógini, skulu kunna eyðmerkjast. Eitt nú, at ein bankaráðgevi verður í vanda fyri at verða konfronteraður við ella hóttur av kundum orsakað av, at kundin hevur fingið innlit í eitt skjal frá einum almennum myndugleika, sum vísir, at viðkomandi bankaráðgevi hevur latið inn eina fráboðan til Hvidvasksekretariatet.

Eftir núgaldandi reglum hava tey, sum lata Hvidvasksekretariatet eina fráboðan, ikki eina generella verju móti, at tað kemur út, at tey hava fráboðað. Mett verður, at tað er tørvur á reglum, sum verja hesar persónarnar í slíkum førum.

Skotið verður tí upp at áseta í § 36 a, at tagnarskyldan viðvíkjandi upplýsingum, sum stava frá einari fráboðan sambært § 25 í hvítvasklógini, verður víðkað til at galda fyri øll starvssett innan almennu umsitingina.

Tað verður ásett, at starvsfólk, ið virka innan almennu umsitingina, hava skyldu til undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini at halda upplýsingar loyniligar, sum stava frá eini fráboðan eftir § 25. Eisini verður ásett í § 36 a, stk. 2, at ásetingarnar í § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgevingarskyldu og §§ 27 og 30 um víðarilatan av upplýsingum millum fyrisitingarmyndugleikar í fyrisitingarlógini, ikki eru galdandi fyri upplýsingar, sum eru nevndar í stk. 1.

Við einari slíkari serstakari áseting um tagnarskyldu verður vikið frá partsrættindum sambært fyrisitingarlógini, sum annars vildu havt við sær, at upplýsingarnar kundi verið latnar viðkomandi. Harafturat hevur ein slík lógaráløgd tagnarskylda við sær, at skyldan at kunna skrásetta um upplýsingar sambært § 24 í dátuverndarlógini ikki er galdandi. Sambært § 25, stk. 2, nr. 4 í dátuverndarlógini er kunningarskyldan sambært § 24 í dátuverndarlógini ikki galdandi, um persónsupplýsingarnar skulu verða verandi í trúnaði sambært einari lógarásettari tagnarskyldu.

Tá ein slík tagnarskylda verður ásett í § 36 a, verður innlit heldur ikki latið í upplýsingarnar eftir løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, tí sambært § 14 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina er skyldan at lata innlit í upplýsingar avmarkað av ásetingum um tagnarskyldu, sum eru ásettar í lóg ella við heimild í lóg fyri persónar, sum virka í almennari tænastu ella starvi.

Á henda hátt verða starvsfólk vard, sum starvast í fyritøkum, ið eru fevndar av hvítvasklógini, og sum hava skyldu til at senda Hvidvasksekretariatet fráboðanir.

Ásetingin um tagnarskyldu forðar tó ikki fyri, at málið seinni kann verða meldað til løgregluna, sum í tí sambandi eisini kann fáa fráboðanina.

Um illgruni er um hvítvask ella fígging av yvirgangi, skulu peningastovnar, tryggingarfeløg, grannskoðarar, ognarmeklarar o.o sambært galdandi lóg beinanvegin boða Hvidvasksekretariatet frá hesum. Í onkrum førum sendir Hvidvasksekretariatet upplýsingar ella fráboðanir um persónar og fyritøkur víðari til t.d. TAKS. Slík mál verða send víðari til TAKS í førum, har mett verður, at eingin vandi er fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi, men at tað kunnu vera viðurskifti viðvíkjandi skatta-, toll- og avgjaldslóggávuni, sum eru viðkomandi fyri TAKS at vita meira um.

TAKS er ikki ein eftirlitsmyndugleiki sambært hvítvasklógini. Tí eru ongar ásetingar í hvítvasklógini um tagnarskylduna hjá TAKS í sambandi við, at Hvidvasksekretariatet hjá SØIK í onkrum førum sendir upplýsingar um persónar og fyritøkur víðari til TAKS.

Persónurin, sum ein fráboðan til Hvidvasksekretariatet snýr seg um, hevur ikki rætt til innlit í tær upplýsingar, sum viðvíkja viðkomandi. Sambært § 36 í hvítvasklógini hava fyritøkur og persónar, sum eru fevndir av hvítvasklógini, skyldu til at halda tað loyniligt, at ein fráboðan er latin inn, at tað verður umhugsað at lata fráboðan inn, ella at ein kanning sambært § 24 í hvítvasklógini fer at verða sett í verk.

Eftir galdandi lóggávu hevur TAKS skyldu til at boða persóninum, sum fráboðanin viðvíkur frá, tá TAKS móttekur eina slíka fráboðan frá Hvidvasksekretariatet. Málsviðgerðin hjá TAKS fer fram innan karmarnar av fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit og dátuverndarlógini.

Sambært § 151 í skattalógini er, umframt vanligu tagnarskylduna sambært revsilógini, eisini ein serlig regla um tagnarskyldu galdandi fyri skattaumsitingina. Sambært ásetingini er bannað at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum skattaumsitingin fær at vita um inntøku- og ognarviðurskifti, vinnuviðurskifti ella viðurskifti, sum viðkoma heimalívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan hon røkir sítt starv eftir skattalógini. Tagnarskyldan sambært ásetingini viðvíkur sostatt óviðkomandi persónum.

Ongar ásetingar eru í hvítvasklógini um tagnarskylduna hjá TAKS, tá TAKS fær upplýsingar frá Hvidvasksekretariatet, og sum stava frá fráboðanum til Hvidvasksekretariatet sambært § 26 í hvítvasklógini.

TAKS hevur sostatt skyldu til sambært § 24 í dátverndarlógini at kunna skrásetta um, at TAKS hevur móttikið upplýsingar frá Hvidvasksekretariatet um skrásetta, tí talan er um upplýsingar, sum ikki eru innheintaðar hjá skrásetta sjálvum. Í fráboðanini til skrásetta framgongur, hvørji sløg av upplýsingum TAKS hevur móttikið.

Slíkar upplýsingar, sum TAKS fær frá Hvidvasksekretariatet, eru ikki nóg fullfíggjaðar til at TAKS kann taka eina avgerð við støði í upplýsingunum. Neyðugt er at gera eina meting av, hvørt upplýsingarnar kunnu vera eitt grundarlag fyri at byrja eitt skatta-, toll- ella avgjaldseftirlitsmál. Tí mugu fleiri viðkomandi upplýsingar innheintast, eitt nú upplýsingar

um kontur í peningastovnum, kontuúttøku í eitt heilt inntøkuár, roknskapar- og bókhaldstilfar o.o. Upplýsingarnar verða innheintaðar hjá persóninum ella fyritøkuni. Í tann mun persónurin ikki gongur áheitanini um upplýsingarnar á møti inniheintar myndugleikin tær beinleiðis frá peningastovninum ella øðrum viðkomandi pørtum.

Sostatt kunnu upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet ikki vera einasta grundarlag fyri at TAKS í einum máli fer at áseta ella broyta skattaálíkningina ella eina avgjaldsuppgerð. Í útgangsstøði eru tað bert tær upplýsingarnar, sum TAKS seinni innheintar, sum verða grundarlagið fyri ásetan ella broyting í skattaálíkningini ella í eini avgjaldsuppgerð, og sum tann skrásetti tí hevur ein áhuga í at gerast kunnugur við. Hesar upplýsingar eru partur av tí grundarlagnum, sum tað skal partshoyrast um sambært § 18 í fyrisitingarlógini, áðrenn ein avgerð verður tikin.

Eftir núgaldandi reglum hevur parturin í málinum sambært fyrisitingarlógini rætt til partsinnlit í upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet, um biðið verður um hesar. Sambært § 15, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini kann innlit í upplýsingar verða avmarkað, tá talan er um fremjing av almennum eftirliti, skipanar- ella ráðleggingarvirksemi ella ætlaðum tiltøkum sambært skatta- og avgjaldslóggávuni. Um nevndu umstøður bert eru galdandi fyri ein part av skjalinum, skal parturin hava innlit í restina av innihaldinum í skjalinum, sbrt. § 15, stk. 2 í fyrisitingarlógini. Um umsitingin á TAKS við heimild í § 15, stk. 1, nr. 4 noktar innliti í part av einum skjali, er tað framvegis møguleiki fyri innliti í partar av skjalinum, og í einum máli, ið er fráboðað eftir hvítvasklógini, er harvið møguleiki fyri t.d. at persónurin ella fyritøkan, sum hevur fráboðað, kann verða eyðmerkt.

Eftir núgaldandi reglum hava tey, sum lata Hvidvasksekretariatet eina fráboðan, ikki eina slíka generella verju. Mett verður, at tað er tørvur á reglum, sum verja hesar persónarnar í slíkum førum. Ásetingin, sum nú verður skotin upp í § 36 a í hvítvasklógini, forðar fyri, at almennir myndugleikar, t.d. TAKS lata upplýsingar víðari, sum stovnurin hevur móttikið í einari fráboðan frá Hvidvasksekretariatet.

1.3.12. At lata upplýsingar víðari í sambandi við samstarv um hvítvask og fígging av yvirgangi

Sambært § 55 í hvítvasklógini kann landsstýrismaðurin seta eina bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært løgtingslógini. Hesin bólkurin skal samskipa váðametingarnar og almennu tiltøkini móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hjá myndugleikunum. Landsstýrismaðurin kann avgera at víðka skaran við umboðum fyri aðrar myndugleikar.

Sambært § 152, stk. 3 í revsilógini er ein upplýsing í trúnaði, tá ið hon við lóg ella aðrari gildigari áseting er nevnd so, ella tá ið tað aðramáta er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at varða um munandi umhugsni til almenn ella privat áhugamál. Tað er ikki nærri ásett í revsilógini, hvørji almenn ella privat áhugamál hava við sær, at ein upplýsing skal metast at vera í trúnaði, og tískil verður ein nærri skilmarking av hesum í stóran mun gjørd útfrá normum uttan fyri revsilógina.

Ein av hesum ásetingunum er § 26 í fyrisitingarlógini, har tey flestu atlitini verða reksað upp, sum eftir eina ítøkiliga meting kunnu føra til, at ein upplýsing er í trúnaði og tí undir tagnarskyldu.

Sambært § 26 hevur hann sum virkar innan almennu fyrisitingina tagnarskyldu, sbr. revsilógina § 152 og §§ 152c-l52f, tá ein upplýsing við lóg ella aðrari gildari áseting hevur trúnaðarfrámerki, ella tá tað annars er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at verja serstøk fyrilit viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum, og verða nøkur ávís viðurskifti nevnd, sum tagnarskyldan er galdandi fyri.

Um tað ikki eru serstakar ásetingar í serlóggávu, sum heimila fyrisitingarmydugleikum at lata upplýsingar víðari til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta fara fram eftir ásetingunum í § 27 í fyrisitingarlógini og í samsvari við ásetingar í dátuverndarlógini hesum viðvíkjandi.

Sambært § 27, stk. 2 í fyrisitingarlógini kunnu upplýsingar, sum § 27, stk. 1 fevnir um, einans latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika, um

1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki,

2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari,

3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan, herundir umhugsni honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella

4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri, at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur.

Ásett er í § 31, stk. 1 í fyrisitingarlógini, at í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki hevur rætt til at lata eina upplýsing víðari, skal myndugleikin eftir áheitan frá einum øðrum fyrisitingarmyndugleika lata upplýsingina víðari, um hon hevur týdning fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

Sambært § 151 í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt er, umframt vanlig tagnarskylduna sambært revsilógini, eisini ein serlig regla um tagnarskyldu galdandi fyri tey, sum starvast hjá TAKS. Sambært ásetingini er bannað at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum starvsfólkini fáa at vita um inntøku- og ognarviðurskifti, vinnuviðurskifti ella viðurskifti, sum viðkoma heimalívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan viðkomandi røkir sítt starv eftir skattalógini.

Ásetingarnar í fyrisitingarlógini, dátuverndarlógini, og í ávísum førum serlóggávuni, geva møguleika fyri, at upplýsingar um likamligar og løgfrøðiligar persónar, undir ávísum treytum og aftaná eina ítøkiliga meting, kunnu verða latnar víðari m.a. í teimum førum, har tað er neyðugt orsakað av samfelagsligum ella almennum áhuga.

Í stríðnum móti hvítvaski og fígging av yvirgangi er tørvur á, at myndugleikar samstarva og vitanarumbýta soleiðis, at átøkini móti hvítvaski og fígging av yvirgangi verða munagóð og málrættað. Í einum slíkum samstarvi hevur tað stóran týdning, at myndugleikarnir kunnu

skifta um upplýsingar um m.a. aktuell rák og váðar innan lógarbrot. Tað hevur týdning, at myndugleikar kunna skifta um upplýsingar um ítøkiligar partar, og har trúnaður má vera, tí talan er um upplýsingar av eymum slagi.

Fyri at tryggja, at samstarvið millum myndugleikarnar kann virka verður skotið upp, at TAKS hóast § 151 í skattalógini kann lata upplýsingar víðari til myndugleikar, sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Endamálið er at tryggja, at TAKS fær luttikið á jøvnum føti við aðrar viðkomandi myndugleikar, sum luttaka í einum slíkum skipaðum samstarvi. Harumframt verður ásett ein generell treytaleys tagnarskylda um tær upplýsingar, sum myndugleikarnir í samstarvinum móttaka í hesum sambandi. Ásett verður, at persónar, sum starvast innan almennu umsitingina, og sum luttaka í einum skipaðum samstarvi, hava skyldu til at halda loyniligar tær upplýsingar, sum verða móttiknar í sambandi við samstarvið.

Í einum slíkum skipaðum samstarvi móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hava myndugleikarnir tørv á, at m.a. umrøða ítøkilig mál, persónar, váðar og illgrunasom viðurskifti viðvíkjandi hvítvaski og fígging av yvirgangi. Tá myndugleikarnir hava møguleika fyri at umrøða hesi viðurskifti, verður tað møguligt at samskipa átøk innan økið. Neyðugt er eisini at áseta, at tey, sum starvast hjá myndugleikanum, skulu halda loyniligar tær upplýsingar, sum tey fáa frá øðrum myndugleikum innan samstarvið, tí hetta hevur stóran týdning fyri verandi ella komandi átøk innan økið hvítvask og fígging av yvirgangi. Myndugleikarnir hava tørv á at kunna skifta um allar viðkomandi upplýsingar fyri saman at kunna samskipa eitt møguligt átak uttan at átakið ella eitt komandi átak verður í vanda. Tí er neyðugt, at m.a. ásetingarnar í fyrisitingarlógini í § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgeving og rættindi sambært dátuverndarlógini verða sett til síðis.

Rætturin hjá einum parti til innlit sambært § 18 í fyrisitingarlógini kann aftaná eina ítøkiliga meting verða avmarkaður, men tað verður mett at vera ein generellur tørvur á at forða fyri, at innlit kann verða latið. Orsøkin er, at tann myndugleikin, sum móttekur upplýsingarnar frá einum øðrum myndugleika í sambandi við eitt myndugleikasamstarv, ikki í øllum førum er kunnugur við orsøkina til, at upplýsingin er í trúnaði, hvørjir partar av upplýsingunum eru serliga viðkvæmir, avleiðingina av, at ein upplýsing verður latin víðari ella vavið á málinum, sum upplýsingin er partur av.

Skotið verður upp, at tað verður ásett í § 51 b, at starvsfólk hjá TAKS, hóast ásetingina um tagnarskyldu í § 151 í skattalógini, kunnu lata upplýsingar víðari til myndugleikar, sum luttaka í einum skipaðum samstarvi, har endamálið er at basa og fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangi. Myndugleikar, sum luttaka í einum slíkum samstarvi, kunnu eitt nú, umframt TAKS, vera Skráseting Føroya, Tryggingareftirlitið, Fíggjareftirlitið, Hvidvasksekretariatet og umboð fyri løgregluna. Tær upplýsingar, sum TAKS av sínum eintingum kann lata víðari eru upplýsingar, sum TAKS metir, kunnu hava týdning fyri fyribyrging og stríði móti hvítvask og fígging av yvirgangi. Um hugt verður eftir øllum teimum mongu og torgreiddu háttunum, ið verða nýttir í málum um hvítvask og fígging av yvirgangi, er tørvur á, at myndugleikar kunnu lata upplýsingar víðari, tá mett verður, at upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri fyribyrging og stríðið ímóti hesum. Hetta kann t.d. vera viðkomandi í einum føri, har ein persónur fleiri ferðir flytur stórar peningaupphæddir til útlandið, ella har ein persónur er stjóri í fleiri feløgum, hóast persónurin ikki hevur serligar førleikar ella royndir, ið gera hann føran fyri at røkja hetta starvið. Um ein myndugleiki kemur við einari áheitan um at lata upplýsingar víðari krevst tað, at hesin myndugleikin hevur mett, at upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri uppgávuna at fyribyrgja og stríðast ímóti

hvítvaski og fígging av yvirgangi. Myndugleikin, sum biður um upplýsingarnar, skal sostatt hava ein varhuga av, at upplýsingarnar kunnu vera við til at lýsa eitt møguligt lógarbrot, sum hevur tilknýti til hvítvask og fígging av yvirgangi. Hetta kann t.d. vera í einum føri, har upplýsingar fyriliggja frá t.d. ríkisløgregluni um, at ein persónur verður mettur at hoyra til eitt netverk ella ein bólk, sum fremur skipað brotsverk.

Í § 51 b er ein heimild til at skifta um upplýsingar, tá hetta er ein liður í hesum samstarvinum millum myndugleikar. Mett er um, hvørjir partar eru viðkomandi í einum slíkum samstarvi og harvið, hvørjir myndugleikar eru viðkomandi móttakarar av upplýsingunum. TAKS skal tí ikki gera nakra ítøkiliga meting av, um tað í ítøkiligum føri er heimild til at lata upplýsingar víðari í sambandi við tað skipaða samstarvið eftir hvítvasklógini. Tað skal heldur ikki gerast nøkur ítøkilig meting, hvørt upplýsingarnar eru viðkomandi fyri allar luttakararnar í skipaða samstarvinum.

Mett verður, at broytingarnar verða við til at fremja tað skipaða samstarvið sambært hvítvasklógini.

Sum dømi um, hvørjar upplýsingar TAKS kann lata víðari til aðrar myndugleikar í skipaða samstarvinum, kunnu nevnast upplýsingar um navngivnar persónar, sum sambært TAKS hava stovnað fleiri fyritøkur, ið verða nýttar til eitt higartil ókent slag av sviki við skatti og avgjøldum, ið verður mett at hava samband við hvítvask. Á tann hátt fer tað at bera til hjá TAKS at luttaka á fundi í tí skipaða samstarvinum og umrøða virksemið hjá persóninum og t.d. orsakirnar til virksemið og arbeiðshættirnar hjá persóninum.

Skotið verður eisini upp at áseta í § 55 a í uppskotinum, at persónar, ið virka innan almenna fyrisiting, og sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, hava skyldu til at halda trúnaðarupplýsingar loyniligar, sum verða móttiknar í hesum sambandi. Hetta er galdandi fyri m.a. upplýsingar, sum verða móttiknar frá Hvidvasksekretariatet, ríkisløgregluni, SØIK, TAKS, Skráseting Føroya, Tryggingareftirlitinum og Fíggjareftirlitinum. Skotið verður upp, at tagnarskyldan eisini verður galdandi fyri tann likamliga ella løgfrøðiliga persónin, sum upplýsingarnar viðvíkja, hóast eina møguliga rættarliga skyldu at lata upplýsingarnar víðari til viðkomandi sambært ásetingunum í fyristingarlóggávuni ella dátuverndarlóggávuni.

Ásetingin í § 55 a er ein serstøk áseting um tagnarskyldu. Henda áseting avmarkar skylduna at lata upplýsingar víðari eftir løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, og avmarkar í størri mun møguleikan at nýta og lata upplýsingar víðari enn vanliga ásetingin um tagnarskyldu í § 26 í fyrisitingarlógini.

Hetta inniber, at trúnaðarupplýsingar, ið verða givnar í einum skipaðum samstarvi millum myndugleikar, ikki mugu latast víðari uttan, at myndugleikin, sum hevur latið upplýsingarnar gevur sítt samtykki, og myndugleikin, ið móttekur upplýsingarnar hevur avmarkaðar møguleikar at nýta upplýsingarnar. Vikið verður frá vanligu reglunum í m.a. fyrisitingarlógini í § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgeving, § 27 um latan av upplýsingum til annan fyrisitingarmyndugleika, § 30 um latan av upplýsingum eftir áheitan og reglum sambært dátuverndarlógini um upplýsingarskyldu og um rætt til innlit. Hendan skipanin skal tryggja neyðugan trúnað, sum í útgangsstøði er neyðugur við atliti til uppgávuna hjá myndugleikunum at fyribyrgja og stríðast ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Ein myndugleiki, sum hevur latið upplýsingar víðari í sambandi við skipaða samstarvið kann geva samtykki til, at upplýsingarnar verða brúktar í málsviðgerðini hjá einum av hinum myndugleikunum í samstarvinum. Tá myndugleikin, ið móttekur upplýsingarnar, so viðger hesar, eru upplýsingarnar ikki longur fevndar av serstøku tagnarskylduni í § 55 a, stk. 1 og 2. Í staðin eru tá tær vanlig reglurnar um nýtslu og víðarilatan av upplýsingum galdandi fyri hesar upplýsingarnar. Frávikið frá teimum vanligu fyrisitingarrættarligu reglunum er tá heldur ikki galdandi longur. Eingi ávís formkrøv eru galdandi fyri samtykkið frá myndugleikanum, sum hevur latið upplýsingarnar víðari. Sostatt kann samtykkið latast m.a. munnliga, t.d. á einum fundi í skipaða samstarvinum. Viðkomandi myndugleikar mugu í slíkum føri, sum liður í málsviðgerðini, tryggja neyðugt skjalprógv við einum notati, har tað gongur fram, at samtykki er givið, og hvat tað fevnir um.

1.3.13. Virksemið hjá Hvidvasksekretariatet
Í galdandi løgtingslóg um hvítvask verður Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet (SØIK) nevnt í fleiri ásetingum.

Hvidvasksekretariatet hevur áður verið ein sjálvstøðug eind í SØIK, men bygnaðarbroytingar hava verið, og er Hvidvasksekretariatet nú ein sjálvstøðug eind í National Enhed for Særlig Kriminalitet. Hvidvasksekretariatet virkar sum kongsríkis Danmarkar fíggjarliga eftirkanningareind, og hevur sum uppávu at taka ímóti, greina og víðarilata upplýsingar til viðkomandi myndugleikar viðvíkjandi illgruna um hvítvasking og fígging av yvirgangi.

Í hvítvasklógini er ásett, at fyritøkur, persónar og eftirlitsmyndugleikar skulu lata Hvidvasksekretariatet fráboðanir, um hesi fáa kunnleika til viðurskifti, sum geva orsøk til at halda, at viðurskiftini hava tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi.

Hvidvasksekretariatet kannar og metir um móttiknar fráboðanir. Í tí sambandi verða gjørdar operativar og strategiskar greiningar fyri at kunna meta um, hvørt upplýsingarnar skulu føra til, at ein fráboðan verður send ella eitt veruligt tilmæli um rannsókn verður sent løgregluni, tí illgruni er um hvítvask av vinningi frá revsiverdum gerðum, ella ein fráboðan verður send PET, tí illgruni er um fígging av yvirgangi, ella ein fráboðan verður send TAKS, kommununum ella øðrum myndugleikum.

Hvidvasksekretariatet luttekur regluliga á fundum við feløgini, sum umboða tey fráboðanarskyldugu, og við myndugleikar, har sekretariatet kemur við generellari afturboðan og kemur við viðkomandi kunning um hvítvaskøkið. Hvidvasksekretariatet ger eina frágreiðing fyri hvørt kvartalið, sum myndugleikar og fráboðanarskyldug kunnu fáa. Í frágreiðingini eru upplýsingar um arbeiðið hjá Hvidvasksekretariatet, tal av fráboðanum og dømi um ítøkilig mál, har fráboðanir eru partur. Fráboðanir mugu ikki latast víðari til óviðkomandi. Hvidvasksekretariatet ger og dagførir nationalu váðametingina á hvítvaskøkinum, sum m.a. viðvirkar til, at viðkomandi fyritøkur, persónar og myndugleikar leypandi arbeiða við at eyðmerkja, meta um og skilja vandarnar fyri hvítvaski, so átøkini á økinum gerast munadygg.

Í viðmerkingunum til 4. hvítvaskdirektivið hjá ES stendur, at øll londini eiga at skipa ein operationelt óheftan myndugleika, ið kann innsavna og greina tær upplýsingar, sum verða móttiknar við atliti til at vísa á sambandið ímillum illgrunasamar flytingar og duld brotsverk, so hvítvask av peningi og fígging av yvirgangi kann verða fyribyrgt og niðurbart. Eisini

stendur tað í viðmerkingunum, at allar illgrunasamar flytingar, heruppií royndir at gera flytingar, eiga at verða fráboðaðar uttan mun til støddina á flytingini.

Í grein 32, stk. 1 í direktivinum verður álagt londunum at skipa ein myndugleika, sum skal fyribyrgja, uppklára og munadygt stríðast ímóti hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi. Myndugleikin skal vera óheftur, og skal hava heimild og orku til at útinna sínar uppgávur frítt og taka sjálvstøðugar avgerðir um at greina, biðja um og lata víðari ítøkiligar upplýsingar.

Soleiðis, sum Hvidvasksekretariatet er skipað í dag, verður mett, at tað í praksis lýkur krøvini í 4. hvítvaskdirektivinum og tilmælini frá FATF. Tó verður mett, at tað eigur at verða ásett meiri nágreiniligt í hvítvasklógini, hvørjar uppgávurnar hjá Hvidvasksekretariatet eru.

Skotið verður upp, at ásetingin í § 28 í lógini verður orðað av nýggjum, so hon samsvarar við ásetingina í donsku hvidvaskloven, sum er sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan og verður dagførd samstundis, sum hvítvasklógin verður dagførd.

Sambært ásetingini skipar og varðveitir Hvidvasksekretariatet trygdarskipanir og trygdarpolitikkir soleiðis, at tryggjað verður, at kjarnuuppgávurnar hjá Hvidvasksekretariatet verða hildnar atskyldar frá øðrum kjarnuuppgávum hjá National Enhed for Særlig Kriminalitet. At Hvidvasksekretariatet virkar sjálvstøðugt merkir, at sekretariatet hevur heimild til at útinna sínar kjarnuuppgávur, ið eru at móttaka, greina og bera fráboðanir víðari og at gera avtalur og samstarva við aðrar myndugleikar, heruppií samsvarandi myndugleikar í øðrum ES-limalondum. Eisini verður nágreinað, hvørjar kjarnuuppgávurnar hjá Hvisvasksekretariatet eru. Fyrst av øllum hevur myndugleikin sum kjarnuuppgávu at móttaka og greina illgrunasamar flytingar og aðrar upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri hvítvask av peningi og atknýtt duld lógarbrot ella fígging av yvirgangi. Eisini hevur Hvidvasksekretariatet til uppgávu at bera úrslitini av sínum greiningum og allar aðrar viðkomandi upplýsingar víðari til skikkaðar myndugleikar ella stovnar, tá illgruni er um hvítvask av peningi, atknýtt duld lógarbrot ella fígging av yvirgangi. Krøv verða ikki sett til eina nærri nágreining av illgrunanum um ávísu lógarbrotini.

Ásett verður eisini í § 28, stk. 3, at Hvidvasksekretariatet hevur í samstarvi við aðrar myndugleikar ábyrgdina av at gera og leypandi dagføra váðametingar á hvítvaskøkinum við atliti at at eyðmerkja, meta um, skilja og avmarka aktuellar vandar fyri hvítvask av peningi.

Talan er ikki um eina úttømandi uppreksan av uppgávunum hjá Hvidvasksekretariatet.

1.3.14 Samstarv millum fregnartænastur í ES

At málsførir myndugleikar í limalondunum kunnu skifta um upplýsingar og veita hvørjum øðrum upplýsingar sambært innleiðandi viðmerkingunum til 5. hvítvaskdirektivið hjá ES eitt av endamálunum við broytingunum í direktivinum. Lagdur verður dentur á, at limalondini ikki eiga at forbjóða ella seta óneyðuga strangar treytir fyri, at myndugleikarnir kunnu skifta um upplýsingar og hjálpa hvørjum øðrum í sambandi við mál um hvítvask av peningi ella fígging av yvirgangi.

Sambært grein 52 í 4. hvítvaskdirektivinum skulu ES-londini tryggja, at tað í mest møguligan mun er eitt samstarv millum hvítvaskeftirlitini í londunum. Í grein 53 í 4. hvítvaskdirektivinum, sum broytt við 5. hvítvaskdirektivi, eru ásett ein røð av krøvum um, at

hvítvaskeftirlitsmyndugleikar skulu skifta um upplýsingar, so teir skjótt og so vítt gjørligt skifta um allar viðkomandi upplýsingar fyri at kunna viðgera og greina upplýsingar um hvítvask av peningi ella fígging av yvirgangi og um teir likamligu ella løgfrøðiligu persónarnar í málinum. Harafturat er í grein 54 í 4. hvítvaskdirektivinum ásett, at upplýsingar og skjøl, sum verða móttikin eftir grein 52 og 53, skulu nýtast til at røkja uppgávurnar hjá hvítvaskeftirlitsmyndugleikanum, og at eftirlitsmyndugleikin, sum letur upplýsingar ella skjøl víðari, kann áseta avmarkingar og treytir fyri nýtslu av upplýsingunum ella skjølunum.

Sambært grein 54 í 4. hvítvaskdirektivinum skulu londini tryggja, at í minsta lagi ein kontaktpersónur ella eitt kontaktpunkt verður útnevnt til at hava ábyrgd fyri at taka ímóti fyrispurningum frá hvítvaskeftirlitsmyndugleikum í øðrum ES-londum.

Sambært grein 55 í 4. hvítvaskdirektivinum kunnu tær upplýsingar, sum skift verður um, bert nýtast til tey endamál, sum upplýsingarnar blivu latnar til. Hvítvaskmyndugleikin, sum móttekur upplýsingarnar, kann bert lata upplýsingarnar víðari til annan myndugleika, stovn ella instans ella nýta upplýsingarnar til annað endamál, enn tær upprunaliga vóru latnar, um hvítvaskmyndugleikin, sum gav upplýsingarnar, frammanundan hevur góðkent hetta. Í 5. hvítvaskdirektivi er ásett, at limalondini skulu tryggja, at ein slík góðkenning so vítt gjørligt skal gevast beinanvegin, og uttan mun til slagið av atknýttum og undirliggjandi lógarbroti. Hvítvaskmyndugleikin, sum verður biðin um eina góðkenning kann ikki nokta at góðkenna at upplýsingarnar verða latnar víðari uttan so, at serligar orsakir eru. Ein orsøk kann vera, at endamálið við at lata upplýsingarnar víðari liggur uttanfyri tær uppgávurnar, sum myndugleikin skal røkja. Aðrar orsakir kunnu vera, at ávís orsøk eru til at halda, at tað kann hava við sær, at tað verður truplari at fyribyrgja, uppklára ella kanna revsiverdar gerðir ella fremja revsirættarligar atgerðir ella, at tað á annan hátt ikki er í samsvari við grundleggjandi meginreglur í nationalum rætti at upplýsingarnar verða latnar víðari. Harafturat er ásett, at ein avgerð um at nokta at upplýsingarnar verða latnar víðari skal vera neyvt grundgivin.

Skotið verður tí upp at áseta eina nýggja § 28 a í hvítvasklógina, at Hvidvasksekretariatet í sambandi við, at upplýsingar verða latnar til ein myndugleika í einum øðrum ES-landi, skal áseta avmarkingar og treytir fyri nýtslu av hesum upplýsingunum.

Ásetingin í § 28 a skal vera við til at tryggja, at Hvidvasksekretariatet á tryggan hátt skal kunna røkja sítt fregnarvirksemi í førum, har serstakur tørvur er á at lata viðkvæmar upplýsingar víðari, og har tað ikki altíð ber til at staðfesta, at upplýsingarnar eru eftirfarandi. Harafturat er fregnarvirksemi á fíggjarliga økinum mangan soleiðis, at tað, tá upplýsingarnar verða latnar víðari, ikki ber til at meta um, hvønn týdningin upplýsingarnar kunnu hava, tá tær verða settar saman við øðrum upplýsingum.

Álagt verður Hvidvasksekretariatet beinanvegin at svara og í mest møguligan mun ganga einari áheitan á møti, tá ein fregnartænasta á fíggjarliga økinum í einum ES-landi biður um loyvi til at lata upplýsingar, sum viðkomandi fregnartænasta hevur fingið frá Hvidvasksekretariatet, víðari til skikkaðar myndugleikar, stovnar ella instans, uttan mun til hvørji undirliggjandi lógarbrot eru knýtt afturat.

Hvidvasksekretariatet kann ikki í tí sambandi nokta at ganga einari slíkari áheitan á møti, uttan so at endamálið við at lata upplýsingarnar víðari liggur uttanfyri tær uppgávurnar, sum Hvidvasksekretariatet hevur sambært § 29, stk. 2 í anordning nr. 813 af 12. august 2019. Eisini kann umbønin verða noktað, um ávísar orsakir eru til at halda, at tað kann hava við sær, at tað verður truplari at fyribyrgja, uppklára ella kanna revsiverdar gerðir ella fremja

revsirættarligar atgerðir, ella tað á annan hátt ikki er í samsvari við grundleggjandi meginreglur í føroyskum rætti. Dømi um, at upplýsingar ikki eiga at latast víðari, tí tað ikki er í samsvari við grundleggjandi meginreglur í føroyskum rætti eru eitt nú í einum føri, har ávísar orsakir eru til at halda, at hetta kann forða fyri almennum ella rættarligum kanningum ella rættarligari viðgerð, ella tað kann verða ein hóttan móti almennu trygdini ella trygdini hjá statinum.

Álagt verður Hvidvasksekretariatet at grundgeva neyvt fyri avgerðum, har noktað verður fyri, at upplýsingar kunnu latast víðari.

Skotið verður upp, at Hvidvasksekretariatet skal yvirhalda møguligar avmarkingar og treytir fyri nýtslu av upplýsingum, sum sekretariatet fær frá fregnartænastum á fíggjarliga økinum í øðrum ES-limalondum. Tað verður greitt ásett, at Hvidvasksekretariatet einans kann nýta upplýsingarnar til tað endamál, sum tær eru innheintaðar ella latnar. Hvidvasksekretariatet kann bert lata slíkar upplýsingar víðari til skikkaðar myndugleikar o.o. ella nýta hesar til annað endamál, um fregnartænastan á fíggjarliga økinum í ES-limalandinum, sum hevur givið upplýsingarnar, frammanundan hevur givið samtykki til hetta.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra hvítvasklógina, so lógin verður heilt í samsvari við 4. hvítvaskdirektivið, og at hon harafturat verður dagførd í samsvari við 5. hvítvaskdirektivið. Yvirskipað er endamálið at seta í verk tiltøk, sum styrkja verandi karmar um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Við uppskotinum til løgtingslóg um broyting í hvítvasklógini verður lagt upp til eina røð av broytingum, har høvuðsbroytingarnar í stuttum eru hesar:

- Nýtsluøki lógarinnar verður víðkað soleiðis, at listahandlarar t.e. persónar, sum vinnuliga hava í varðveitslu, hava handil við ella miðla handil við listaverkum, verða fevndir av hvítvasklógini, tá virðið á transaktiónum ella á eini røð av innanhýsis samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira.

- Ásett verður krav um skráseting av veruligu eigarunum av útlendskum trustum ella líknandi løgfrøðiligum skipanum og aðrar reglur í hesum sambandi. Endamálið er at forða fyri, at persónar skulu kunna fjala revsiverd viðurskifti handan feløg av ymiskum slagi.

- Broytingar verða gjørdar í varskógvaraskipanini í hvítvasklógini soleiðis, at starvsfólk, sum starvast í fyritøkum ella hjá persónum, sum hava skyldu til at hava eina varskógvaraskipan, fáa betri verju. Dentur verður lagdur á, at arbeiðsgevarar ikki skulu kunna skipa starvsviðurskiftini soleiðis, at tað verður forðað fyri, at starvsfólk brúka varskógvaraskipanina, tá staðfest verður ella illgruni er um óreglusemi í fyritøkuni.

- Ásett verður, at dagliga leiðslan og lyklapersónar í fyritøkuni hava eina skyldu til uttan óneyðugt drál at fráboða evstu leiðsluni um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, tá slíkar ávaringar um hvítvask koma frá útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum, konsulentum ella varskógvarum.

- Skotið verður upp at áseta serstakar reglur um tagnarskyldu fyri starvsfólk, sum starvast hjá almennum myndugleikum. Endamálið er at verja starvsfólk, sum starvast í fyritøkum, ið eru fevndar av hvítvasklógini, og sum hava skyldu til sambært § 25 í lógini at senda fráboðanir til Hvidvasksekretariatet.

- Tryggingareftirlitið fær heimild til at áleggja fyritøkum ella persónum ein fyribils steðg í at fáa sær nýggj kundasambond, tá tað eru staðfest álvarsom brot á ásetingar í hvítvasklóggávuni.

- Fyri grovt brot á hvítvasklógina fer fyrningarfreistin úr 5 árum upp í 10 ár.

- Ásetingin um myndugleikauppgávurnar o.a. hjá Hvidvasksekretariatet verður umorðað, so tað meira nágreiniliga gongur fram, hvørjar uppgávurnar eru, og haraftrat verður ein nýggj áseting í lógini, har ásett verður, hvussu Hvidvasksekretariatet kann samstarva við samsvarandi myndugleikar í ES-londum.

- Onkrar ásetingar verða strikaðar, har óneyðug dupultregulering er í hvítvasklógini og í hvidvaskloven m.a. ásetingar um lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi tann 6. februar 2023 uppskotið út til hoyringar hjá myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreistin varð sett til 23. februar 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Advokatfelagið, Fíggjarmálaráðið, TAKS, Dátueftirlitið, Føroya Realkreditstovnur, P/f Tryggingarfelagið Lív, Betri Pensjón, Betri Trygging, Trygd, Meklarin, Skyn, Betri Heim, Lívsverk – Eftirlønargrunnur Løntakaranna.

Hesir myndugleikar og feløg hava latið viðmerkingar til uppskotið:

Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Bank Nordik, P/F Tryggingarfelagið Lív, Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið.

Vinnuhúsið svaraði, at feløgini í Vinnuhúsinum ikki hava viðmerkingar til uppskotið, og Fíggjarmálaráðið og Betri Pensjón svaraðu, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Í høvuðsheitum verður tikið undir við uppskotinum. Flestu av innkomnu viðmerkingunum eru av lógartekniskum slag, og hava tær ikki týðandi innihaldsligar broytingar við sær. Í flestu førum eru viðmerkingarnar tiknar til eftirtektar og uppskotið rættað samsvarandi.

Viðmerkingar Uttanríkis- og vinnumálaráðsins eru viðgjørdar í viðlagda hoyringarnotati, sí fylgiskjal 2.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Skotið verður upp, at listahandlarar í vinnu koma undir eftirlitisøkið hjá Skráseting Føroya, tá ið teir varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií listasøvn og uppboðshús, har virðið á transaktiónum ella eini røð av innanhýsum samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira. Talan er um eina nýggja uppgávu fyri Skráseting Føroya.

Skotið verður upp, at umsitarar av trustum ella persónar, ið røkja eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, nú skulu skráseta ávísar upplýsingar í kt-skipan Skráseting Føroya. Ávísar nýggjar umsitingarligar uppgávur verða í tí sambandi lagdar til Skráseting Føroya.

Sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2023 er lagt upp til, at Skráseting Føroya fær hægri játtan, og er endamálið við hesum, at størri arbeiðsorka skal setast av á stovninum til uppgávur viðvíkjandi eftirliti sambært hvítvasklógini. Mett verður, at nýggju uppgávurnar sambært hesum uppskoti kunnu røkjast innanfyri ta játtan, sum fíggjarlógaruppskotið fyri 2023 leggur upp til.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Víst verður til viðmerkingarnar í kap. 2.1.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

Sambært uppskotinum verða tey, sum vinnuliga hava í varðveitslu, hava handil við ella miðla handil við listaverkum, fevnd av hvítvasklógini, tá virðið á transaktiónum ella á eini røð av innanhýsum samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira. Listahandlarar verða frameftir undir eftirliti av Skráseting Føroya, og verða teir fevndir av ásetingum í hvítvasklógini, sum hava við sær fleiri umsitingarligar uppgávur, m.a. reglum um kundakunnleikamannagongdir og um fráboðanir til Hvidvasksekretariatet.

Sambært uppskotinum verður krav sett um skráseting av veruligu eigarunum av útlendskum trustum ella líknandi løgfrøðiligum skipanum í kt-skipan hjá Skráseting Føroya.

Starvsfólk og fyrrverandi starvsfólk hjá fyritøkum og persónum, sum hava skyldu til at fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklóggávuna, fáa sambært uppskotinum eina betri verju m.a. verður tað staðiliga ásett eitt forboð móti í einari avtalu um tagnarskyldu at avtala, at tagnarskyldan eisini er galdandi fyri fráboðanir til almennu myndugleikarnar um brot á hvítvasklóggávuna. Eisini er ásett í uppskotinum, at tað ikki skal hava avleiðingar fyri lønarviðurskiftini hjá starvsfólkum ella fyrrverandi starvsfólkum, sum hava fráboðað. Harafturat verður skotið upp, at hvørki núverandi ella fyrrverandi starvsfólk mugu verða útsett fyri ólagaligari viðferð ella fylgjum av, at starvsfólk ella fyrrverandi starvsfólk hevur

fráboðað einum eftirlitsmyndugleika ella einari innanhýsis varskógvaraskipan um brot ella illgruna um brot á hvítvasklóggávuna.

Skotið verður upp, at tað nú verður staðiliga ásett í lógini, at dagliga leiðslan og lyklapersónar í fyritøkuni hava eina skyldu til uttan óneyðugt drál at fráboða evstu leiðsluni um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, tá slíkar ávaringar um hvítvask koma frá útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum, konsulentum ella varskógvarum.

Ávísar broytingar verða gjørdar í ásetingunum viðvíkjandi fyritøkum og persónum, sum Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við. Skotið verður upp, at upplýsingarskyldan verður víðkað soleiðis, at upplýsingar, sum hava stóran týdning fyri eftirlitið hjá Tryggingareftirlitnum, skulu latast beinanvegin og uttan at biðið er um tær frammanundan. Eisini verður, at tryggingarfeløg o.o. hava skyldu til at rætta upplýsingar, sum er latnar Tryggingareftirlitinum, um fyritøkan ella persónurin seinni staðfesta, at upplýsingarnar ikki vóru rættar ella góvu eina misvísandi mynd av viðurskiftunum. Skotið verður eisini upp, at Tryggingareftirlitið kann áleggja einari fyritøku ella persóni ikki at fáa sær nýggj kundaviðurskifti, tá álvarsamt brot á ásetingar í hvítvasklóggávuni er staðfest.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar og felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Wienarsáttmálin frá 1988

Tann diplomatiska ráðstevnan í Wien samtykti í 1988 sáttmálan ímóti ólógligum handli við narkotika og psykotropiskum evnum. Amboðið, sum serliga varð nýtt í sáttmálum fyri at ganga ímóti trupulleikunum av ólógligum handli við narkotika og psykotropiskum evnum, var at gera tað truplari hjá gerningsfólkunum at kanalisera vinningin av teirra ólógliga virksemi yvir í vanliga búskapin. Danmark staðfesti sáttmálan við kongligari resolusjón frá 3. desember 1991, og sáttmálateksturin er almannakunngjørdur sum bekendtgørelse nr. 50 frá 17. juni 1993.

Aðrir ST-sáttmálar o.a.

Orsakað av altjóða yvirgangi samtykti ST tann 15. september 1997 sáttmála um niðurberjing av yvirgangsbumbingum, tann 9. desember 1999 ein sáttmála um niðurberjing av fígging av yvirgangi og tann 15. november 2000 sáttmála um niðurberjing av skipaðum brotsverki um landamørk. Sum beinleiðis avleiðing av yvirgangsálopunum 11. september 2001 á New York, Washington D.C. og Pennsylvania samtykti ST harumframt tann 28. september 2001 resolusjón nr. 1373 um niðurberjing av yvirgangi og fígging av yvirgangi. Hesir sáttmálar eru gjøgnumførdir við broytingum í revsilógini.

ES-direktivir
Lógaruppskotið byggir á 4. hvítvaskdirektivið og á 5. hvítvaskdirektivið.

Financial Actions Task Force (FATF)
Orsakað av stúranini um økjandi hóttanina, sum hvítvasking av pengum er móti altjóða bankakervinum og fíggjarligu stovnunum, settu G7-londini (Kanada, Frakland, Italia, Japan, Stórabretland, Vesturtýskland og USA) á fundi 14. –16. juni 1990 í París eina task force, nevnd Financial Actions Task Force (stytt FATF). Atgerðarbólkurin viðvíkjandi hvítvasking av pengum, sum varð grundfestur í OECD-regi. FATF hevur í dag 36 limir (heruppií Føroyar saman við Danmark). ES-nevndin er eisini limur. Endamál FATF´s er í dag at gera standardar ella tilmæli fyri og at fremja regulatorisk og operationel tiltøk til at niðurberja hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi og av øðrum hóttanum móti integritetinum hjá altjóða figgjarligu skipanini. FATF arbeiðir fyri at fáa politiska undirtøku, sum er neyðug fyri nasjonalt at gjøgnumføra ábøtur í lóggávu o.a. á hesum økinum. Við hesum fyri eyga gjøgnumførir FATF vitjanir hjá einstøku limalondunum fyri at eftirmeta, hvussu limalondini fylgja tilmælunum frá FATF, og hvussu tey generelt eru fyri viðvíkjandi hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

FATF læt í 2017 frágreiðing um eftirmetingina av Danmark, sum eisini umfatar Føroyar og Gønland. Frágreiðingar FATF´s eru atkomuligar á heimsíðuni www.fatf-gafi.org.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Sambært § 59 og § 60 í galdandi lóg kann verða revsað við sekt fyri brot á nærri tilskilaðar ásetingar í uppskotinum. Tá talan er um serliga grov ella umfatandi brot á nærri tilskilaðar ásetingar, kann revsingin vaksa til fongsul upp í 6 mánaðir. Feløg o.o. (løgfrøðiligir persónar) kunnu verða áløgd revsiábyrgd sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.
Skotið verður nú upp, at revsingin fyri brot á § 38, stk. 2 í lógini kann vaksa upp í 2 ára fongsul.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið kunnu áleggja fyrisitingarligar sektir í sambandi við, at likamligir ella løgfrøðiligir persónar hava framt brot á nærri tilskilaðar ásetingar í hvítvasklógini, sbr. § 59 a í uppskotinum.

Skotið verður upp, at Skráseting Føroya sum tvingsilsráð kann áleggja umsitaranum ella persóninum, ið røkir eina samsvarandi støðu, í einum trusti ella líknandi løgfrøðiligari skipan, dagbøtur ella vikubøtur, um skyldurnar sambært § 36 a, stk. 3, 4, 6 og 7 í lógini ikki verða útintar.

Eisini verður skotið upp, at Hvidvasksekretariatet sum tvingsilsráð kann áleggja persóninum, fyritøkuni ella ábyrgdarpersóninum hjá fyritøkuni dagbøtur ella vikubøtur, um fyritøkan ella persónurin ikki útinnir tær skyldur, sum tey hava sambært § 28, stk. 3 í løgtingslógini.

Í uppskotinum er ásett, at Tryggingareftirlitið kann áleggja einari fyritøku ella persóni, ið er fevndur av § 1, stk. 1, nr. 1-4 í løgtingslógini, ikki at fáa sær nýggj kundaviðurskifti, tá ið eitt álvarsamt brot á ásetingar í lógini ella ásettar sambært løgtingslógini er staðfest. Áleggingin heldur uppat, tá fyritøkan ella persónurin mótvegis Tryggingareftirlitinum skjalprógvar, at brotið er hildið uppat.

Fyrningarfreistin fyri brot á ásetingarnar í lógini ella reglur, givnar sambært lógini, er 5 ár. Sambært uppskotinum verður fyrningarfreistin 10 ár í málum um grovt brot á nærri tilskilaðar ásetingar í hvítvasklógini.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki í sær ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki í sær ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur fyritøkum og persónum, fevnd av lógini, upplýsingarskyldur og skrásetingarskyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur, og leggur fyristingarligar heimildir til Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya. Harumframt fær Tryggingareftirlitið heimild til at áseta nærri reglur um innlatan av upplýsingum, sum eru neyðugar fyri at gera váðametingar, sbr. § 38, stk. 7 í uppskotinum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Niðanfyri í serligu viðmerkingunum til einstøku ásetingarnar verður stutt greitt frá høvuðsinnihaldinum í ásetingunum, og verður annars víst til viðmerkingarnar í uppskotinum til donsku hvítvasklógina, sum er viðlagt sum fylgiskjal 2 (2018/1 LSF 204) og fylgiskjal 3 (2019/1 LSF 58) til uppskotið, umframt at tað verða gjørdar aðrar serligar viðmerkingar, har tørvur er á tí. Serligu viðmerkingarnar til einstøku ásetingarnar í uppskotinum til donsku hvítvasklógina, sum víst verður til, eru sostatt eisini viðmerkingar og tulkingaríkast til einstøku ásetingarnar í hesum uppskotinum.

Til § 1, nr. 1

Sambært galdandi § 1, stk. 1, nr. 1 fevnir løgtingslógin um "Realkredittstovnar".

Sambært serligu viðmerkingunum til galdandi áseting í § 1, stk. 1, nr. 1 er Realurin eisini fevndur av lógini, og heldur tað fram eftir ásetingini í § 1, stk. 1, nr. 1. Harvið er Føroya Realkreditstovnur (Realurin) longu fevndur av lógini.

Skotið verður nú upp, at hetta staðiliga verður ásett í § 1, stk. 1, nr. 1, at Føroya Realkreditstovnur er fevndur av lógini. Hetta stig verður tikið, tí Føroya Realkreditstovnur er ikki eitt realkredittinstitutt í vanligari merking, men er ein stovnur, sum er fevndur av løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn. Fyri at eingin ivi skal taka seg upp, verður tað staðiliga ásett í lógini, at Føroya Realkreditstovnur er fevndur av hvítvasklógini.

Broytingin hevur ongar avleiðingar við sær í praksis, tí Føroya Realkreditstovnur er longu, vísandi til serligu viðmerkingarnar til § 1, stk. 1, nr. 1 fevndur av hvítvasklógini og Tryggingareftirlitið hevur longu eftirlit við stovninum.

Til § 1, nr. 2

Sambært tí galdandi § 1, stk. 1, nr. 6 eru ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur fevndar av hvítvasklógini. Tey, ið miðla leigumál, eru eisini fevnd av hugtakinum ognarmeklari, sbrt. nr. 8 í innganginum til 4. hvítvaskdirektivið.

Skotið verður upp, at hetta nú verður nágreinað í ásetingini í § 1, stk. 1, nr. 6, so tað nú er staðiliga ásett, at ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur eisini eru fevndir av lógini, tá teir virka sum millumgongufólk í sambandi við útleigan av fastari ogn, eisini eru fevnd av hvítvasklógini.

Á henda hátt verður tað greiðari, at lógin eisini fevnir um hetta virksemið, og lógin verður heilt í samsvari við grein 1, stk. 1, litra b, í 5. hvítvaskdirektivinum, har krav er um, at ognarmeklarar og ognarmeklarafyritøkur skulu vera fevndar av nationalu lóggávuni um hvítvask, tá teir eru millumgongumenn í sambandi við útleigan av fastari ogn.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 3 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 3

Sambært ásetingini í § 1, stk. 1, nr. 7 fevnir hvítvasklógin um fyritøkur og persónar, sum annars vinnuliga lata somu veitingar, sum teir í nr. 5-6 og í § 1, stk. 1, nr. 14 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme nevndu persónsbólkar, undir hesum grannskoðarar, sum ikki eru góðkendir eftir grannskoðaralógini, skattaráðgevarar og eksternir bókhaldarar.

Skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at ásetingin, umframt nevndu fyritøkur og persónar, eisini fer at fevna um ein og hvønn annan persón, ið átekur sær at veita hjálp, stuðul ella ráðgeving um skattaviðurskifti sum sítt mest týðandi vinnuliga virksemi.

Ásetingin er í samsvari við § 1, stk. 1, litra a í 5. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 4 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 4

Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av broytingini í § 1, nr. 6.

Til § 1, nr. 5
Persónar og fyritøkur, sum vinnuliga varðveita, handla við ella miðla sølu av listaverkum, eru ikki fevnd av galdandi hvítvasklóg.

Skotið verður upp at áseta eitt nýtt nr. 10 í § 1. Sambært uppskotinum verða persónar og fyritøkur, sum vinnuliga varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií listasøvn og uppboðshús, har virðið á transaktiónum ella á eini røð av innanhýsis samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira.

Broytingin hevur við sær, at persónar og fyritøkur, sum vinnuliga varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum verða fevnd av hvítvasklógini, og at tey harvið skulu yvirhalda ásetingarnar í hvítvasklógini um m.a. kundakunnleikamannagongdir og um fráboðanir til Hvidvasksekretariatet.

Markið verður sett við 50.000 kr., hóast markið í 5. hvítvaskdirektivinum er 10.000 evrur. Orsøkin til hetta er, at tað frammanundan er eitt kontantgjaldsbann í § 5 í hvítvasklógini á 50.000 kr. Sambært ásetingini í § 5 kunnu persónar og fyritøkur fevnd av lógini og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme ikki taka ímóti kontantgjaldingum á 50.000 kr. ella meira, og er hetta galdandi uttan mun til, um gjaldingin er í einum ella sum fleiri gjaldingar, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar. Markið fyri, nær handil við listaverkum kemur undir hvítvasklógina, er ásett útfrá hesum.

Ásetingin er í samsvari við grein 1, stk. 1, litra c, í 5. hvítvaskdirektivinum, sum er ein broyting til grein 2, stk. 1, nr. 3, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 5 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 6

Ásetingin í § 1, stk. 1 í hvítvasklógini viðvíkur virkisøki lógarinnar, heruppií hvørjar persónar og fyritøkur lógin er galdandi fyri. Bert teir persónar og tær fyritøkur, sum eru nevnd í ásetingini, ið eru fevnd av lógini.

Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 3 í § 1. Ásett verður, at § 34 a er galdandi fyri útlendskar deildir hjá føroyskum fyritøkum. Hetta inniber, at útlendskar deildir hjá føroyskum fyritøkum verða fevndar av § 34 a, sum viðvíkur skylduni hjá fyritøkum at fráboða ovastu leiðsluni, tá ávaringar um hvítvask og fígging av yvirgangi eru.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 6 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 7

Talan er um eina rætting, tí eitt "í" manglar í ásetingini. Eingin broyting er í týdninginum á ásetingini.

Til § 1, nr. 8

Í galdandi áseting í § 2, nr. 9 verður hugtakið "veruligur eigari" allýst. Skotið verður upp at broyta ásetingina, so allýsingarnar verða í samsvari við grein 3, nr. 6, í 4. hvítvaskdirektivinum, sum broytt við grein 1, stk. 1, nr. 2, litra b, i 5. hvítvaskdirektivinum, har allýsingin av hugtakinum "veruligur eigari" er ásett.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 8 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 9

Skotið verður upp at áseta nr. 13, 14 og 15 sum nýggj nr. í § 2. Sostatt er talan um nýggjar ásetingar, har endamálið er at allýsa hugtøkini "trust", "líknandi løgfrøðilig skipan" og "umsitari av einum trust".

Í uppskotinum til § 2, nr. 13 verður hugtakið trustur allýst. Ein trustur verður allýstur sum ein eind, sum ikki er ein løgfrøðiligur persónur, sum er stovnaður eftir ynski hjá stovnaranum um at flyta ognir til ein umsitara til fyrimuns fyri ein ella fleiri njótunartilskilaðar.

Eitt eyðkenni fyri ein trust er, at stovnarin flytir ognir til ein ella fleiri umsitarar við boðum um at umsita ognirnar til fyrimuns fyri ein ella fleiri njótunartilskilaði.

Fyri at talan skal vera um ein trust skulu fylgjandi treytir vera loknar: 1) stovnarin skal hava ætlan um at stovna ein trust, 2) tað skal vera vissa um, hvørjar ognir eru fevndar av trustinum, og rættinum hjá teimum njótunartilskilaðu, og 3) tað skal vera vissa fyri endamálinum við trustinum og samleikanum hjá teimum njótunartilskilaðu.

Stovnan av einum trusti byggir á avtalu. Eingi formkrøv eru galdandi, og merkir tað, at ein trustur kann verða til uppá nógvar mátar. Tó er tað í flestu førum eitt stovningarskjal í sambandi við, at ein trustur verður stovnaður, har vilji stovnarans gongur fram.

Ein trustur hevur í minsta lagi ein stovnara, ein umsitara og ein serliga njótunartilskilaðan persón. Stovnari er antin ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, sum flytir trust-ognirnar til umsitaran. Umsitarin er tann persónurin, sum ræður yvir trust-ognunum eftir fyriskipan hjá stovnaranum, ið vanliga eru ásettar í einum trust-skjali, ið er grundarlag fyri trustinum og gevur umsitara rætt til at umsita trust-ognirnar. Njótunartilskilað eru tann ella teir persónarnir, í hvørs áhuga trusturin er stovnaður, og teirra rættindi eru vanliga ásett í trust-skjalinum. Harafturat kann stovnarin velja at innseta ein verja, sum m.a. kann hava til uppgávu at tryggja, at umsitingin av trust-ognunum er sambært ynskjunum hjá stovnaranum í einum sonevndum ”letter of wishes”.

Ein trustur er ikki ein løgfrøðiligur persónur og hevur tí ikki sjálvstøðugt rættarføri. Tað merkir, at ein trustur ikki kann vinna rættindi ella skuldbindast, t.d. gera sáttmálar og vera partur í rættarmálum.

Við tí endamáli at fáa betri rættartrygd og javnbjóðis treytir í ES hevur tað týdning, at tað verður greitt ásett, hvørjar løgfrøðiligar skipanir orsakað av teirra endamáli og skipan verða mettar at svara til trustar.

Tey londini, sum viðurkenna trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir, skulu eyðmerkja trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir, sum kunnu setast á stovn sambært lóggávuni ella siðvenju í landinum.

Almenn atgongd til upplýsingar um veruligar eigarar kann forða fyri, at trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir verða misbrúkt á sama hátt sum hetta kann forða fyri at feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir verða nýttar til hvítvask av peningi og fígging av yvirgangi.

Í § 2, nr. 15 verður ásett, at umsitari av einum trusti ella ein persónur, sum røkir eina samsvarandi støðu í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, er at skilja sum ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, sum hevur ræði á ognunum hjá trustinum samsvarandi fyriskipanum frá stovnaranum.

Mótvegis umheiminum sýnist ein umsitari av einum trusti at vera eigari av trust-ognunum. Umsitarin kann tó ikki ráða frítt yvir ognunum, men er bundin av fyriskipanum stovnarans. Umsitarin kann bæði vera ein likamligur persónur, ið hevur góðtikið at vera umsitari fyri ein ávísan trust, og løgfrøðiligur persónur, sum rekur vinnuliga trust-umsiting. Ein trustur kann hava ein ella fleiri umsitarar. Hevur ein trustur fleiri umsitarar, kunnu umsitararnir búgva ella vera skipaðir í ymiskum londum bæði innanfyri og uttanfyri ES.

Til § 1, nr. 10

Í § 3, stk. 1 og 2 verður hugtakið hvítvask allýst.

Í § 3, stk. 1, nr. 1, 2 og nr. 3 verður hugtakið allýst sum:

1) Av órøttum at taka ímóti ella útvega sær ella øðrum part í fíggjarligum vinningi ella ognum, sum er fingin við revsiverdum lógarbroti.

2) Av órøttum at krógva, varðveita, flyta, hjálpa við avhending ella á annan hátt seinni at virka fyri at tryggja fíggjarliga vinningin ella ognirnar frá einum revsiverdum lógarbroti.

3) Roynd ella viðvirkan til slíkar gerðir.

Skotið verður upp, at tað í § 3, stk. 2 verður ásett eitt nýtt 2. pkt., har allýsingin av hvítvaski í stk. 1 eisini fevnir um gerðir, sum eru farnar fram á økinum hjá einum øðrum landi.

Ætlanin við ásetingini er ikki at broyta galdandi rættarstøðu. Talan er hinvegin um eina nágreining, so tað er púra greitt, at eisini gerðir, sum eru framdar í útlandinum, eru fevndar av allýsingini í hvítvasklógini av hugtakinum hvítvask, og harvið eru tær eisini revsiálagdar sambært føroyskum rætti.

Ásetingin er í samsvari við grein 1, stk. 4, í 4. hvítvaskdirektivi.

Til § 1, nr. 11

Heitið á Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet broytist til Hvidvasksekretariatet í ásetingunum: § 7, stk. 3, § 25, stk. 1, 1. pkt., § 25, stk. 3, 1. og 2. pkt. § 25, stk. 5, § 27, og § 34, stk. 2, 1. pkt.

Til § 1, nr. 12

Í galdandi áseting í § 9 í hvítvasklógini er ásett, nær fyritøkur og persónar skulu seta í verk kundakunnleikamannagongdir. Í § 9, nr. 1 er ásett, at kundakunnleikamannagongdir skulu setast í verk, tá fyritøkur ella persónar stovna eitt kundasamband, tá týðandi umstøður hjá kundanum broytast og annars til hóskandi tíðir.

Skotið verður upp, at tað í § 9, nr. 1 aftaná ”annars til hóskandi tíðir” verður ásett ”heruppií tá fyritøkan ella persónurin í viðkomandi álmanakkaárinum løgfrøðiliga hevur skyldu til at seta seg í samband við kundan við tí fyri eyga at kanna eina og hvørja viðkomandi upplýsing viðvíkjandi tí ella teimum veruligu eigarunum.”

Tá ásetingin verður broytt soleiðis sum skotið upp, verður ásetingin í § 9, nr. 1 í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 9, litra b, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Fyritøkur og persónar, sum fremja brot á ásetingina í § 9 kunnu verða revsað, sbr. § 59, stk. 1 og stk. 2. Dømi um brot á ásetingina kann t.d. vera ein peningastovnur, sum í sambandi við eina flyting á 5.000 kr. fyri ein kunda, fær illgruna um, at peningurin er vinningur frá revsiverdari gerð, men í tí sambandi ikki setur í verk kundakunnleikamannagongd.

Ásetingin er í samsvari við grein 10, stk. 1, grein 11, og grein 14, stk. 5, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 16 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 13

Í galdandi áseting í § 10 í lógini eru vanligu krøvini til kundakunnleikamannagongdir ásett. Í § 11, stk. 1, nr. 2 er ásett, at fyritøkan ella persónurin skulu kanna samleikaupplýsingarnar við støði í skjølum, dátum ella upplýsingum, útvegaðar frá álítandi ella óheftari keldu.

Í 5. hvítvaskdirektivinum verður krav sett um, at skjøl, dátur ella upplýsingar, ið skulu nýtast til at kanna samleikan hjá kundanum, skulu fáast til vegar frá álítandi og óheftari keldu, heruppií elektroniskum eyðmerkingaramboðum, viðkomandi álitistænastum, sbr. ES-fyriskipan 910/2014/EU af 23. juli 2014 om elektronisk identifikation og tillidstjenester til brug for elektroniske transaktioner på det indre marked og om ophævelse af direktiv 1999/93/EF, ella eitthvørt annað trygt slag av fjareyðmerkingartilgongd ella elektroniskari eyðmerkingartilgongd, sum skikkaðir myndugleikar í landinum hava regulerað, viðurkent, góðkent ella góðtikið.

Skotið verður nú upp at áseta sum § 10, stk. 1, nr. 2, 2. pkt. at við álítandi og óhefta keldu skilst eitt nú elektroniskt eyðmerkingaramboð, viðkomandi álitistænastur ella eitthvørt annað trygt slag av fjareyðmerkingartilgongd ella elektronisk eyðmerkingartilgongd, ið skikkaðir myndugleikar hava regulerað, viðurkent, góðkent ella góðtikið.

Við uppskotinum verður ásetingin í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 8, litra a, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 17 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 14

Í § 10, stk. 1, nr. 3, 2. pkt. er ásett, at tað í førum, har kundin er ein løgfrøðiligur persónur, skulu fremjast hóskandi tiltøk fyri at fáa greiðu á eigarabygnaðinum og ræðisbygnaðinum hjá løgfrøðiliga persóninum. Ásetingin er í samsvari við grein 13, stk. 1, litra b í 4. hvítvaskdirektivinum.

At fáa greiðu á eigarabygnaði og ræðisbygnaði skal skiljast soleiðis, at upplýsingar skulu fáast til vegar um nøvnini á leiðsluni og tekningarreglurnar. Tað skal gerast eina ítøkilig váðameting, hvussu neyv kanning skal gerast fyri at fáa greiðu á eigara- og ræðisbygnaðinum hjá kundanum. Í førum, har vandin er avmarkaður, kann tað vera nóg mikið við einari mynd við bygnaðinum, har eigarapartar ella upplýsingar úr eigaraskránni síggjast. Í øðrum føri kann tað vera neyðugt at fáa til vegar skjalprógv fyri eigarapørtum sambært viðtøkum ella líknandi. Í øllum kundaviðurskiftum skulu tiltøk setast í verk fyri at fáa greiðu á eigara- og eftirlitsbygnaðinum hjá einum løgfrøðiligum persóni, men vavið á tiltøkunum, sum skulu setast í verk, skal vera útfrá einari váðameting av viðurskiftunum við kundan.

Veruligu eigararnir, sum nevndir í 1. pkt., eru ein partur av eigara- og eftirlitsskipanini hjá løgfrøðiliga persóninum, og at fáa greiðu á eigara- og eftirlitsskipanini hjá løgfrøðiliga persóninum viðvirkar til at stuðla undir hetta.

Galdandi áseting í stk. 1, nr. 3 skal síggjast í samanhangi við krøvini í kapittul III í 4. hvítvaskdirektivinum, har ásett er, at limalondini skulu áleggja løgfrøðiliga persóninum eina skyldu at innheinta og goyma dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnir av løgfrøðiliga persóninum, og at myndugleikar og fyritøkur, sum eru fevnd av kundakunnleikamannagongdunum sambært 4. hvítvaskdirektivinum, skulu hava atgongd til hesar upplýsingarnar. Víst verður til grein 30 og 31 í 4. hvítvaskdirektivinum. Fyritøkur og persónar, sum lógin fevnir um, kunnu nýta eigaraskránna hjá Skráseting Føroya, sbrt. kunngerð nr. 5. frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skráseting Føroya. Fyritøkurnar og persónarnir skulu altíð gera eina váðameting av kundaviðurskiftunum, og kunnu tí ikki í øllum førum bert fyrihalda seg til hesar upplýsingarnar úr eigaraskránni, sbr. grein 30, stk. 8, har ásett er, at fyritøkur og persónar ikki einans kunnu fyrihalda seg til upplýsingarnar í skránni. Kundakunnleikakrøvini skulu lúkast eftir einari váðagrundaðari tilgongd. Eigaraskráin kann nýtast sum kelda til eyðmerking av veruligu eigararunum av fyritøkuni, og sum kelda til eftirlit við veruligu eigarunum av fyritøkunum.

Skotið verður upp at áseta í § 10, stk. 1, nr. 3, 2. pkt., at tað eisini skulu setast í verk hóskandi tiltøk fyri at fáa greiðu á eigara- og eftirlitsskipanini, um kundin er ein løgfrøðiligur persónur, heruppií ein grunnur, ella ein ikki løgfrøðiligur persónur, heruppií ein trust ella ein líknandi løgfrøðilig skipan. Tað merkir, at ein persónur ella fyritøka, sum eru fevnd av hvítvasklógini, skal eyðmerkja teir likamligu persónarnar, sum eru veruligir eigarar av tí løgfrøðiliga persóninum, so tað gerst greitt, hvør veruliga eigur kundan.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 18 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 15

Í galdandi áseting í § 10, stk. 1, nr. 3, 1. pkt. verður kravt, at fyritøkan ella persónurin skal fáa til vegar samleikaupplýsingar um tann ella teir veruligu eigararnar og seta í verk hóskandi tiltøk fyri at kanna samleikan hjá tí ella teimum veruligu eigarunum, so fyritøkan ella persónurin við vissu veit, hvør tann ella teir veruligu eigararnir eru.

Skotið verður upp at áseta í § 10, stk. 1, nr. 3, 3. pkt., at í teimum førum, har veruligi eigarin er er njótunartilskilaður av ognini hjá einum trusti ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan, sbr. § 2, nr. 9, litra b, nr. iv, ella ognini hjá einum grunni ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan, sbr. § 2, nr. 9, litra c, skal fyritøkan ella persónurin fremja tey tiltøk, sum eru nevnd í § 10, stk. 1, nr. 3, 1. pkt. í seinasta lagi, tá útgjalding fer fram, ella tá móttakarin útinnir sín rætt.

Ásetingin er í samsvari við grein 13, stk. 6, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Skotið verður upp at áseta í § 10, stk. 1, nr. 3, 4. pkt., at verður tann dagliga leiðslan eyðmerkt sum veruligur eigari, skal fyritøkan ella persónurin fremja tey neyðugu hóskandi

tiltøkini fyri at føra eftirlit við samleikanum hjá tí ella teimum likamligu persónunum, ið eru í dagligu leiðslu kundans.

Tey neyðugu hóskandi tiltøkini skal skiljast sum t.d., at persónar og fyritøkur, ið hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir, í sambandi við eyðmerking og eftirlit við veruligum eigarum, ikki bert kunnu fyrihalda seg til skránna hjá Skráseting Føroya, uttan so at kundaviðurskiftini hava ein avmarkaðan váða.

Daglig leiðsla er sambært § 2, nr. 1 í hvítvasklógini allýst sum persónar, sum hava ábyrgd av dagligu leiðsluni hjá einum løgfrøðiligum persóni, heruppií ábyrgdina av rakstri, umsetningi og øðrum úrslitum.

Allýsingin av veruligum eigara er ásett í § 2, nr. 9 í hvítvasklógini.

Í uppskotinum til § 10, stk. 1, nr. 3, 5. pkt., verður ásett, at fyritøkan ella persónurin skal varðveita upplýsingar um tiltøkini, sum eru sett í verk, og møguligar ikomnar trupulleikar í sambandi við útinnan av eftirlitinum.

Ásetingin er í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 8, litra b, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Fyritøkur og persónar, sum eru fevndir av lógini, kunnu revsast fyri brot á ásetingina, sbr. § 59, stk. 1, 2. pkt., og stk. 2.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 19 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 16

Sambært galdandi áseting í § 13 skulu fyritøkur og persónar kanna samleikaupplýsingar hjá kundanum og tí ella teimum veruligu eigarunum, áðrenn eitt handilssamband við kundan verður stovnað ella ein transaktión verður framd. Ásetingin er í samsvari við grein 10, stk. 1, og grein 14 í 4. hvítvaskdirektivinum.

Í 5. hvítvaskdirektivinum verður sett sum krav, at tað, í samband við eitt nýtt handilssamband við eitt felag ella aðra løgfrøðiliga eind, ella ein trustur ella eina líknandi løgfrøðiliga eind, sum hevur skyldu til at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar, verður áløgd viðkomandi eindini ein skylda til at innheinta eitt skrásetingarprógv ella úrdrátt av upplýsingum úr skránni.

Í uppskotinum til § 13, stk. 1, 2. pkt., verður ásett, at tað í teimum førum, har handilssamband verður skipað við eitt felag ella aðra løgfrøðiliga eind, ella ein trustur ella líknandi løgfrøðiliga skipan, sum hava skyldu til at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar í skipanini hjá Skráseting Føroya, skal fyritøkan ella persónurin fáa til vegar skrásetingarprógv ella ein úrdrátt av upplýsingum úr skránni.

Ásetingin er í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 9, litra a, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Brot á ásetingina kann verða revsað, sbr. § 59, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 20 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 17
Talan er um eina rætting. Í galdandi § 14 verður víst til § 13, stk. 5. Hetta er ein feilur, tí vísast skal til § 13, stk. 4. Hetta verður nú rættað.

Til § 1, nr. 18

Í dag eru ongar reglur, sum áleggja fyritøkum ella persónum, sum skulu fremja kundakunnleikamannagongdir sambært lógini, at fráboða ósamsvar millum skrásettar upplýsingar um veruligar eigarar, tá tey verða varug við hetta.

Sambært grein 1, nr. 15, litra b, og 16, litra f, í 5. hvítvaskdirektivinum, sum broytir grein 30 og 31 í 4. hvítvaskdirektivinum, er tað eitt krav, at skipanir verða settar í verk, sum skulu tryggja, at upplýsingar um veruligar eigarar, sum skulu skrásetast í einari skrá, t.e. kt-skipan Skráseting Føroya, eru hóskandi, neyvar og dagførdar. Harafturat er tað ásett, at slíkar skipanir skulu hava krav um, at persónar og fyritøkur, sum skulu fremja kundakunnleikamannagongdir, hava skyldu til at fráboða ósamsvar ella feilir, sum tey finna í upplýsingunum um veruligar eigarar í kt-skipanini og í teimum upplýsingunum, sum tey hava atgongd til. Kravið er eisini galdandi fyri teir myndugleikar, sum tað er viðkomandi fyri, og har tað ikki óneyðuga nógv ger seg inn á teirra virksemi.

Sambært uppskotinum til § 14 a skulu fyritøkur og persónar, sum verða kunnug við, at ein upplýsing um veruliga eigaran av kundanum, sum er innheintað sambært ásetingunum í lógini, ikki eru í samsvari við upplýsingarnar um veruligar eigarar, sum eru skrásettar í kt-skipan Skráseting Føroya, skal ósamsvarið fráboðast Skráseting Føroya skjótast gjørligt.

Sambært § 14 a, stk. 3 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvussu tekniski parturin av fráboðanarskylduni verður lokin.

Loysnin viðvíkjandi fráboðanarskyldundi verður skipað í samsvari við grein 61, stk. 2, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 21 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 19

Sambært galdandi § 16 í hvítvasklógini skulu fyritøkur og persónar, umframt krøvini í § 10 í hvítvasklógini, fremja herdar kundakunnleikamannagongdir, tá mett verður, at vandin fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi er øktur. Fyritøkur og persónar skulu taka við í metingina teir háváðafaktorar, sum standa í skjali 2 til hvítvasklógina, umframt teir háváðafaktorar, sum verða mettir at hava týdning. Eisini er ásett í stk. 2, at fyritøkur og persónar skulu fremja kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum er á yvirlitinum hjá Kommissiónini yvir lond, sum verða mett at vera í øktum vanda fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi. Tað ber tó til sambært stk. 3 at sleppa undan hesum, um ávísar treytir eru loknar.

Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 2, sum áleggur fyritøkum og persónum at fremja herdar kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum er á yvirlitinum hjá kommissiónini yvir lond, har tað verður mett at vera øktur vandi fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi. Tær herdu kundakunnleikamannagongdirnar fevna um eina røð av viðurskiftum.

Orsøkin til, at eitt nýtt stk. 2 verður skotið upp, er, at tað harvið verður nágreinað, hvørjar kundakunnleikamannagongdir skulu gerast, um kundin er heimahoyrandi í einum landi, har mett verður, at vandin fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi er øktur.

Ásetingin er í samsvari við partar av grein 1, stk. 1, nr. 11, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Brot á ásetingina kann revsast, sbr. § 59, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2 í hvítvasklógini.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 22 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 20

Sambært § 16, stk. 2 í hvítvasklógini skulu fyritøkur og persónar fremja herdar kundakunnleikamannagongdir, um kundin hevur heimstað í einum landi, sum er á yvirlitinum hjá Kommissiónini yvir lond, sum verða mett at vera í øktum vanda fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi.

Skotið verður upp at áseta stk. 3 og stk. 4 í § 16. Talan er um nýggjar ásetingar. Sambært ásetingunum skulu fyritøkur og persónar meta um, hvørt eitt ella fleiri váðaavmarkandi tiltøk skulu setast í verk, tá eitt handilssamband ella transaktión viðvíkur londum, ið standa á lista hjá Komissiónini yvir triðjalond, sum eru í øktum vanda fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi. Fyritøkan ella persónurin skal sambært § 16, stk. 3 fremja váðaavmarkandi tiltøk, og eftir § 16, stk. 3 er møguleiki fyri at avmarka váðan meira í mun til handilsmodellið hjá fyritøkuni ella persóninum. Tað byggir á eina váðameting, nær tað er viðkomandi at nýta fleiri váðaavmarkandi tiltøk.

Brot á ásetingina kann revsast, sbrt. § 59, stk. 1 og 2 í lógini.

Ásetingarnar eru í samsvari við partar av grein 1, stk. 11, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 23 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2, og serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 2 í 2019/1 LSF 58, í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 21
Endamálið við broytingini er at gera lóggávuna á hvítvaskøkinum einfaldari og at sleppa undan dupultumsiting.

Í § 17, stk. 7 og 8 í hvítvasklógini er ásett, at landsstýrismaðurin ger og almannakunnger ein lista við nøvnum á persónum, sum eru fevnd av § 2, nr. 8, og at landsstýrismaðurin kann

áseta nærri reglur um yvirlitið, nevnt í stk. 7, undir hesum reglur um fráboðan, almannakunngering o.a.

Somu heimildir eru í § 18, stk. 7 og 8 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven). Hetta hevur við sær, at ymiskir myndugleikar skulu gera hvør sín lista við somu nøvnum á politiskt ábærum persónum, og at stovnar o.a. skulu boða frá til tveir ymiskar myndugleikar um nøvn á somu persónum.

Fyri at sleppa undan dupultumsiting, verður skotið verður upp at strika § 17, stk. 7.

Í staðin verður skotið upp at áseta sum nýggja § 17, stk. 7, at listin, sum Fíggjareftirlitið hevur gjørt um politiskt ábærar persónar í Føroyum, verður nýttur.

Tað merkir, at eisini tær fyritøkur, sum eru fevndar av hvítvasklógini, t.d. tryggingarfeløg, sum eru undir herdum krøvum til kundakunnleika til politiskt ábærar persónar, skulu nýta listan, sum Fíggjareftirlitið hevur gjørt.

Til § 1, nr. 22

Galdandi áseting í § 18 snýr seg um herd krøv til kundakunnleikamannagongdir, tá korrespondentsambond fara um landamørk við respondentar í londum uttan fyri ES, sum ES ikki hevur gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum.

Við uppskotinum verður tað nágreinað í § 18, stk. 1, at tað bert er í sambandi við korrespondentsambond, sum fara um landamørk, ið umfatar gjaldingar við einum respondentstovni uttan fyri ES, sum ES ikki hevur eina avtalu við á fíggjarliga økinum. Gjaldingar skulu í hesum sambandi skiljast sum handilsligar gjaldingar, og er virðisbrævahandil tí ikki fevndur av ásetingini.

Ásetingin er í samsvari við grein 19 í 5. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 26 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 23
Sambært galdandi áseting í § 21, stk. 3 skulu fyritøkur og persónar, fevnd av hvítvasklógini, tryggja, at triðimaður bindur seg til, eftir áheitan frá fyritøkuni ella persóninum, beinanvegin at senda avrit av samleikaupplýsingunum og eftirlitsupplýsingunum um kundan ella veruliga eigaran umframt onnur týðandi skjalprógv.

Skotið verður upp, at orðið “dáta” verður skoytt uppí orðingina “onnur týðandi skjalprógv”.

Til § 1, nr. 24
Kapittul 5 í hvítvasklógini hevur í dag heitið “Kanningarskylda, noteringsskylda, fráboðanarskylda og varðveitsluskylda”. Skotið verður upp, at kapittul 5 í lógini fær eitt nýtt

heiti, sum verður “Kanningarskylda, noteringsskylda, fráboðanarskylda, upplýsingarskylda og varðveitsluskylda”.

Tá orðið “upplýsingarskylda” verður lagt afturat í heitinum á kapittlinum verður heitið meira dekkandi fyri innihaldið í §§ 24-29 í hvítvasklógini.

Til § 1, nr. 25

Ásetingin í § 24, stk. 1 snýr seg um kanningar- og noteringsskylduna hjá fyritøkum og persónum, sum lógin fevnir um.

Fyritøkur og persónar skulu kanna bakgrundina fyri og endamálið við øllum torgreiddum og óvanliga stórum transaktiónum umframt øllum óvanligum transaktiónsmynstrum og virksemi, sum ikki hava eitt greitt fíggjarligt ella ávísiligt lógligt endamál, fyri at staðfesta, um illgruni er um ella rímilig orsøk at halda, at hesi hava ella hava havt samband við hvítvasking ella fígging av yvirgangi. Fyritøkur og persónar skulu, har tað hevur týdning, víðka eftiransingina av kundanum við tí endamáli at staðfesta, um transaktiónirnar ella virksemið sýnist illgrunsamt.

Ásetingin í § 24 í hvítvasklógini er í samsvari við grein 40 í 4. hvítvaskdirektivinum og grein 1, stk. 1, nr. 10, litra b, í 5. hvítvaskdirektivinum.

Skotið verður upp at orða ásetingina í § 24, stk. 1 av nýggjum.

Ásetingin skal síggjast í samanhangi við ásetingina við § 25 í hvítvasklógini um fráboðanarskyldu til Hvidvasksekretariatet.

Skotið verður upp, at tað verður ásett eitt nýtt stk. 2 í § 24. Innihaldið í stk. 2 í uppskotinum er tað sama sum í galdandi § 24, stk. 1, 2. pkt. Ásetingin skal síggjast í samanhangi við § 10, stk. 1, nr. 5 og § 10, stk. 3 um eftiransan við kundanum.

Endamálið við kanningarskylduni sambært § 24 er at staðfesta, um tað, sum verður mett at vera óvanligt, verður til ein veruligan illgruna um hvítvask av vinningi ella fígging av yvirgangi, ella talan bert er um ein varhuga ella illgruna, sum kann avsannast. Tað merkir, at tað bert verður sett ein kanning í verk í teimum førum, har tað er ein veruligur illgruni ella tað eru rímuligar orsakir til at halda, at ein transaktión ella virksemi hevur ella hevur havt við hvítvask ella fígging av yvirgangi at gera.

Broytingin av orðaljóðinum í § 24 hevur sum endamál at fáa ásetingina at samsvara meira neyvt við ásetingina í grein 1, stk. 1, nr. 10, litra b, nr. iv í 5. hvítvaskdirektivinum.

Brot á ásetingina kann verða revsað, sbr. § 59, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2 í hvítvasklógini.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 30 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 26

Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av broytingini í § 1, nr. 24.

Til § 1, nr. 27

Í hvítvasklógini eru í dag fleiri ásetingar um virksemi og heimildir hjá Hvidvasksekretariatet í málum um hvítvask, heruppií um fráboðanarskyldu til Hvidvasksekretariatet sambært § 25, stk. 1 og § 27.

Sambært galdandi áseting í § 28, stk. 1 í hvítvasklógini kann Hvidvasksekretariatet hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet geva tí fyritøku, persóni ella myndugleika, sum hevur fráboðað sambært § 25, stk. 1 og § 27 í lógini, kunning um støðuna í málinum, undir hesum um ákæra er reist, um endalig avgerð er tikin ella um málið er lagt til viks.

Sambært § 28, stk. 2 mugu fráboðanir, sum eru móttiknar sambært stk. 1, ikki latast víðari til óviðkomandi.

Útyvir hetta eru ongar reglur í hvítvasklógini um uppgávur og virksemið hjá Hvidvasksekretariatet.

Hvidvasksekretariatet hos Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet (SØIK) er tann fíggjarliga kanningareindin hjá danska statinum. Eitt sonevnt nationalt FIU, sum er skipað við rundskrivi frá Justitsministeriets tann 30. juni 1993, hvørs uppgáva er at innsavna, skráseta, víðarilata, samskipa og viðgera upplýsingar viðvíkjandi hvítvask av vinningi frá revsiverdum gerðum. Tað er nærri ásett í grein 32, stk. 3, í 4. hvítvaskdirektivinum, hvat endamálið og uppgávurnar hjá einum FIU er.

Ásetingin í § 28 í hvítvasklógini verður orðað av nýggjum, so tað gongur greitt fram, hvat virksemið hjá Hvidvasksekretariatet er, um óheftni, og hvussu uppgávurnar verða loystar.

Hvidvasksekretariatet er ein danskur myndugleiki, og tað er tí neyvt ásett í § 29, stk. 1 og 2 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), hvørjar uppgávur myndugleikans eru.

Skotið verður upp at áseta í § 28, stk. 1 í uppskotinum, at Hvidvasksekretariatet er fregnartænasta í málum eftir hvítvasklógini. Harafturat verður víst á, at ásetingarnar í § 29, stk. 1 og 2 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) somuleiðis eru galdandi í málum eftir hvítvasklógini. Ásetingin hevur sum endamál, at lóggávan er í samsvari við grein 32, stk. 3, í 4. hvítvaskdirektivinum og at skipa rættarligu karmarnar kring virksemið hjá Hvidvasksekretariatet.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 5 í 2019/1 LSF 58, fylgiskjal 3.

Til § 1, nr. 28
Ongar ásetingar eru í galdandi hvítvasklóg um heimildir hjá Hvidvasksekretariatet at skifta um upplýsingar við FIU í øðrum ES-londum.

Skotið verður nú upp at áseta slíkar reglur í § 28 a í hvítvasklógini, sum er ein nýggj áseting. Ásetingin snýr seg um at lata upplýsingar víðari til fregnartænastur í øðrum ES-londum, um treytir í hesum sambandi, heruppií um víðarilatan av upplýsingunum, og eisini snýr ásetingin seg um, hvørjar avmarkingar og treytir eru galdandi fyri Hvidvasksekretariatet, tá myndugleikin móttekur upplýsingar frá einari fregnartænastu í einum øðrum ES-landi.

Ásetingin í § 28 a er í samsvari við grein 54, stk. 1, 2. pkt í 4. hvítvaskdirektivinum og grein 55, stk. 1 í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 6 í 2019/1 LSF 58, fylgiskjal 3.

Til § 1, nr. 29
Broytingin í § 24, stk. 3 er ein konsekvensbroyting orsakað av broytingini í § 1, nr. 24 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 30

Sambært ásetingini í galdandi § 29 í hvítvasklógini skulu fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av lógini, varðveita upplýsingar, sum eru innheintaðar í sambandi við kundakunnleikamannagongdir og skrásetingar, í minst lagi í 5 ár eftir, at handilssambandið er hildið uppat.

Skotið verður upp at áseta í § 29, stk. 3 í hvítvasklógini, at upplýsingar, skjøl og skrásetingar sambært stk. 1 skulu kunna latast víðari, tá Hvidvasekretariatet ella aðrir skikkaðir myndugleikar venda sær til fyritøku ella persón, sum eru fevnd av lógini fyri at fáa upplýst, um tey hava ella innanfyri seinastu 5 árini hava havt handilssamband við nærri tilskilaðar persónar, og hvat sambandið er um.

Uppskotið til § 29, stk. 3 er í samsvari við grein 42 i 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 33 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 31
Í dag eru ongar reglur at finna í hvítvasklógini um, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk, tá ein fyritøka úr einum triðjalandi, har øktur vandi er fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, ynskir at seta á stovn eitt dótturfelag, deild ella umboðsstovu í Føroyum.

Sambært 5. hvítvaskdirektivi skulu reglur setast í gildi, sum tryggja, at ein ella fleiri fyriskipanir verða nýttar, tá ein fyritøka úr einum triðjalandi, har tað er øktur vandi fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi, ynskir at seta á stovn eitt dótturfelag, deild ella umboðsstovu í landinum.

Skotið verður tí upp at áseta § 30 a og § 30 b í hvítvasklógina.

Í § 30 a, stk. 1 verður skotið upp, at tann myndugleiki, sum hevur eftirlit við, at ein fyritøka ella persónur yvirheldur lógina, kann nokta, at ein persónur ella fyritøka við heimstaði í einum triðjalandi, sum Europa-kommissiónin metir vera í øktum vanda, setur á stovn eitt dótturfelag, deild ella umboðsstovu í Føroyum.

Myndugleikar, sum hava eftirlit við, at persónar og fyritøkur yvirhalda hvítvasklógina, eru ávikavist Tryggingareftirlitið, sbr. § 37 í hvítvasklógini, og Skráseting Føroya, sbr. § 45 í hvítvasklógini.
Skotið verður upp í § 30 a, stk. 2, at tann myndugleiki, sum hevur eftirlit við, at lógin verður yvirhildin, kann áseta nærri reglur um, at fyritøkur og persónar við heimstaði í einum triðjalandi, sum er á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir lond í øktum vanda, kunnu stovnseta eitt dótturfelag, deild ella umboðsstovu í Føroyum, um ávísar treytir verða loknar.

Í § 30 b, stk. 1 verður skotið upp, at fyritøkur og persónar, ið eru fevndir av hvítvasklógini, sum ynskja at stovnseta eina deild ella umboðsstovu í einum landi, ið er á listanum hjá Europa-kommissiónini yvir triðjalond í øktum vanda fyri hvítvaski, skulu boða viðkomandi eftirlitsmyndugleika frá og tá lata myndugleikanum nakrar nærri tilskilaðar upplýsingar. Brot á ásetingina í § 31 b, stk. 1 kann verða revsað, sbr. § 59, stk. 1, 2. pkt.

Í § 30 b, stk. 2 verður skotið upp, at tann myndugleiki, sum hevur eftirlit, kann forbjóða fyritøkuni ella persóninum at seta á stovn deild ella umboðsstovu í einum landi, sum er á listanum hjá Europa-kommissiónini.

Skotið verður í § 30 b, stk. 3 upp, at eftirlitsmyndugleikin kann áseta reglur um, at fyritøkan ella persónurin skal taka hædd fyri, at viðkomandi deild ella umboðsstova fer at liggja í einum landi, sum ikki hevur nóg góðar skipanir til at forða fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Ásetingarnar í §§ 30 a og 30 b eru í samsvari við grein 1, stk. 1, nr. 11 í 5. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 7 í 2019/1 LSF 58, fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 32
Trygdarráðið hjá ST samtykkir tiltøk um m.a. at frysta pening. ES setur í gildi revsitiltøkini við ES-rættarskjølum, sum eru beinleiðis galdandi í limalondunum, tá tey eru almannakunngjørd í ES-tíðindum. Tað merkir, at fyritøkur og persónar í t.d. Danmark uttan ógrundaðan steðg hava skyldu til at frysta pening, sum er ogn ella í varðveitslu hjá likamligum ella løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, sum eru á yvirliti hjá ST yvir revistiltøk, tá ES hevur kunngjørt viðkomandi ES-rættarskjal í ES-tíðindum.

Frá tí, at ST hevur dagført yvirlitið við tiltøkum, og til hesi eru kunngjørd í ES-tíðindum, ganga í útgangsstøði 24-48 tímar.

Skotið verður upp at áseta eina nýggja áseting § 32 a, har ásett verður, at landsstýrismaðurin kann tilnevna ein myndugleika, sum hevur ábyrgdina av at almannakunngera nøvnini hjá likamligum og løgfrøðiligum persónum, bólkum ella eindum, sum eru sett á lista hjá ST yvir revsitiltøk. Sambært stk. 2 verða nøvnini kunngjørd á heimasíðuni hjá myndugleikanum. Lagt

verður upp til, at upplýsingarnar leypandi verða dagførdar, og tí má heimasíðan dagførast regluliga.

Ásetingin hevur við sær, at fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvasklógini, skulu halda seg kunnug við dagføringar á heimasíðuni hjá myndugleikanum. Ein myndugleiki, sum hevur ábyrgd av hesum eigur tí at hava eina skipan á heimasíðuni, sum kann senda fráboðanir til tey, sum ynskja at fáa fráboðanir um broytingar í nøvnum á heimasíðuni.

Ein fyritøka ella persónur, sum er fevndur av hvítvasklógini, sum ikki yvirheldur § 34 a, stk. 3 í hvítvasklógini, kann revsast sambært § 110 c, stk. 2 í revsilógini, har ásetingin er soljóðandi:

"Stk. 2. Við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 4 ár verður tann revsaður, sum brýtur áseting ella forboð, ið givin eru sambært lóg fyri at kunna røkja skyldur ríkisins sum limur í Sameindu Tjóðum."

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 9 í 2019/1 LSF 58, fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 33
Talan er um konsekvensbroytingar í § 33, stk. 1, 1 pkt. og í § 34, stk. 1, 1. pkt., ið verða gjørdar orsakað av broytingum í § 1 í lógini.

Til § 1, nr. 34
Galdandi áseting í § 33, stk. 1, 1. pkt. er í samsvari við grein 61, stk. 3, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Fyritøkur og persónar, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 5-9, skulu hava eina skipan, har starvsfólk gjøgnum eina serliga óhefta og sjálvstøðuga rás kunnu fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklóggávuna. Fráboðanir til skipanina skulu kunna gerast ónavngivið. Skipanin skal setast á stovn við kollektivum sáttmála. Bert fyritøkur og persónar, sum hava meiri enn 5 starvsfólk, skulu hava eina slíka skipan, og hon skal setast í verk í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at fyritøkan ella persónurin hevur sett 6. starvsfólkið. Í serstøkum førum kann eftirlitsmyndugleikin geva undantak frá kravinum um at seta eina slíka skipan í verk.

Skotið verður upp, at tað verður ásett eitt nýtt 3. pkt. í § 33, stk. 1. Ásett verður, at fyritøkur og persónar skulu syrgja fyri, at fráboðanir verða fylgdar upp, og skulu skrivligt kunna skjalprógva, hvussu fráboðanir verða fylgdar upp. Hetta inniber, at fyritøkur og persónar í sambandi við myndugleikaeftrlit skulu kunna skjalprógva, hvussu fyritøkan hevur fylgt upp í slíkum málum.

Brot á ásetingina kann sambært § 59, stk. 1 verða revsað við sekt.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 37 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 35

Í hvítvasklógini er eingin áseting um, at fyritøkur o.o. ikki mugu gera avtalu við starvsfólk við einari treyt um tagnarskyldu, har avtalan forðar fyri, at starvsfólkið gevur almennu myndugleikunum fráboðan um brot ella møguligt brot á hvítvasklóggávuna.

Eitt forboð er í § 34 í hvítvasklógini móti, at starvsfólk kunnu vera fyri ólagaligari viðferð ella fylgjum, um tey fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklóggávuna til myndugleikarnar.

Skotið verður upp at áseta í § 33 a, at fyritøkur og persónar, ið gera avtalu við eitt starvsfólk ella eitt fyrrverandi starvsfólk um tagnarskyldu, skulu samstundis áseta í avtaluni, at hetta ikki er til hindurs fyri, at starvsfólkið gevur almennum myndugleikum fráboðan um brot ella møgulig brot á hvítvasklóggávuna.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 10 í 2019/1 LSF 58, fylgiskjal 3.

Til § 1, nr. 36

Tað er ásett í § 34, stk. 1 í hvítvasklógini, at ein fyritøka ella persónur ikki má lata starvsfólk vera fyri ólagaligari viðferð ella fylgjum, um tey fráboða brot ella møgulig brot á hvítvasklóggávuna til myndugleikarnar.

Ásetingin í § 34, stk. 1 er í samsvari við grein 38 og 61, stk. 2, litra b, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Skotið verður upp, at ásetingin í § 34, stk. 1 verður víðkað til eisini at galda fyri fyrrverandi starvsfólk.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 38 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 37

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 40 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 38

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 39 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 39

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 42 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 40

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 43 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 41

Í dag er eingin áseting í hvítvasklógini, har tað útrykkiliga er álagt at fráboða nevnd ella dagligu leiðsluni í einari fyritøku um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi.

Skotið verður upp at áseta í § 34 a, stk. 1, at dagliga leiðslan í fyritøkum, ið eru fevndar av lógini, skal uttan óneyðugt drál fráboða um ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi, ið eru móttiknar frá øðrum, heruppií útlendskum myndugleikum, uttanhýsis grannskoðarum, ráðgevum umframt varskógvarum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 44 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 42
Tað er ein feilur í § 36, stk. 1-6, tá tað verður víst til eina kanning, sum er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1. Tí verður skotið upp, at "§ 25, stk. 1" verður broytt til "§ 24, stk. 1" í stk. 1-6 í § 36.

Til § 1, nr. 43
Sambært § 25, stk. 1 í hvítvasklógini skulu fyritøkur og persónar, sum eru fevndir av lógini, beinanvegin boða Hvidvasksekretariatet frá, um fyritøkan ella persónurin veit, hevur illgruna um ella rímiliga orsøk til at halda, at ein flyting, fíggjarmiðlar ella virksemi havar ella havar havt tilknýti til hvítvask ella fígging av yvirgangi.

Fyritøkur og persónar, sum eru fevnd av hvítvasklógini, leiðsla og starvssett í hesum fyritøkum og hjá hesum persónum umframt grannskoðarar og onnur, sum gera ella hava gjørt eitt ávíst arbeiði fyri fyritøkuna ella persónin, hava skyldu til at halda tað loyniligt, at fráboðan er latin Hvidvasksekretariatet, at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning fer at verða sett í verk fyri at fáa greiðu á, um ein fráboðan skal latast, sbr. § 36, stk. 1 í hvítvasklógini.

Upplýsingar hesum viðvíkjandi kunnu eftir áheitan latast víðari til teir myndugleikar og felagsskapir, ið ansa eftir, at henda løgtingslóg verður hildin, ella til rættarhandhevjandi endamál, sbr. § 36, stk. 1.

Hvidvasksekretariatet hevur til uppgávu at taka ímóti, greina og lata upplýsingar víðari um illgrunasamar flytingar, og verða upplýsingarnar í praksis latnar víðari til bæði løgregluna og til eina røð av sermyndugleikum, heruppií TAKS.

Skattamyndugleikarnir fáa í dag fráboðanir frá Hvidvasksekretariatet, um tað verður mett, at fráboðanirnar ikki viðvíkja hvítvask av vinningi frá revsiverdum gerðum ella fígging av yvirgangi, men at fráboðanin er av áhuga fyri myndugleikan á skatta-, toll- og avgjaldsøkinum. Endamálið við at senda upplýsingarnar til skattavaldið er, at upplýsingarnar verða mettar at vera viðkomandi fyri ásetan av skatti ella avgjøldum hjá viðkomandi. Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet eru í útgangsstøðinum ikki nóg mikið til at skattavaldið kann taka avgerð við støði í upplýsingunum. Tá skattamyndugleikarnir fáa upplýsingarnar, verða tær gjøgnumgingnar við atliti til at meta um, hvørt upplýsingarnar

kunnu vera grundarlag fyri einum veruligum skatta-, toll- og avgjaldseftirliti. Meta skattamyndugleikarnir, at grundarlag er fyri einari málsviðgerð, innheintar myndugleikin tær viðkomandi upplýsingarnar, sum skulu brúkast í málinum um ásetan av skattinum ella avgjaldinum. Hetta kann t.d. vera bankakontoupplýsingar, roknskapar- og bókhaldsskjøl o.a. Upplýsingarnar verða innheintaðar hjá persóninum ella fyritøkuni sjálvari. Í tann mun, persónurin ella fyritøkan ikki letur myndugleikanum umbidnu upplýsingarnar ella skjølini, verða upplýsingar innheintaðar beinleiðis frá peningastovni ella øðrum viðkomandi parti.

Í sambandi við eina slíka víðarilatan av upplýsingum kann tað hava við sær trupulleikar, um sermyndugleikin seinni gevur eitt avrit av eini hvítvaskfráboðan víðari, tí hetta kann avdúka, at t.d. eitt eftirlitsmál er byrjað við støði í einari fráboðan frá t.d. einum peningastovni.

Eftir núgaldandi reglum kann innlit verða latið í upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet eftir ásetingunum í fyrisitingarlógini, um viðkomandi persónur ella fyritøka biður um teir, og upplýsingarnar eru hjá myndugleikum, sum ikki eru fevndir av serstakari áseting um tagnarskyldu viðvíkjandi § 25 í hvítvasklógini.

Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet, heruppií upplýsingar um fráboðan eftir § 25 í hvítvasklógini, eru í útgangsstøði bert grundarlag fyri møguligum málum, sum skulu kannast nærri, og eru upplýsingarnar ikki í sjálvum sær nóg neyvir til, at myndugleikin kann taka eina avgerð í einum máli við støði í teimum.

Upplýsingarnar frá Hvidvasksekretariatet eru tí í útgangsstøði ikki partur í tí grundarlagi, sum avgerðin er tikin á. Tað er í útgangsstøði einans tær upplýsingar, sum myndugleikin seinni innheintar, sum eru grundarlagið fyri avgerðini, og sum tann skrásetti hevur áhugað í at verða gjørdur kunnigur við. Hesar upplýsingarnar eru partur í tí grundarlagi, sum partshoyrast skal um eftir § 18 í fyrisitingarlógini.

Skotið verður nú upp at víðka tagnarskylduna hjá almennum myndugleikum, sum móttaka hvítvaskfráboðanir frá Hvidvasksekretariatet, til at galda fyri starvsfólk, sum starvast hjá øllum almennum myndugleikum.

Ásett verður í § 36 a í uppskotinum, at persónar, sum virka innan almennu umsitingina, hava skyldu til undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini at halda upplýsingar, sum stava frá eini fráboðan eftir § 25 í hvítvasklógini, loyniligar. Harafturat verður ásett í § 36 a, stk. 2, at § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgevingarskyldu og §§ 27 og 30 um víðarilatan av upplýsingum millum fyrisitingarmyndugleikar í løgtingslóg um fyrisitingarlóg ikki eru galdandi fyri upplýsingar, sum eru nevndar í § 36 a, stk. 1.

Tær upplýsingar, sum ásetingin viðvíkur, og sum myndugleikar ikki mugu lata víðari, eru upplýsingar, sum eru fráboðaðar eftir § 25 í hvítvasklógini.

Við hesi serstøku tagnarskylduni verður vikið frá m.a. partsrættindunum sambært fyritisingarlógini, sum annars hevði havt við sær, at upplýsingarnar skuldu latast víðari til viðkomandi persón ella fyritøku.

Á henda hátt verður tryggja starvsfólkum og fyritøkum, sum eru fevnd av hvítvasklógini og hava skyldu til at fráboða Hvidvasksekretariatet, eina verju.

Tagnarskylduásetingin forðar ikki fyri, at fráboðanir seinni verða latnar víðari frá myndugleikanum til løgregluna í sambandi við, at eitt mál verður meldað.

Til § 1, nr. 44

Kapittul 8 a

Trustar ella líknandi løgfrøðiligar skipanir verða ikki viðurkendar vinnufelagsrættarliga í Føroyum og tískil eru viðurskifti hesum viðvíkjandi óreguleraði.

Grein 31, stk. 3 í 4. hvítvaskfyriskipanini og grein 1, nr. 16, litra a, c, d, f og h, í 5. Hvítvaskfyriskipanini hava ásetingar um veruligar eigarar av trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum. Ásetingarnar innibera, at ein skrá yvir veruligu eigararnar av útlendskum trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum, verður sett á stovn. Upplýsingar um veruligu eigararnar skulu skrásetast, tá umsitarin hevur bústað ella hevur virksemi í Føroyum. Harumframt skulu upplýsingar um veruligu eigararnar skrásetast, tá umsitarin hevur bústað ella er *stovnaður* uttan fyri ES, og tá umsitarin vegna trustin stovnar handilssambond ella keypir fastogn í Føroyum.

Í nr. 25 í innganginum í 5. hvítvaskfyriskipanini eru neyvar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar avgerandi fyri at kunna finna brotsmenn, ið annars kunnu fjala samleika sín handan vinnufelagsbygnaðir. Í nr. 26 í innganginum til 5. hvítvaskfyriskipanina stendur víðari, at orsakað av munum í rættarskipanunum í ymsu ES-limalondunum er í ES onki eftirlit við, og ongin skráseting av ávísum trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum. Hetta átti ikki at verið so, um byrgjast skal fyri, at trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir verða nýttar til at hvítta pening, at fíggja yvirgangsvirksemi ella til onnur atknýtt brotsverk.

Skotið verður tí upp, at útlendskir trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir framyvir, í ávísum førum, skulu skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar. Nýggju ásetingarnar verða settar inn sum eitt nýtt kapittul 8 a í hvítvasklógina. Skotið verður upp, at Skráseting Føroya verður myndugleiki á økinum.

Ein trustur er ein bólkur av luttakarum, ið fevnir um stovnara (settlor), umsitara (trustee), verja, um ein slíkur er og serliga njótunartilskilaðar persónar (beneficiaries). Trustar eru eyðkendir við, at stovnarin flytir ognir til ein umsitara samstundis, sum stovnarin vegleiðir umsitaran til at umsita ognirnar til fyrimuns fyri ein ella fleiri serliga njótunartilskilaðar persónar. Umsitarin hevur ognarrættin til at ráða yvir fluttu ognunum (legal owner), og serliga njótunartilskilaðu persónarnir hava búskaparliga ognarrættin (equity owner).

Uppskotið til kapittul 8 a fevnir um §§ 36 a-e. Í § 36 a er ásett ein skylda til at innheinta, varðveita og skráseta veruligar eigarar. Í § 36 b er ein allýsing av hugtakinum "veruligur eigari" og 36 c er um uppfylging av skrásettum upplýsingum og frágreiðingum, § 36 d er um ábyrdina, ið áliggur tí, sum fráboðar og § 46 e gevur Skráseting Føroya heimild til at virka sum skrásetingarmyndugleiki.

Tað eru í føroyskari lóggávu ongar ásetingar um innheintan, varðveitslu og skráseting av veruligum eigarum av trustum ella líknandi løgfrøðiligum skipanum.

Í § 2, nr. 9, litra c í galdandi løgtingslóg er ásett, at veruligur eigari er tann ella teir likamligu persónar í eini løgfrøðiligari skipan, undir hesum einum grunni, trusti ella líknandi, sum endaliga beinleiðis ella óbeinleiðis stýra ella á annan hátt hava ognarskapslíknandi heimildir. Tað kann vera nevnd, serliga njótunartilskilaðir persónar ella, um trusturin ella líknandi

løgfrøðiliga skipanin ikki kenna teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, í hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað ella virkar, umsitarin og verji, um ein slíkur finst.

§ 9, stk. 1 í galdandi løgtingslóg ásetur, at fyritøkur og persónar, sum fevnd eru av lógini, í ávísum førum skulu gera kundakunnleikamannagongdir, sbr. §§ 9-20. Kundakunnleikamannagongdirnar fevna m.a. um kunnleika um veruligu eigararnar hjá kundum.

§ 36 b

Stk. 1

Sambært art. 1, nr. 1, litra a, í 5. fyriskipan um hvítvask skal umsitari av trusti ella persónar, ið røkja líknandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, sum verður umsitin í avvarðandi limalandi, innheinta hóskandi, neyvar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella tí líknandi løgfrøðiligu skipanini.

Grein 1, nr. 16, litra c í 5. hvítvaskfyriskipanini ásetur, at í førum tá tann, ið umsitur trustin ella ta løgfrøðiligu skipanina, er stovnaður, skulu upplýsingarnir í stk. 1 varðveitast í eini høvuðsskrá. Høvuðsskráin skal stovnast í tí limalandinum, har umsitarin ella tann, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, ger handilssamband ella keypir fastogn í navni trustsins ella í navninum á líknandi løgfrøðiligari skipan.

Við § 36 a, stk. 1, verður skotið upp, at umsitarin av einum trusti ella ein persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í eini líknandi løgfrøðiligari skipan, skal innheinta og varðveita upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella hjá líknandi løgfrøðiligari skipan, sbr. § 36 c, heruppií upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum, tá umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt líknandi starv, er stovnaður ella hevur bústað í Føroyum.

Umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur sambært ætlaðu broytingunum í stk. 1, skyldu til at gera neyðugu kanningarnar fyri at kunna staðfesta, hvørjir likamligir persónar eru at meta sum veruligir eigarar av trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini. Ítøkiliga skal umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan eyðmerkja veruligu eigararnar, undir hesum gera neyðugu átøkini fyri at kunna gera av samleikan hjá veruligu eigarunum. Harumframt skulu upplýsingar um eyðmerktu veruligu eigararnar innheintast, samstundis sum skjalprógvast skal, hvussu støða er tikin til samleikan hjá veruligu eigarunum. Umrødda skyldan fevnir í minsta lagi um tað, sum umsitarin burdi vitað. Í hesum liggur m.a. at umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur skyldu til, um viðkomandi gerst kunnugur við broytingar í viðurskiftum veruliga ánarans, at kanna og um neyðugt dagføra upplýsingarnar.

Bert likamligir persónar kunnu metast at vera veruligir eigarar. Við nýggju ásetingini verður umsitarin álagdur eina skyldu til at gera neyðugu kanningarnar fyri at kunna staðfesta, hvør veruliga eigur ella hevur ræði á trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini. Umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv skal innheinta upplýsingar um persónarnar handan trustin ella líknandi løgfrøðiliga skipan og tískil er tað uttan mun til, um talan er um beinleiðis ella óbeinleiðis ognarrætt. Í førum, tá stovnarin ella umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir samsvarandi starv, er ein løgfrøðiligur persónur, er tað neyðugt at

eyðmerkja likamligu persónarnar handan løgfrøðiliga persónin, ið tá eru at meta sum veruligu eigararnir.

Í lógaruppskotinum eru ikki ítøkiligar ásetingar um, hvussu upplýsingarnar skulu fáast til vegar. Orsøkin er, at tað er tengt at, hvussu einstaki trusturin ella líknandi løgfrøðiliga skipanin er skipað. Heruppií hvørt persónarnir, ið eru partar av trustinum ella í einum bólki av persónum í líknandi løgfrøðiligari skipan, eru føroyskir ella útlendskir likamligir ella løgfrøðiligir persónar. Innheintan av upplýsingum er eisini tengd at, um upplýsingar um eigaraviðurskifti eru alment atkomuligar í viðkomandi landi o.s.fr.

Umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv skal gera hóskandi royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar, og skal altíð kunna skjalprógva fyri m.a. Hvidvasksekretariatet og Skráseting Føroya, hvørji tiltøk eru framd, og hvør eyðmerking er gjørd av veruliga eigaranum. “Hóskandi royndir” merkir, at umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv skulu gera alt, sum gerast kann fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar, uttan so at tað kann metast órímiligt ella er óhóskandi, at gera meira. Tískil er tað ikki nóg mikið, at ein veruligur eigari ikki ynskir at geva seg til kennar fyri umsitara ella persóni, ið røkir samsvarandi starv. Í slíkum førum skal umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv royna at fáa upplýsingarnar til vegar á annan hátt. Um tað vísir seg, at tað ikki ber til at fáa upplýsingarnar til vegar áliggur tað umsitara ella persóni, ið røkir samsvarandi starv at notera, hvat er gjørt fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar, og hví meira ikki kann gerast.

Umframt at fáa til vegar upplýsingar um veruligu eigararnar, undir hesum eisini samleika, skal umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, eisini hava kunnleika um rættindi teirra. Hetta ber við sær, at umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, skal hava kunnleika til, hvørji rættindi veruligu eigararnir hava, undir hesum slagið og vavið av rættindum. Tað kundi verið upplýsingar um ítøkilig krøv, um møguligar útlutingar v.m., hjá einstaklingum mótvegis viðkomandi trusti.

Rættindi kunnu til dømis vera ræðisheimildir, ið veruligu eigararnir hava til at umsita ognir trustsins og krøv hjá serliga njótunartilskilaðum persónum viðvíkjandi ognum trustsins.

Skyldan hjá umsitara ella persónum, ið røkja samsvarandi starv, til at innheinta upplýsingar um veruligu eigararnar fevnir um, í tann mun tørvur er á tí, at tryggja at upplýsingar um veruligu eigararnar eru dagførdar. Dagføringartíttleikin, ella hvussu ofta umrøddu upplýsingarnar skulu dagførast, er tengt at ítøkiligu viðurskiftinum hjá einstaka trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini. Kortini er umráðandi at upplýsingarnar um veruligu eigararnar ikki gerast statiskar.

Ásetingin, sum skotin verður upp, um skylduna hjá umsitara og persónum, ið røkja samsvarandi starv til at innheinta upplýsingar um veruligu eigararnar hjá einum trusti ella líknandi løgfrøðiligari skipan, er nýggj. Skyldan hjá umsitara ella persóni, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, til at kenna veruligu eigararnar hjá einum trusti ella líknandi løgfrøðiligari skipan er ikki nýggj, men ásett í verandi løgtingslóg.

Stk. 2

Í stk. 2 verður skotið upp, at er umsitarin ella ein persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari løgfrøðiligari skipan, virksemi ella hevur bústað uttan fyri ES, skal umsitarin ella persónurin, ið røkir samsvarandi starv, innheinta og varðveita upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini. Heruppií at innheinta og varðveita upplýsingar um rættindini hjá veruligu eigarunum, tá ið tann ið umsitur trustin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan 1) hevur

handilssamband, sbr. § 2, nr. 3, í navninum hjá trustinum ella í navninum hjá teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini ella 2) keypir fastogn í navninum hjá trustinum ella í navninum hjá teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini.

Hugtakið "handilssamband" er allýst í § 2, nr. 3, sum eitt kundasamband, sum stovningarløtuna væntast at halda fram eina tíð. Víst verður til viðmerkingarnar til § 2, nr. 3 í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, samanber við Folketingstidende 2016-2017, A, L 41, s. 111.

Harumframt verður víst til viðmerkingarnar til stk. 1.

Tað er sambært galdandi løgtingslóg ikki skylda til at skráseta upplýsingar um veruligu eigararnar hjá einum trusti ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan.

Grein 1, nr. 16, litra c, í 5. hvítvaskfyriskipanini, ið broytir grein 31, stk. 2, í 4. hvítvaskfyriskipanini, ásetur at upplýsingar um veruliga ognarrættin yvir trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum skulu varðveitast í einari høvuðsskrá yvir veruligar eigarar. Tað er limalandið, sum umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, er stovnaður ella hevur bústað, sum skal stovna skránna.

Harumframt ásetur grein 1, nr. 16, litra c, í 5. hvítvaskfyriskipanini, at í førum tá umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan hevur virksemi sítt ella hevur bústað uttan fyri ES, skulu upplýsingarnar í stk. 1 varðveitast í einari høvuðsskrá. Skráin verður gjørd av tí limalandinum, har umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan ger handilssamband ella keypir fastogn í navninum á trustinum ella í navninum hjá líknandi løgfrøðiligari skipan.

Stk. 3

Í stk. 3, 1. pkt. verður skotið upp, at umsitarin, ið umsitur trustin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, tá umsitarin ella persónurin, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan hevur fingið kunnleika til, at ein persónur er vorðin veruligur eigari, skjótast til ber skal skráseta upplýsingarnar eftir stk. 1 ella 2 í kt-skipan Skráseting Føroya.

Ásetingin um, at skráseting skal fara fram skjótast til ber, merkir, at umsitarin, ið umsitur trustin, ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, ikki uttan serliga viðurkenningarverda orsøk, kann bíða í fleiri dagar við at skráseta veruligu eigararnar. Harvið skal skrásetingin gerast uttan grundaðan steðg fyri at tryggja skránni tíðarbæri.

Harumframt verður í stk. 3, 2. pkt. skotið upp, at ein hvør broyting í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar, skal skrásetast skjótast til ber, eftir at tann, ið umsitur trustin, ella persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í eini líknandi løgfrøðiligari skipan, varnast broytingina.

Talan kann bæði verða um broytingar, ið eru ein avleiðing av, at ein nýggjur persónur verður mettur at vera veruligur eigari ella um ein persónur heldur uppat við at vera veruligur eigari. Eisini broytingar í skrásettu upplýsingunum um samleika og slag av rættindum eru fevnd av stk. 3, 2. pkt.

Verandi lóggáva gevur ikki heimild til undantak fyri at skráseta veruligu eigararnar av trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum.

Stk. 4

Sambært grein 1, nr. 16, litra c í 5. hvítvaskfyriskipanini framgongur, at í summum førum kann eitt skrásetingarprógv ella ein úrdráttur av upplýsingum um veruligu eigararnar úr eini skrá, ið verður førd av einum øðrum ES-limalandi, koma í staðin fyri skráseting av veruligu eigarunum av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini í kt-skipan Skráseting Føroya. Skyldan at skráseta verður mett at vera hildin, tá umsitarin av einum trusti ella persónar, ið røkja samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, hevur sítt virksemi ella hevur bústað í ymsum ES-limalondum, ella um umsitarin av einum trusti ella persónar, ið røkja samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan gera handissambond í fleiri ymiskum ES-limalondum í navninum á trustinum ella í navninum á líknandi løgføðiligari skipan. Skotið verður upp, at hetta verður sett inn í lógartekstin í § 36 a, stk. 4.

Skrásetingarprógv ella úrdráttur av upplýsingum um veruliga ognarrættin úr einum ES-limalandi kann koma í staðin fyri skráseting av veruligu eigarunum í tveimum førum, sum verða lýst nærri niðanfyri.

Tá umsitararnir av einum trusti ella persónar, ið røkja samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, hava virksemi ella hava bústað ymsastaðni í ES, verður skyldan at skráseta mett at verða hildin treytað av, at upplýsingar um trustin ella ta líknandi løgfrøðiligu skipanina eru skrásettar í einum øðrum ES-limalandi og skjalprógv fyri, at veruligu eigararnar eru skrásettir, er lagt við.

Tá umsitarin av einum trusti ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, vegna trustin, hevur handilssambond í fleiri ymiskum ES-limalondum, verður skyldan til at skráseta mett at vera hildin, um upplýsingar um trustin eru skrásettar og skjalprógv fyri, at veruligu eigararnar eru skrásettir í einum ES-limalandi, er lagt við.

Ásetingin hevur til endamáls at sleppa undan, at somu upplýsingar um veruligu eigararnar í einstaka trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini verða skrásettar í fleiri ES-limalondum.

Kortini skulu umrøddu upplýsingar skrásetast, tá skylda er til tess sambært serlóggávu.

Stk. 5

Sambært galdandi lóggávu hevur tann, ið umsitur ein trust ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í eini líknandi løgfrøðiligari skipan, ikki skyldu til á hvørjum ári at kanna, um broytingar eru í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar.

Grein 1, nr. 16, litra f, í 5. hvítvaskfyriskipanini ásetur, at ES-limalondini skulu tryggja, at skrásettu upplýsingarnir um veruligu eigararnar eru rættar, neyvar og viðkomandi og seta í verk mannagongdir til at røkka hesum.

Í stk. 5 verður skotið upp, at tann, ið umsitur ein trust ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einum líknandi løgfrøðiligari skipan í minsta lagi eina ferð um árið skal eftirkanna, um broytingar eru í teimum skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini.

Um viðurskifti viðvíkjandi trustinum ella tí líknandi løgfrøðiligu skipanini tala fyri tí, skal tann, ið umsitur trustin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan kanna ræðisrættin og eigaraviðurskiftini meira enn einaferð um árið. Fyritøkur skulu kunna vísa fram skjalprógv, ið vísir, at neyðugu kanningarnar eru gjørdar, smb. viðmerkingarnar til stk. 5 niðanfyri.

Upplýsingar um veruligu eigararnar skulu dagførast, tá broytingar eru í skrásettu upplýsingunum. Talan kann vera um broytingar í slagi og vavi á rættindum hjá veruligu eigarunum, undir hesum øking í ongarluti, broyting í atkvøðum, nýggjar avtalur ella avtalur, sum eru endaðar ella líknandi viðurskifti.

Stk. 6

Sambært § 58 a, stk. 2, 2. pkt. í vinnufelagslógini og § 15 g, stk. 2, 2. pkt. í vinnufyritøkulógini áliggur tað sum ein skylda, at upplýsingar um veruligu eigarar verða goymdar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat og til at goyma upplýsingar um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.

Eftir 5. hvítvaskfyriskipanini grein 1, nr. 16, litra a, skal umsitarin ella persónurm, ið røkir samsvarandi starv innheinta og varðveita hóskandi upplýsingar um veruliga ognarrættin viðvíkjandi trustinum ella tí líknandi løgfrøðiligu skipanini, ið eru neyvar og dagførdar.

Í stk. 6 verður skotið upp, at tann, ið umsitur ein trust ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan skal varðveita skjalprógv fyri teimum upplýsingunum, ið eru innheintaðar um veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, í 5 ár eftir, at tann veruligi ognarskapurin heldur uppat. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal harumframt varðveita skjalprógv fyri teimum upplýsingunum, ið eru innheintaðar um royndirnar at eyðmerkja veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, í 5 ár eftir royndina at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Skyldan hjá tí, ið umsitur ein trust ella hjá einum persóni, ið røkir starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan til áhaldandi at innheinta og dagføra upplýsingar um veruligu eigararnar fevnir í minsta lagi um tað, ið tann sum umsitur trustin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv veit ella átti at vitað. Í hesum liggur m.a., at umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur skyldu til at kanna og um neyðugt dagføra upplýsingarnar um so er, at fyritøkan verður varug við, at broytingar henda í upplýsingunum um veruligu eigararnar hjá fyritøkuni.

Fyritøkur skulu til eina og hvørja tíð kunna skjalprógva tað, sum er gjørt fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar. Umrødda skyldan, ið feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir hava til at goyma upplýsingar um tey tiltøk, ið eru gjørd fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar er ásett í grein 3, stk. 6, litra a, nr. ii í 4. hvítvaskfyriskipanini. Fyriskipanin áleggur ikki trustum ella líknandi løgfrøðiligum skipanum somu skyldu.

Fyriskipanin ásetur, at upplýsingarnar skulu fevna um samleika hjá a) stovnara, b) umsitara, undir hesum persóni, ið røkir samsvarandi starv, c) verja, um ein slíkur er, d) serliga njótunartilskilaða ella bólki av njótunartilskilaðum og e) einhvørjum øðrum likamligum persóni, ið hevur veruligt ræði á trustinum ella á líknandi løgfrøðiligari skipan. Ásetingin samsvarar við allýsingina av veruligum eigaraum hjá trustum í grein 1, nr. 2, litra b í fyriskipanini. Í førum, tá stovnarin ella tann, ið umsitur ein trust ella ein persónur, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, er ein løgfrøðiligur persónur, fevnir skyldan til at varðveita upplýsingar eisini um upplýsingar, sum umsitarin fær til vegar í royndini at eyðmerkja likamligu persónarnar handan løgfrøðiliga persónin. Í slíkum førum verða likamligu persónarnir at meta sum veruligu eigararnar.

Upplýsingarnar, sum umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur skyldu til at goyma fevna um samleikaupplýsingar hjá veruligu eigarunum (Persónstal ella útlendskt

persónstal, ríkisborgararætt o.a.). Umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, skal skráseta samleikaupplýsingarnar í kt-skipan Skráseting Føroya. Harafturat skulu upplýsingar um slag og vavið á rættindunum hjá veruligu eigarunum eisini skrásetast í skipanini.

Talan er um nøktandi skjalprógv, tá allir møguleikar eru troyttir og skjalprógvið er í samsvari við tað, sum umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv átti at vitað. Hetta inniber, at umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv kann skjalprógva, at veruligu eigararnir, heruppií veruligi ognarskapurin, er í samsvari við tað, ið er skrásett í kt-skipan Skráseting Føroya. Í førum, tá løgfrøðiligir persónar eru partur av persónskaranum í trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini, er skjalprógv fyri eigarabygnaði og ræðisbygnaði partur av skjalprógvinum í mun til, hvussu umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv er komin fram til ta niðurstøðu, at viðkomandi persónur er veruligi eigarin hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini. Skjalprógv um samskifti, sum umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv hevur havt við løgfrøðiligar persónar, sum eru partar av persónskaranum hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligari skipan antin sum stovnari, umsitari o.a., hvørs endamál beinleiðis ella óbeinleiðis var at eyðmerkja tann ella teir persónar, ið vóru mettir at vera veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, kann vera partur av teimum upplýsingum, sum skylda er til at goyma. Talan kann eitt nú vera telefonnotat ella teldupostsamskifti. Um upplýsingar um eigaraviðurskifti úr útlendskum skráum eru fingnar til vegar. kann slíkt skjalprógv (skrásetingarprógv) eisini gerast partur skjalprógvnum um innheintaðu eigararupplýsingarnar. Um umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur biðið ráðgevar (føroyskar ella útlendskar) um hjálp til at útvegar upplýsingar um persónar, ið eru at meta sum veruligu eigarar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, eru slíkar upplýsingar eisini partur av tí skjalprógvnum, ið skal goymast. Talan skal vera um skjalprógv, ið ber eyðkenni av at vera boð, t.e. tiltøk, sum ein fyritøka fremur fyri at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Skotið verður upp, at skyldan hjá umsitara og persónum, ið røkja samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, til at varðveita skjalprógv samsvarar við tað, sum er galdandi fyri feløg og aðrar løgfrøðiligar eindir, undir hesum eisini grunnar. Hetta merkir, at upplýsingarnar skulu varðveitast í 5 ár eftir, at tann veruligi eigaraskapurin heldur uppat. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal harafturat varðveita skjalprógv fyri teimum upplýsingunum, ið eru innheintaðar um royndirnar at eyðmerkja veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, í 5 ár eftir royndina at eyðmerkja veruligu eigararnar.

Stk. 7

Sambært vinnufelagslógini § 58 a, stk. 3 hava feløg skyldu til eftir áheitan at lata Føroya Landfúta upplýsingar um veruligu eigarar felagsins, undir hesum royndir at eyðmerkja veruligu eigarar tess. Felagið skal harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri at røkja eftirlitsuppgávur teirra.

Eftir grein 31, stk. 3 í 4. hvítvaskfyriskipanini kunnu skikkaðir myndugleikar og Financial Intelligence Units - FIU'er fáa atgongd til upplýsingar, ið umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, hevur innheintað og varðveitt um veruligu eigararnar hjá einum trusti ella líknandi løgfrøðiligari skipan.

Í stk. 7 verður skotið upp, at umsitarin av einum trusti ella persónur, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, eftir áheitan skal útflýggja Hvidvasksekretariatet upplýsingar um veruligu eigararnar av trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini,

heruppií um umsitaran ella persónin, ið røkir eitt samsvarandi starv, um royndirnar at eyðmerkja veruligu eigararnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu eindini. Umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal harumframt eftir áheitan útflýggja tær nevndu upplýsingarnar til aðrar skikkaðar myndugleikar, tá hesir myndugleikarnir meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri at røkja teirra eftirlitsuppgávur og eftiransingaruppgávur.

Ásetingin tryggjar, at Hvítvasksekretariatet og aðrir skikkaðir myndugleikar kunnu innheinta upplýsingar um veruligu eigararnar í skránni hjá Skráseting Føroya og harumframt, at tað ber til at fáa atgongd til ikki-skrásettar upplýsingar, undir hesum royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar. Endamálið við skylduni at lata upplýsingar og skjalprógv um royndir at eyðmerkja veruligu eigararnar saman við kravinum um, at upplýsingar um veruligu eigararnar skulu skrásetast í eini høvuðsskrá, er at tryggja, at Hvidvasksekretariatet og Skráseting Føroya, men eisini aðrir skikkaðir myndugleikar altíð hava atgongd til tíðarbærar og dagførdar upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligari skipan.

Tá myndugleikar biðja um upplýsingar um veruligu eigararnar er tað ein fortreyt, at hesar eru neyðugar fyri at avvarðandi myndugleikar kunnu røkja teirra eftirlitsuppgávur og eftiransingaruppgávur sambært lóggávu, og tað verður mett at vera tørvur á upplýsingunum í hvørjum einstøkum føri. Ásetingin inniber at eitt nú Skráseting Føroya og TAKS kunnu biðja um viðkomandi upplýsingar. Aðalendamálið við hesum partinum av ásetingini er at tryggja, at Hvidvasksekretariatet altíð hevur atgongd til tíðarbærar og dagførdar upplýsingar um veruligur eigararnar hjá grunnum.

Harumframt er tað ein fyritreyt, at myndugleikar bert innheinta upplýsingar beinleiðis frá viðkomandi trustum og persónum, ið røkja samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, í tann mun, upplýsingarnar ikki eru tøkar í kt-skrá Skráseting Føroya.

Stk. 8

Í verandi lóggávu eru ikki ásetingar, ið greitt heimila skikkaðum myndugleikum, heruppí Hvidvasksekretariatet at lata víðari upplýsingar um veruligar eigarar til aðrar skikkaðar myndugleikar og fíggarligar fregnartænastur í ES-londum.

Sambært grein 1, nr. 16, litra g, í 5. hvítvaskfyriskipanini, ið broytir grein 30, stk. 7, í 4. hvítvaskfyriskipanini, kunnu skikkaðir myndugleikar og fíggarligar fregnartænastur (FIU) rættstundis og uttan gjald geva upplýsingar víðari til aðrar skikkaðar myndugleikar og fíggarligar fregnartænastur í ES-limalondum. Sambært ásetingini er talan um upplýsingarnar, sum verða umrøddar í grein 30, stk. 1 og 3 í 4. hvítvaskdirektivinum. Talan er um upplýsingar, sum umsitarin hevur skyldu til at innheinta, varðveita og skráseta í høvuðsskránni.

Í stk. 8 verður skotið upp, at Hvidvasksekretariatet og aðrir skikkaðir myndugleikar uttan kostnað kunnu geva upplýsingar um veruligu eigararnar, ið eru skrásettar sambært stk. 3, ella innheintaðar sambært stk. 7, víðari til skikkaðar myndugleikar og fíggarligar fregnartænastur í ES-londum.

Upplýsingar um veruligu eigararnar, sum kunnu vera givnar víðari, eru upplýsingar, sum umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í einari løgfrøðiligari skipan hevur skyldu til at innheinta og til at tryggja eru dagførdar, umframt at varðveita og skráseta í skránni yvir veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya. Talan eru um upplýsingar um veruligar eigarar, undir hesum upplýsingar um samleika, slag og vav av rættindum hjá veruligu

eigarunum. Í førum, tá stovnarin av einum trusti ella tann, ið umsitur ein trust ella líknandi løgfrøðiliga skipan, er ein løgfrøðiligur persónur, er neyðugt at eyðmerkja likamligu persónarnar handan løgfrøðiliga persónin, ið tá verða mettir at vera veruligu eigararnir. Upplýsingar um, hvussu umsitarin hevur eyðmerkt tann ella teir veruligu eigararnar, kunnu eisini verða givnar víðari sambært ásetingini.

Grein 1, nr. 16, litra d, í 5. hvítvaskfyriskipanini ásetur, at upplýsingar um veruliga ognarskapin av einum trusti ella einari líknandi løgfrøðiligari skipan altíð skulu vera atkomuligar hjá skikkaðum myndugleikum ella FIU, uttan avmarkingar, eindum sum hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir sambært kapittul II í fyriskipanini, øllum likamligum ella løgfrøðiligum persónum, ið kunnu føra fram, at viðkomandi hevur ein legitiman áhuga í upplýsingunum og øllum likamligum ella løgfrøðiligum persónum, ið lata inn skrivliga umbøn viðvíkjandi einum trusti ella eini líknandi løgfrøðiliga skipan, ið umvegis avgerandi ávirkan í einhvørjum felagi ella líknandi løgfrøðiligari skipan, burtsæð frá teimum í grein 30, stk. 1, umrøddu eindum, umvegis beinleiðis ella óbeinleiðis ognarskap, heruppií goymslum av handhavapartabrøvum ella á annan hátt hevur ræði á eini eind.

Upplýsingar, ið skulu vera atkomuligar, fevna um navnið á veruliga eigaranum, føðiár og -mánað, ríkisborgararættur og slagið og vavið á rættindum veruliga eigarans.

Stk. 9

Sambært grein 1, nr. 16, litra h, í 5. hvítvaskfyriskipanini kunnu ES-limalondini áseta reglur, sum í heilt serligum førum loyva, at upplýsingar um veruligu eigararnar heilt ella lutvíst kunnu verða undatiknar kravinum um almannakunngerð. Talan er um føri, tá almannakunngerð av upplýsingunum verður mett at innibera ein órímiligan váða fyri veruliga eigaran, t.d. órímiliga stóran vanda fyri, at veruligi eigarin verður útsettur fyri sviki ella fyri at verða burturfluttur o.s.fr.

Í stk. 9 verður skotið upp at landsstýrismaðurin fær heimild til at áseta nærri reglur um skráseting, atgongd og almannakunngerð av upplýsingum sambært stk. 1-4 og 6 í kt-skipan Skráseting Føroya, heruppií hvørjar upplýsingar umsitarin av einum trusti ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv í einari líknandi løgfrøðiligari skipan, skal skráseta í kt-skipanini.

Í Føroyum eru upplýsingar um vinnufeløg og grunnar alment atkomuligar á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya á www.skraseting.fo.

Við kunngerð ásetur landsstýrismaðurin, at upplýsingar um veruligu eigararnar í minsta lagi skulu fevna um fulla navnið hjá veruligu eigarunum, tjóðskap, bústað og bústaðarland, ríkisborgararætt, slag og vav á rættindum veruliga eigarans og persónstal. Um veruligi eigarin ikki hevur eitt persónstal, krevst skjalprógv, ið kann tryggja eintýðuga eyðmerking av viðkomandi, undir hesum føðingardag.

Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at ítøkiligir upplýsingar í ávísum førum verða undantiknar kravinum um almannakunngerð. Tað snýr seg um heilt serlig føri, har almannakunngerð av veruligu eigarunum kann viðføra, at veruligu eigararnir verða settir í vanda fyri at verða útsettur fyri sviki, burturflyting, penganoyðslu, harðskapi ella hóttanum. Kortini kunnu Hvidvasksekretariatet og aðrir skikkaðir almennir myndugleikar altíð fáa atgongd til upplýsingarnar.

Skotið verður upp, at upplýsingar um veruligu eigararnar hjá trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum verða almannakunngjørdar á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya á sama hátt, sum tað er galdandi fyri eigarar av fyritøkum, grunnum og felagsskapum.

Viðv. § 36 c

Í galdandi hvítvasklóg § 2, nr. 9 verður hugtakið "veruligur eigari" allýst. Allýsingin byggir á 4. hvítvaskfyriskipanina. Við 5. hvítvaskfyriskipanini verður allýsingin av hugtakinum broytt, og tískil verður skotið upp at broyta allýsingina av hugtakinum í løgtingslógini samsvarandi. Allýsingin fevnir bert um likamligar persónar.

Allýsingin av hugtakinum veruligur eigari av trustum ella øðrum líknandi løgfrøðiligum skipanum inniheldur ikki krav um ávísan prosentsats fyri at avgera ávirkan umvegis ongarlut ella ræði á sama hátt, sum tað er galdandi fyri veruligar eigarar í fyritøkum og øðrum løgfrøðiligum eindum. Heldur ásetur allýsingin av veruligum eigarum, sambært fyriskipanini, ein frammanundan avmarkaðan skara av persónum, t.e. stovnarar, umsitarar, verjar, um hesir eru at finna, serliga njótunartilskilaðar persónar ella um líknandi løgfrøðiliga skipanin ikki kennir teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, ið hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað ella virkar.

Við støði í áðurnevnda verður skotið upp at gera eina áseting, § 36 c, ið ásetur, at veruligur eigari av einum trusti ella líknandi løgfroðiligari skipan er tann ella teir likamligu persónar, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði á trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini ella á annan hátt hava heimildir, sum minna um ognarskap, heruppií:

- stovnarar,
- umsitarar ella persónar, ið røkja samsvarandi starv
- verjar, um hesir eru at finna, og
- serliga njótunartilskilaðir persónar ella, um trusturin ella líknandi løgfrøðiliga skipanin ikki kenna teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, sum hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað ella virkar.

Ásetingin lýsir ikki hugtakið út í æsir. Tað er kortini greitt, at talan skal vera um likamligar persónar.

Stovnari (settlor) er tann persónurin, eftir hvørs vilja trusturin er stovnaður, t.v.s. at stovnarin skal hava ætlanir um at stovna ein trust. Talan kann vera um ein ella fleiri likamligar ella løgfrøðiligar persónar. Stovnarin flytir ognirnar, sum trusturin skal hava ognarrætt til, til ein umsitara (trustee) og vegleiðir umsitaran til at umsita ognirnar til fyrimuns fyri ein ella fleiri serliga njótunartilskilaðar persónar (beneficiaries).

Umsitari ella persónar, ið røkja samsvarandi starv eru tann ella tey, ið samsvarandi vegleiðing stovnarans umsita ognir trustsins til fyrimuns fyri ein ella fleiri serliga njótunartilskilaðar persónar (beneficiaries). Umsitari (trustee) hevur ognarrættin til at ráða yvir fluttu ognunum (legal owner).

Serliga njótunartilskilaðir persónar eru tann ella tey, ið njóta fyrimun av trustinum, ella um trusturin ella líknandi løgfrøðiliga skipanin ikki kenna teir einstaklingar, sum hava gagn av útlutanum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini, tann bólkurin av persónum, sum í hvørs høvuðsáhuga trusturin ella løgfrøðiliga skipanin er stovnað til frama fyri, ella virkar fyri. Rættindi hjá teimum, ið eru serliga njótunartilskilað, standa vanliga í skjølum

trustsins. Talan kann vera um alt frá rætti til avkast frá ognum trustsins, tað veri seg rentur, vinningsbýti ella bústaðarrættur, ella rætturin til sjálva ognina eftir at ávís hending fer fram (indtræffer), t.d. tá serliga njótunartilskilaður nær ávísan aldur. Tað kann í endamálsorðingini hjá trustinum vera tilskilað, hvørji tey serligt njótunartilskilaðu eru, t.d. nærri tilskilað vælgerandi endamál. Tey, ið eru serligt njótunartilskilaði hava búskaparliga ognarrættin (equity owner) og kunnu gera rættarkrav galdandi móti umsitara.

Stovnarin kann velja at seta ein verja, ið hevur ábyrgd av at leiða ella avmarka umsitaran í, hvussu hesin umsitur trustin. Heimildir verjans kunnu t.d. fevna um heimild til útnevna serliga njótunartilskilaði, góðkenna útlutanir ella broyta heimstaðin hjá trustinum. Verjin kann eisini vera settur til at hava eftirlit við, at umsitarin umsitur trustin samsvarandi ynskjum stovnarans, sokallað “letter og wishes”.

§ 36 d

Stk. 1

Umsitarar og persónar, ið røkja samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, hava sambært galdandi løgtingslóg ikki skyldu til at fráboða persónum ella fyritøkum, ið sambært løgtingslógini skulu gera kundakunnleikamannagongdir, um teirra støðu ella eigaraviðurskiftini í trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini.

5. hvítvaskfyriskipanin áleggur teimum, ið umsita trustar ella líknandi løgfrøðiligar skipanir, eina skyldu til at lata upplýsingar um støðu teirra. Skyldan fevnir um skyldu til at innheinta og varðveita upplýsingar um veruligu eigararnar. Nevndu upplýsingar skulu rættstundis latast teimum fyritøkum og persónum, ið eru áløgd at gera kundakunnleikamannagongdir, tá ið hesi sum umsitarar av trustum og líknandi løgfrøðiligum skipanum stovna handilssambond ella útinna hissini transaktiónir, ið eru omanfyri ásettu støddarmørkini í grein 11, litra b og d í 4. hvítvaskfyriskipanini.

Grein 11 í 4. hvítvaskfyriskipanini ásetur, í hvørjum førum kundakunnleikamannagongdir skulu gerast. Eitt nú skulu kundakunnleikamannagongdir gerast, tá nýggj handilssambond verða stovnað, og tá transaktiónir verða gjørdar, sum eru omanfyri ásettu støddarmørkini. Galdandi løgtingslóg ásetur, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av løgtingslógini, í sambandi við kundakunnleikamannagongdir, við støði í eini váðameting skulu upplýsa ognarbygnað og ræði hjá kundum, sum ikki eru likamligir persónar, samstundis sum veruligu eigararnir hjá vinnufelagskundum skulu skjalprógvast. Fyri persónar og fyritøkur, ið hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir sambært galdandi løgtingslóg, er vitan um veruligu eigararnar ein fortreyt fyri at kunna stovna kundaviðurskifti og eftir hetta fyri at kunna varðveita hesi.

Hóast onki krav hevur verið um at fráboða um eigaraviðurskifti, undir hesum veruligu eigararnar, so hava fráboðanir um eigaraviðurskifti kortini verið ein neyðug fortreyt fyri, at kundakunnleikamannagongdir hava kunnað verið framdar. Harvið hevur ein fortreyt fyri, at kundakunnleikamannagongdir hava kunnað verið gjørdar, at trustar og líknandi løgfrøðiligar skipanir, fevndar av løgtingslógini, hava víst samstarvsvilja.

Fyri at ivi ikki skal vera um, hvørjar skyldur eru galdandi í sambandi við kundakunnleikamannagongdir verður skotið upp í stk. 1 at gera eina áseting, ið áleggur umsitarum ella persónum, ið røkja samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligum skipanum, skyldu til at fráboða persónum og fyritøkum, ið sambært løgtingslógini skulu fremja

kundakunnleikamannagongdir. Tey, ið eru fevnd av skylduni í stk. 1, skulu kunna um støðu teirra og rættstundis lata upplýsingar um eigaraviðurskifti hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligu skipanini, tá umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv stovnar handilssambond. ella tá hissini transaktiónir verða gjørdar vegna trustin ella líknandi løgfrøðiliga skipan, ið eru omanfyri støddarmørkini í § 9 í galdandi løgtingslóg.

Tískil skal tann, ið umsitur ein trust ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, tá viðkomandi stovnar handilssambond ella útinnir hissini transaktiónir vegna trustin ella ta líknandi løgfrøðiligaru skipanina, kunna um støðu sína. Viðkomandi skal fráboða persónum og fyritøkum, sum eru fevndar av krøvunum um kundakunnleika í §§ 9-20 í hvítvasklógini um sína støðu, at viðkomandi umsitur viðkomandi trust ella røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, í hvørs navni handilssambandið er stovnað. Sama er galdandi, tá talan er um hissini transaktiónir.

Harafturat skal umsitari ella tann, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, geva víðari upplýsingar, ið viðkomandi hevur skyldu til at innheinta sambært tí, ið verður skotið upp í § 36 b, stk. 1. Umrøddu upplýsingar skulu sambært § 36 b, stk. 1 latast rættstundist. Tað merkir, at tær skulu latast, áðrenn álvari verður gjørdur av handilssambandinum og farið verður undir nakað ítøkiligt. Somuleiðis skulu upplýsingar latast áðrenn transaktiónin verður gjørd, tá talan er um hissini transaktiónir.

Í § 2, nr. 3 í hvítvasklógini verður "handilssamband" allýst sum: "Eitt kundasamband, sum verður stovnað av fyritøkuni ella persóninum, fevndur av løgtingslógini, sum stovningarløtuna væntast at halda fram eina tíð, og sum kann fevna um stovnan av kundakonto, kundagoymslu, íverksetan av transaktiónunum og øðrum virksemi, undir hesum ráðgevingaruppgávur fyri kundan.

Í § 2, nr. 10 í hvítvasklógini verður "transaktión" allýst sum: "Ein ella fleiri gerðir, har ein ella fleiri ognir verða fluttar ella avhendaðar." Víst verður til viðmerkingarnar til ásetingina, smb. at víst verður til viðmerkingarnar til § 2, nr. 3 í donsku hvítvasklógini, smb. Folketingstidende 2016-2017, A, L651, s. 122f.

§ 9 í hvítvasklógini ásetur í hvørjum førum tey, ið hava skyldu til at fremja kundakunnleikamannagongdir, skulu seta í verk slíkar mannagongdir. Kundakunnleikamannagongdir skulu setast í verk. tá talan er um eina einstaka transaktión:

- upp á í minsta lagi 15.000 evrur, um transaktiónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaktiónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar,
- upp á meiri enn 1.000 evrur sum eina peningaflyting, um transaktiónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaktiónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar, ella
- upp á 500 evrur ella meiri við gjaldoyraveksling, um transaktiónin verður gjørd í einum ella sum fleiri transaktiónir, sum eru ella sýnast at vera sínámillum tengdar.

Umsitari ella persónur, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan skal sostatt fráboða um støðu sína og rættstundis geva upplýsingar um eigaraviðurskiftini hjá trustinum ella líknandi løgfrøðiligari skipan, tá virðið á einstøku transaktiónunum er omanfyri støddarmørkini í § 9.

Grein 1, nr. 16, litra f, í 5. hvítvaskfyriskipanini ásetur, at eindir, ið hava skyldu til at gera kundakunnleikamannagongdir skulu boða frá, um viðkomandi eindirnar gerast varugar við

ósamsvar í skrásettu upplýsingunum um veruligu eigararnar av einum trusti ella eini líknandi løgfrøðiligari skipan.

Somuleiðis skulu avvarðandi myndugleikar fráboða, um ósamsvar í upplýsingunum um veruligu eigararnar, sum myndugleikin verður vitandi um, um tað ikki ávirkar myndugleika uppgávuna óneyðuga nógv.

Við § 14 a, stk. 2 verður skotið upp, at tey, sum eru fevnd av kravinum um at fremja kundakunnleikamannagongdir, skulu boða frá, um so er, at tey gerast varug við ósamsvari skrásettu upplýsingunum.

Fráboðanir um ósamsvar kunnu sannlíkt flokkast í tríggjar bólkar, ávikavist 1) manglandi skráseting, ið er ótilætlað, t.d. tí løgfrøðiligu eindirnar ikki kenna regluverkið um skráseting av veruligum eigarunum, 2) feilskrásetingar, ið eru ótilætlaðar, t.d. tí at løgfrøðiligu eindirnar hava misskilt reglurnar um skráseting av veruligum eigarunum og tískil hava skrásett skeivar, ella ikki hava skrásett nøktandi upplýsingar og 3) manglandi skráseting, ið er tilætlað ella tilætlað skeiv skráseting.

Í § 36 d, stk. 2 verður skotið upp, at tá Skráseting Føroya fær fráboðan um ósamsvar í skrásettu upplýsingunum eftir § 14 a, so skal Skráseting Føroya íverkseta kanning av hesum viðurskiftum, sbr. § 36 b, stk. 7 og 36 f, stk. 1.

Kanningin av viðurskiftunum inniber, at Skrásetingin kann venda sær til umsitara, ella persón, ið røkir samsvarandi starv, fyri á fáa greiðu á ósamsvarinum. Eftir § 36 f í lógaruppskotinum kann Skráseting Føroya krevja tær upplýsingar, ið stovnurin metir neyðugar. Er talan um umsitara ella persón, ið røkir samsvarandi starv í líknandi løgfrøðiligari skipan, sum av misgáum ikki hevur skrásett veruligu eigararnar, ella sum av misgáum hevur skrásett skeivt verður roknað við, at viðkomandi fær hesi viðurskiftini í rættlag undir vegleiðing Skráseting Føroya. Skráseting Føroya kann áseta eina freist fyri, nær viðurskiftini skulu fáast í rættlag.

Stk. 3.

Í stk. 3 verður skotið upp, at Skráseting Føroya samstundis sum kanning av ósamsvari sambært stk. 2 verður gjørd, kann almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Talan er um eina frágreiðing, sum í stuttum kunnar um, at fráðboðan er komin um ósamsvar viðvíkjandi upplýsingum um veruligar eigarar, ið verða almannakunngjørdar í kt-skipan Skráseting Føroya.

Tá støða skal takast til, um fráboðað ósamsvar í eigaraupplýsingum skal almannakunngerast eigur Skráseting Føroya at tryggja sær, at almannakunngerðin er hóskandi, og at hon stendur mát við brotið. Í metingini eigur atlit at verða tikið til trustin ella líknandi løgfrøðiligu skipanina og til gjøgnumskygnið í ognarviðurskiftini hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðligu skipanini.

Skráseting Føroya kann samstundis, sum kanningin eftir stk. 2 verður gjørd, almannakunngera eina frágreiðing um fráboðanina í kt-skipan Skráseting Føroya. Umsitarin ella persónurin, ið røkir eitt samsvarandi starv, skal hava møguleika til at mótmæla frágreiðingini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngerð av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeyti.

Tískil skal Skráseting Føroya skjótast til ber, eftir at fráboðan er móttikin, gera eina meting av, hvørt tað er hóskandi og proportionalt at almannakunngera eina frágreiðing um ósamsvarið. Er talan um ósamsvar, ið kann fáast í rættlag við vegleiðing, sambært reglunum um veruligar eigarar í § 36 b, er meginreglan, at almannakunngerð ikki er hóskandi, ella stendur mát við ósamsvarið. Er hinvegin varhugi av, at talan er um tilætlaða skráseting av skeivum upplýsingum, hvørs endamál er at goyma ognarskapin kann ein slík fráboðan um ósamsvar, almannakunngerast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Fyri at tryggja, at ásetingin ikki verður misnýtt til at plága trustar ella líknandi løgfrøðiligar skipanir hevur umsitarin ella persónur, ið røkir samsvarandi starv, eftir stk. 3, 2. pkt. í uppskotinum møguleika at mótmæla frágreiðingini, áðrenn hon verður almannakunngjørd, uttan so at endamálið við almannakunngerð av frágreiðingini um fráboðanina fer fyri skeytið.

Freistin hjá umsitara ella persóni, ið røkir samsvarandi starv at greiða frá eigaraviðurskiftum trustsins ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini er lutfalsliga stutt orsakað av, at endamálið við frágreiðingini annars kann fara fyri skeytið.

Skulu broytingar gerast í skrásettu upplýsingunum sum avleiðing av ósamsvarinum í upplýsingunum um veruligu eigararnar, skal hetta skrásetast skjótast gjørligt, sbr. § 36 b, stk. 3, 2. pkt. í uppskotinum. Verður tað ikki gjørt, hevur Skráseting Føroya heimild til at áleggja dagbøtur ella vikubøtur, sbr. § 61, stk. 3 í uppskotinum.

Tá greiða er fingin á málinum um skrásettu upplýsingarnar skal nýggj frágreiðing almannakunngerast skjótast gjørligt. Frágreiðingin skal greiða frá, at kanningin av fráboðaðu viðurskiftunum er liðug og um niðurstøðuna av kanningini.

§ 36 e

Stk. 1

Galdandi løgtingslóg hevur ongar ásetingar um ábyrd fráboðarans í sambandi við skráseting av upplýsingum í kt-skipan Skráseting Føroya. Kortini er ein líknandi áseting í § 15 í vinnufelagslógini.

Í stk. 1 verður skotið upp at áseta, at skráseting ikki er loyvd, um tað, ið eftir ætlan skal skrásetast, ikki lýkur treytirnar eftir hesi løgtingslóg, eftir reglum, ið eru ásettar við heimild í hesi løgtingslóg ella eftir viðtøkunum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini. Skráseting er heldur ikki loyvd, um avgerðin, ið er grundarlagið fyri skrásetingini, ikki er tikin í samsvari við ásetingar í hesi løgtingslóg, við reglur, ásettar við heimild í hesi løgtingslóg ella við tað, sum ásett er í viðtøkunum hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini.

Vart verður gjørt við § 296, stk. 1, nr. 2 í revsilógini um at lata skeivar ella villleiðandi upplýsingar til almennar myndugleikar.

Stk. 2

Í stk. 2 verður skotið upp, at fráboðari, ið skrásetur viðurskifti í kt-skipan Skráseting Føroya ella, sum letur inn fráboðan um hesi viðurskifti til kt-skipan Skráseting Føroya, stendur til

svars fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd, heruppií at hóskandi fulltrú er tøk, og at skjalprógvini í sambandi við skrásetingina ella fráboðanina eru galdandi.

Fráboðarin hevur eina serliga skyldu til at tryggja, at sjálvskráseting við kt-skráseting ikki er í ósamsvari við galdandi lóggávu ella viðtøkur trustsins ella hjá teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini. Sama er galdandi við fráboðanir, ið fráboðari ikki sjálvur skrásetur.

Við "fráboðari" er at skilja tann persónurin ella fyritøkan, sum í samband við tey viðurskifti, ið skulu skrásetast er tilskilaður sum fráboðari. Um advokatur fremur skrásetingina vegna umsitaran er tað viðkomandi advokatur, ið verður at meta sum fráboðari.

§ 36 f

Stk. 1

Í stk. 1 verður skotið upp, at Skráseting Føroya sum skrásetingarmyndugleiki kann krevja tær upplýsingar, ið eru neyðugar til tess at taka støðu til, um løgtingslógin, reglur, ásettar við heimild í løgtingslógini, og viðtøkurnar hjá trustinum ella teirri líknandi løgfrøðiligu skipanini eru hildnar.

Stk. 2

Í stk. 2 verður skotið upp, at Skráseting Føroya sum skrásetingarmyndugleiki eftir fráboðan og skráseting sambært reglum, ið eru ásettar við heimild í hesum kapitlinum, í upp til 5 ár eftir dagfestingina av skrásetingini kann krevja váttan fyri, at skrásetingin ella fráboðanin er lógliga framd. Harumframt verður í 2. pkt. skotið upp, at Skrásetingin kann áseta freist fyri, nær viðkomandi viðurskifti skulu vera rættað.

Hugsanin er, at Skráseting Føroya skal kunna gera stakkanningar við at innheinta upplýsingar, fyri á tann hátt at kunna góðskutryggja kt-skipanina.

Í førum, tá illgruni er um, at nakað revsivert er farið fram hjá tí, ið upplýsingarnir skulu innheintast frá og roknað verður við, at viðurskifti verða melda til løgregluna, letur Skráseting Føroya vera við at innheinta skjalprógv og letur løgregluni málið til viðgerðar.

Til § 1, nr. 45
Generellu eftirlitsskyldurnar hjá Tryggingareftirlitinum eru ásettar í § 37 í hvítasklógini. Sambært galdandi rætti er verjan av starvsfólkum, sum fráboða í sambandi við, at illgruni er um hvítvask ella fígging av yvirgangi, sbr. § 34, stk. 2, sambært orðaljóðinum í § 37, ikki undantikin frá eftirlitinum hjá Tryggingareftirlitinum. Ásetingin í § 34, stk. 1 og 2 hevur við starvsfólk í fyritøkum og hjá persónum, og ikki við fyritøkuna ella persónin sum so at gera, og eftirlit við starvsviðurskiftum eigur ikki at vera partur av málsræðinum og eftirlitsvirkseminum hjá Tryggingareftirlitinum.

Eitt starvsfólk, sum metir seg hava verið fyri ólagaligari viðferð o.a. orsakað av, at viðkomandi hevur fráboðað brot ella møguligt brot á hvítvasklógina til varskógvaraskipanina ella til Tryggingareftirlitið, kann leggja krav fram fyri dómstólarnar um viðurgjald ella melda

málið til løgregluna fyri brot á forboðið móti ólagaligari viðferð ella fylgjum, tí eitt brot á § 34, stk. 1 ella 2 kann revsast, sbr. § 59, stk. 1 í hvítvasklógini.

Skotið verður upp, at tað verður ásett í § 37, stk. 1 í lógini, at ásetingin í § 34 er ikki partur í eftirlitinum hjá Tryggingareftirlitinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 49 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjal 2.

Til § 1, nr. 46
Í § 38, stk. 1 í hvítvasklógini er ásett, at fyritøkur og persónar, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1-4, og veitarar og undirveitarar hjá hesum, skulu lata Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum neyðugar eru til nýtslu í sambandi við eftirlitið.

Skotið verður upp, at tað verður ásett sum § 38, stk. 1, 2. pkt., at upplýsingar, sum hava stóran týdning fyri eftirlitið hjá Tryggingareftirlitinum, skulu latast beinanvegin og uttan at biðið er um tær frammanundan.

Ásetingin í § 38, stk. 1, 2. pkt. er nýggj.

Brot á ásetingina í § 38, stk. 1 kann verða revsað sambært § 59, stk. 1 í hvítvasklógini. Ásetingin í § 38, stk. 1, 2. pkt. verður somuleiðis fevnd av revsiásetingini í § 59, stk. 1.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 12 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 47
Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 2 í § 38. Talan er um eina nýggja áseting, har álagt verður fyritøkum og persónum, sum eru undir eftirlitinum hjá Tryggingareftirlitinum, skjótast gjørligt at rætta upplýsingarnar, sum eru latnar Tryggingareftirlitinum, um fyritøkan ella persónurin staðfestir, at upplýsingarnar vóru ikki rættar, tá tær vóru latnar, ella upplýsingarnar seinni eru vorðnar misvísandi.

Brot á ásetingina kann verða revsað við sekt, sbr. § 59, stk. 2 í hvítvasklógini.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 13 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 48
Talan er um eina konsekvensbroyting, sum verður gjørd, tí stk. 2-5 í § 38 verða til stk. 3-6, sbr. § 1, nr. 47 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 49
Skotið verður upp, at ein nýggj áseting verður ásett sum stk. 7 í § 38. Sambært ásetingini kann Tryggingareftirlitið áseta nærri reglur um innlating av upplýsingum, sum eru neyðugar, tá Tryggingareftirlitið skal gera váðametingar av fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av hvítvasklógini.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 14 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 50

Sambært § 39 í hvítvasklógini kann Tryggingareftirlitið áleggja teimum fyritøkum og persónum, sum eru undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum, innanfyri eina nærri ásetta freist, at seta neyðug tiltøk í verk í førum, har brot er framt á ásetingar í hvítvasklóggávuni.

Eisini kann Tryggingareftirlitið sambært § 40, stk. 1 í hvítvasklógini áleggja eini fyritøku, sum er undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum, at seta tann persónin, sum er tilnevndur at hava ábyrgd av viðurskiftum sambært hvítvasklógini, frá starvinum, innanfyri eina nærri ásetta freist, um persónurin ikki hevur nøktandi vanligt umdømi, ella tí atburðurin hjá viðkomandi gevur grund at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja starvið á fullgóðan hátt.

Skotið verður nú upp at áseta í § 40 a, at Tryggingareftirlitið kann áleggja einari fyritøku ella persóni, sum sambært hvítvasklógini er undir eftirliti av Tryggingareftirlitinum, at fyritøkan ella persónurin ikki kunnu fáa sær nýggj kundaviðurskifti, tá eitt álvarsamt brot er framt á hvítvasklóggávuna. Er brotið heilt ella partvís framt í einari útlendskari deild hjá einari fyritøku, kann áleggingin víðkast til at fevna um deildina. Ein slík álegging heldur uppat, tá fyritøkan ella persónurin mótvegis Tryggingareftirlitinum skjalprógvar, at brotið er hildið uppat.

Ásetingin er nýggj. Við ásetingini fær Tryggingareftirlitið fleiri heimildir til at gera inntriv í sambandi við brot á hvítvasklóggávuna.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 15 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 51 og nr. 52

Talan er um konsekvensbroytingar orsakað av, at broytingar verða gjørdar í § 43 í lógini, sbr. § 1, nr. 53 í uppskotinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 60 og 61 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 53

Sambært § 43, stk. 1 í hvítvasklógini kunnu tiltøk eftir § 37, stk. 1 og 2, ella § 40 ella av Tryggingareftirlitinum sambært heimild frá Tryggingarráðnum, skulu almannakunngerast av Tryggingareftirlitinum á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum, sbr. tó stk. 5. Avgerðir um at lata løgregluni mál til eftirkanningar, sambært § 36, stk. 2, almannakunngerast sum samandráttur, sbr. tó stk. 5. Almannakunngeringin skal fevna um navnið á tí løgfrøðiliga ella likamliga persóninum, sbr. tó stk. 2.

Sambært galdandi § 43, stk. 2 er almannakunngering eftir § 43, stk. 1, ið fevnir um navnið á einum likamligum persóni, bert loyvd, um talan er um álvarslig, afturvendandi ella skipað brot á § 9, nr. 1, 2, 4 og 5, § 10, stk. 1 og 2 og stk. 3, 1., 3. og 4. pkt., § 13, stk. 1, stk. 2, 2.

pkt., og stk. 3 og 5, § 16, stk. 1 og 2, § 17, § 20, stk. 1, 2. pkt., § 24, stk. 1, § 25, stk. 1 og 3 og stk. 4, 1. pkt. og § 29.

Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 2 í § 43, har ásett verður, at almannakunngjørd tiltøk verða verandi á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum í 5 ár eftir almannakunngeringina. Persónsupplýsingar, sum verða almannakunngjørdar, mugu ikki verða verandi á heimasíðuni longri enn neyðugt.

Aftaná broytingina verða galdandi stk. 2-5 til stk. 3-6.

Ásetingin er í samsvari við grein 60, stk. 3, í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 62 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 54 og 55

Talan er um konsekvensbroyting orsakað av broytingini í § 1, nr. 53 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 56

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 63 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 57
Í § 45, stk. 1 í hvítvasklógini er ásett, hvørjar fyritøkur og persónar, Skráseting Føroya hevur eftirlit við. Talan er um fyritøkur og persónar, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 5-8 í galdandi hvítvasklóg.

Lógarøkið verður nú víðkað til eisini at fevna um fyritøkur og persónar, sum á vinnuligum grundarlagi varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, heruppií listasøvn og uppboðshús, har virðið á transaktiónum ella á eini rød av innanhýsis samanbundnum transaktiónum er 50.000 kr. ella meira, sbr. § 1, nr. 4 í lógaruppskotinum. Listahandlarar, sum verða fevndir av lógini, verða allýstir í § 1, stk. 1, nr. 10 í lógini. Grundað á hetta verður skotið upp at broyta ásetingina í § 45, stk. 1 soleiðis, at tað nú verður ásett, at Skráseting Føroya hevur eftirlit við fyritøkum og persónum, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 5-8 og 10 í hvítvasklógini. Á tann hátt hevur Skráseting Føroya eisini eftirlit við, at tey, sum á vinnuligum grundarlagi varðveita, handla við ella miðla handil við listaverkum, yvirhalda ásetingarnar í hvítvasklóggávuni.

Tá eftirlitið hjá Skráseting Føroya nú verður víðkað til eisini at fevna um listahandlarar, er neyðugt eisini at broyta § 47, stk. 1 og 2 og § 48, so tað í ásetingunum verður víst til § 1, stk. 1, nr. 5-8 og 10 í hvítvasklógini.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 66 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 58

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 67 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 59

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 68 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 60

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 69 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 61

Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av, at stk. 2-7 í § 50 verða til stk. 3-8. Víst verður til broytingina í § 1, nr. 64 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 62

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 71 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 63

Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av, at stk. 2-7 í § 50 verða til stk. 3-8. Víst verður til broytingina í § 1, nr. 64 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 64

Skotið verður upp at áseta eitt nýtt stk. 2 í § 50. Stk. 2-7 verða hereftir stk. 3-8.

Ásetingin er í samsvari við grein 60, stk. 3 í 4. hvítvaskdirektivinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 72 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 65
Talan er um eina rætting í § 50, stk. 3, 3. pkt., har tað er ein feilur, at "Tryggingareftirlitinum" er nevnt, tí hetta eigur at vera "Skráseting Føroya". Feilurin verður nú rættaður.

Til § 1, nr. 66 og 67

Talan er um konsekvensbroytingar orsakað av, at stk. 2-7 í § 50 verða til stk. 3-8. Víst verður til broytingina í § 1, nr. 64 í uppskotinum.

Til § 1, nr. 68

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 76 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 69

Talan er um konsekvensbroytingar orsakað av, at nr. 4-14 í § 51, stk. 3 verða broytt til nr. 5-15. Víst verður til broytingina í § 1, nr. 68 í uppskotinum.

Í ásetingini í § 51, stk. 4 verður tilvísingin til stk. 3, nr. 14 broytt til stk. 3, nr. 15.

Til § 1, nr. 70

Talan er um konsekvensbroytingar orsakað av, at nr. 4-14 í § 51, stk. 3 verða broytt til nr. 5-15. Víst verður til broytingina í § 1, nr. 68 í uppskotinum.

Í ásetingini í § 51, stk. 5 verður tilvísingin til nr. 1-12 broytt til nr. 1-13.

Til § 1, nr. 71

Skotið verður upp at broyta tilvísingina í § 51, stk. 6 frá ”stk. 3, nr. 1, 2, 7, 8, 10, 12, 13 og 14” til at vera ”stk. 3, nr. 1, 2, 8, 9, 11 og 13-15”.

Uppskotið til broyting av § 51, stk. 6 hongur saman við broytingini í § 1, nr. 68 í uppskotinum, har skotið verður upp, at Skráseting Føroya kann lata upplýsingar víðari til TAKS.

Til § 1, nr. 72

Viðvíkjandi § 51 a verður víst til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 80 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Ásetingin er í samsvari við grein 61, stk. 1, litra e í 4. hvítvaskdirektivinum.

Skotið verður upp at áseta í § 51 b, stk. 1, at TAKS, hóast § 151 í skattalógini, kann lata upplýsingar víðari til myndugleikar, sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, um upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri uppgávuna hjá myndugleikunum at fyribyrgja og forða fyri hvítvaski og fígging av yvirgangi. Sambært

ásetingini í § 51 b, stk. 2, skal TAKS lata upplýsingar víðari til ein myndugleika í skipaða samstarvinum, um hesin myndugleikin biður um upplýsingarnar, og upplýsingarnar hava týdning fyri uppgávuna hjá myndugleikanum at fyribyrgja ella forða fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi.

Talan er um eina nýggja áseting.

Skipaða samstarvið, ið víst verður til í ásetingini, snýr seg um eitt samstarv, sum er regulerað í § 55 í hvítvasklógini. Landsstýrismaðurin kann sambært § 55 seta ein bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært løgtingslógini. Hesin bólkurin skal samskipa váðametingarnar og almennu tiltøkini móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hjá myndugleikunum. Landsstýrismaðurin kann avgera at víðka skaran við umboðum fyri aðrar myndugleikar.

Sambært § 152, stk. 3 í revsilógini er ein upplýsing í trúnaði, tá ið hon við lóg ella aðrari gildigari áseting er nevnd so, ella tá ið tað aðramáta er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at varða um munandi umhugsni til almenn ella privat áhugamál. Tað er ikki nærri ásett í revsilógini, hvørji almenn ella privat áhugamál hava við sær, at ein upplýsing skal metast at vera í trúnaði, og tískil verður ein nærri skilmarking av hesum í stóran mun gjørd útfrá normum uttan fyri revsilógini.

Ein av hesum ásetingunum er § 26 í fyrisitingarlógini, har tey flestu atlitini verða reksað upp, sum eftir eina ítøkiliga meting kunnu føra til, at ein upplýsing er í trúnaði og tí undir tagnarskyldu.

Sambært § 26 hevur hann, sum virkar innan almennu fyrisitingina, tagnarskyldu, sbr. revsilógina § 152 og §§ 152c-l52f, tá ein upplýsing við lóg ella aðrari gildari áseting hevur trúnaðarfrámerki, ella tá tað annars er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at verja serstøk fyrilit viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum, og verða nøkur ávís viðurskifti nevnd, sum tagnarskyldan er galdandi fyri.

Um tað ikki eru serstakar ásetingar í serlóggávu, sum heimila fyrisitingarmydugleikum at lata upplýsingar víðari til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta fara fram eftir ásetingunum í § 27 í fyrisitingarlógini og í samsvari við ásetingar í dátuverndarlógini hesum viðvíkjandi.

Sambært § 27, stk. 2 í fyrisitingarlógini kunnu upplýsingar, sum § 27, stk. 1 fevnir um, einans latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika, um

1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki,

2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari,

3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan, undir hesum umhugsni hjá honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella

4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur.

Ásett er í § 31, stk. 1 í fyrisitingarlógini, at í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki hevur rætt til at lata eina upplýsing víðari, skal myndugleikin eftir áheitan frá einum øðrum fyrisitingarmyndugleika lata upplýsingina víðari, um hon hevur týdning fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

Sambært § 151 í løgtingslógini um landsskatt og kommunuskatt er, umframt vanligu tagnarskylduna sambært revsilógini, eisini ein serlig regla um tagnarskyldu galdandi fyri tey, sum starvast hjá TAKS. Sambært ásetingini er bannað at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum starvsfólkini fáa at vita um inntøku- og ognarviðurskifti, vinnuviðurskifti ella viðurskifti, sum viðkoma heimalívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan viðkomandi røkir sítt starv eftir skattalógini.

Ásetingarnar í fyrisitingarlógini, dátuverndarlógini, og í ávísum førum serlóggávuni, geva møguleika fyri, at upplýsingar um likamligar og løgfrøðiligar persónar, undir ávísum treytum og aftaná eina ítøkiliga meting, kunnu verða latnar víðari m.a. í teimum førum, har tað er neyðugt orsakað av samfelagsligum ella almennum áhuga.

Í stríðnum móti hvítvaski og fígging av yvirgangi er tørvur á, at myndugleikar samstarva og vitanarumbýta soleiðis, at átøkini móti hvítvaski og fígging av yvirgangi verða munagóð og málrættað. Í einum slíkum samstarvi hevur tað stóran týdning, at myndugleikarnir kunnu skifta um upplýsingar um m.a. aktuell rák og váðar innan lógarbrot. Tað ger seg eisini galdandi á taktiskum støði, har myndugleikar skulu kunna skifta um upplýsingar um ítøkiligar partar, og har trúnaður má vera, tí talan er um upplýsingar av eymum slagi.

Fyri at tryggja, at samstarvið millum myndugleikarnar kann virka, verður í § 51 b, stk. 1 skotið upp, at TAKS, hóast § 151 í skattalógini, kann lata upplýsingar víðari til myndugleikar, sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Endamálið er at tryggja, at TAKS fær luttikið á jøvnum føti við aðrar viðkomandi myndugleikar, sum luttaka í einum slíkum skipaðum samstarvi. Viðkomandi er í hesum sambandi at nevna, at tað verður skotið upp at áseta í § 55 a í hvítvasklógini, sbr. § 1, nr. 74 í uppskotinum, eina generella treytaleysa tagnarskylda um tær upplýsingar, sum myndugleikarnir í samstarvinum móttaka í hesum sambandi. Persónar, sum starvast innan almennu umsitingina, og sum luttaka í einum skipaðum samstarvi, hava skyldu til at halda loyniligar tær upplýsingar, sum verða móttiknar í sambandi við samstarvið.

Í einum slíkum skipaðum samstarvi móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi hava myndugleikarnir tørv á, at m.a. umrøða ítøkilig mál, persónar, váðar og illgrunasom viðurskifti viðvíkjandi hvítvaski og fígging av yvirgangi. Tá myndugleikarnir hava møguleika fyri at umrøða hesi viðurskifti, verður tað møguligt at samskipa átøk innan økið. Neyðugt er eisini at áseta, at tey, sum starvast hjá myndugleikanum, skulu halda loyniligar tær upplýsingar, sum tey fáa frá øðrum myndugleikum innan samstarvið, tí hetta hevur stóran týdning fyri verandi ella komandi átøk innan økið hvítvask og fígging av yvirgangi. Myndugleikarnir hava tørv á at kunna skifta um allar viðkomandi upplýsingar fyri saman at kunna samskipa eitt møguligt átak, uttan at átakið ella eitt komandi átak verður í vanda. Tí er neyðugt, at m.a. ásetingarnar í fyrisitingarlógini í § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgeving og rættindi sambært dátuverndarlógini verða sett til síðis.

Rætturin hjá einum parti til innlit sambært § 18 í fyrisitingarlógini kann aftaná eina ítøkiliga meting verða avmarkaður, men tað verður mett at vera ein generellur tørvur á at forða fyri, at innlit kann verða latið. Orsøkin er, at tann myndugleikin, sum móttekur upplýsingarnar frá

einum øðrum myndugleika í sambandi við eitt myndugleikasamstarv, ikki í øllum førum er kunnugur við orsøkina til, at upplýsingin er í trúnaði, hvørjir partar av upplýsingunum eru serliga viðkvæmir, avleiðingina av, at ein upplýsing verður latin víðari ella vavið á málinum, sum upplýsingin er partur av.

Myndugleikar, sum luttaka í einum slíkum samstarvi, kunnu eitt nú, umframt TAKS, vera Skráseting Føroya, Tryggingareftirlitið, Fíggjareftirlitið, Hvidvasksekretariatet og umboð fyri løgregluna. Tær upplýsingar, sum TAKS av sínum eintingum kann lata víðari, eru upplýsingar, sum TAKS metir kunnu hava týdning fyri fyribyrging og stríðið móti hvítvaski og fígging av yvirgangi. Um hugt verður eftir øllum teimum mongu og torgreiddu háttunum, ið verða nýttir í málum um hvítvask og fígging av yvirgangi, er tørvur á, at myndugleikar kunnu lata upplýsingar víðari, tá mett verður, at upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri fyribyrging og stríðið ímóti hesum. Hetta kann t.d. vera viðkomandi í einum føri, har ein persónur fleiri ferðir flytur stórar peningaupphæddir til útlandið ella ein persónur er stjóri í fleiri feløgum, hóast persónurin ikki hevur serligar førleikar ella royndir, ið gera hann føran fyri at røkja hetta starvið.

Um ein myndugleiki kemur við einari áheitan um at lata upplýsingar víðari krevst tað, at hesin myndugleikin hevur mett, at upplýsingarnar kunnu hava týdning fyri uppgávuna at fyribyrgja og stríðast ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi. Myndugleikin, sum biður um upplýsingarnar, skal sostatt hava ein varhuga av, at upplýsingarnar kunnu vera við til at lýsa eitt møguligt lógarbrot, sum hevur tilknýti til hvítvask og fígging av yvirgangi. Hetta kann t.d. vera í einum føri, har upplýsingar fyriliggja frá t.d. ríkisløgregluni um, at ein persónur verður mettur at hoyra til eitt netverk ella ein bólk, sum fremur skipað brotsverk. Tað verður ikki kravt, at myndugleikin, sum biður um upplýsingarnar, hevur ein ítøkiligan illgruna um, at hvítvask ella fígging av yvirgangi fyriliggur.

Í § 51 b er ein heimild til at skifta um upplýsingar, tá hetta er ein liður í hesum samstarvinum millum myndugleikar. Mett er um, hvørjir partar er viðkomandi í einum slíkum samstarvi og harvið hvørjir myndugleikar eru viðkomandi móttakarar av upplýsingunum. TAKS skal tí ikki gera nakra ítøkiliga meting av, um tað í ítøkiligum føri er heimild til at lata upplýsingar víðari í sambandi við tað skipaða samstarvið eftir hvítvasklógini. Tað skal heldur ikki gerast nøkur ítøkilig meting, hvørt upplýsingarnar eru viðkomandi fyri allar teir einstøku luttakararnar í skipaða samstarvinum.

Mett verður, at broytingarnar verða við til at fremja tað skipaða samstarvið sambært hvítvasklógini.

Sum dømi um, hvørjar upplýsingar TAKS kann lata víðari til aðrar myndugleikar í skipaða samstarvinum, kunnu nevnast upplýsingar um navngivnar persónar, sum sambært TAKS hava stovnað fleiri fyritøkur, ið verða nýttar til eitt higartil ókent slag av sviki við skatti og avgjøldum, ið verður mett at hava samband við hvítvask. Á tann hátt fer tað at bera til hjá TAKS at luttaka á fundi í tí skipaða samstarvinum og umrøða virksemið hjá persóninum og t.d. orsakirnar til virksemið og arbeiðshættirnar hjá persóninum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 16 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 73
Talan er um eina nýggja áseting. Í stk. 1 verður skotið upp, at persónar, ið virka innan almenna fyrisiting, og sum luttaka í einum skipaðum samstarvi um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi, undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini hava skyldu til at halda trúnaðarupplýsingar loyniligar, sum verða móttiknar í hesum sambandi. Hetta er galdandi fyri m.a. upplýsingar, sum verða móttiknar frá Hvidvasksekretariatet, ríkisløgregluni, SØIK, TAKS, Skráseting Føroya, Tryggingareftirlitinum og Fíggjareftirlitinum. Í stk. 2 verður skotið upp, at tagnarskyldan eisini verður galdandi fyri tann likamliga ella løgfrøðiliga persónin, sum upplýsingarnar viðvíkja, hóast eina møguliga rættarliga skyldu at lata upplýsingarnar víðari til viðkomandi sambært ásetingunum í fyrisitingarlóggávuni ella dátuverndarlóggávuni.

Ásetingin í § 55 a er ein serstøk áseting um tagnarskyldu. Henda áseting avmarkar skylduna at lata upplýsingar víðari eftir løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, og avmarkar í størri mun møguleikan at nýta og lata upplýsingar víðari enn vanliga ásetingin um tagnarskyldu í § 26 í fyrisitingarlógini.

Hetta inniber, at trúnaðarupplýsingar, ið verða givnar í einum skipaðum samstarvi millum myndugleikar, ikki mugu latast víðari uttan at myndugleikin, sum hevur latið upplýsingarnar, gevur sítt samtykki, og myndugleikin, ið móttekur upplýsingarnar, hevur avmarkaðar møguleikar at nýta upplýsingarnar. Vikið verður frá vanligu reglunum í m.a. fyrisitingarlógini í § 9 um partsinnlit, § 18 um partshoyring, § 23 um grundgeving, § 27 um latan av upplýsingum til annan fyrisitingarmyndugleika, § 30 um latan av upplýsingum eftir áheitan og reglum sambært dátuverndarlógini um upplýsingarskyldu og um rætt til innlit.

Hendan skipanin skal tryggja neyðugan trúnað, sum í útgangsstøðinum er neyðugur við atliti til uppgávuna hjá myndugleikunum at fyribyrgja og stríðast ímóti hvítvaski og fígging av yvirgangi.

Ein myndugleiki, sum hevur latið upplýsingar víðari í sambandi við skipaða samstarvið, kann sambært stk. 3 geva samtykki til, at upplýsingarnar verða brúktar í málsviðgerðini hjá einum av hinum myndugleikunum í samstarvinum. Tá myndugleikin, ið móttekur upplýsingarnar, so viðger hesar, eru upplýsingarnar ikki longur fevndar av serstøku tagnarskylduni í § 55 a, stk. 1 og 2. Í staðin eru tá tær vanligu reglurnar um nýtslu og víðarilatan av upplýsingum galdandi fyri hesar upplýsingarnar. Frávikið frá teimum vanligu fyrisitingarrættarligu reglunum er tá heldur ikki galdandi longur. Eingi ávís formkrøv eru galdandi fyri samtykkið frá myndugleikanum, sum hevur latið upplýsingarnar víðari. Sostatt kann samtykkið latast m.a. munnliga, t.d. á einum fundi í skipaða samstarvinum. Viðkomandi myndugleikar mugu í slíkum føri, sum liður í málsviðgerðini, tryggja neyðugt skjalprógv við einum notati, har tað gongur fram, at samtykki er givið, og hvat tað fevnir um.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 17 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 74
Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av broyting í § 43 í hvítvasklógini, har stk. 3 er blivið til stk. 4.

Til § 1, nr. 75
Galdandi áseting í § 59, stk. 1 er ein revisáseting. Í ásetingini er ásett, hvørji brot á hvítvasklógina kunnu verða revsað við sekt. Ásetingin áleggur eisini løgfrøðiligum persónum revsing, og harafturat eru eisini ásetingar um fyrningarfreistina fyri brot á ásetingarnar í lógini og reglur, sum eru settar í gildi við heimild í lógini.

Sum avleiðing av, at tað í uppskotinum verða gjørdar broytingar í §§ 16, 24 og 28, og §§ 30 b og 34 a eru nýggjar ásetingar í hvítvasklógini, verður skotið upp at víðka um ásetingina í § 59, stk. 1, 2. pkt., til eisini at galda fyri brot á hesar ásetingarnar.

Tað merkir, at eitt tilætlað brot ella brot, framt av grovum ósketni, á § 16, § 24 og § 28, § 30 b og § 34 a kann revsast við sekt, uttan so at hægri revsing er uppiborin eftir revsilógini.

Til § 1, nr. 76
Sambært galdandi áseting í § 59, stk. 2, kann revsingin fyri serliga grov ella umfatandi brot á ávísar ásetingar í lógini vaksa til fongsul upp í 6 mánaðir. Skotið verður upp, at revsingin frameftir kann vaksa til fongsul í upp í 2 ár, tá talan er um serliga grov brot ella umfatandi brot á ásetingarnar, sum eftir ásetingini eru revsiálagdar.

Sum avleiðing av, at broytingar verða gjørdar í § 16 í lógini, er neyðugt at broyta tilvísingina til § 16 í ásetingini.

Til § 1, nr. 77
Skotið verður upp, at fyrningarfreistin í málum um brot á ávísar ásetingar í hvítvasklógini fer úr 5 árum upp í 10 ár.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 20 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 78
Sambært galdandi hvítvasklóg hava Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið ikki heimild til at geva fyrisitingarliga sekt. Skotið verður upp, at teir nevndu eftirlitsmyndugleikarnir fáa heimild til at geva fyrisitingarliga sekt.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 21 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 79
Talan er um eina konsekvensbroyting orsakað av broyting í § 38 í lógini.

Til § 1, nr. 80

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 90 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 81
Skotið verður upp at víðka ásetingina í § 61 um tvingsilsráð soleiðis, at ásetingin eisini er galdandi fyri § 36 a, stk. 3, 4, 6 og 7 um skráseting og víðarilatan av upplýsingum um veruligar eigarar. Hetta verður gjørt á tann hátt, at tað verður skotið upp at áseta eitt nýtt stk. 3 í § 61.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 91 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 82

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 22 í 2019/1 LSF 58 í fylgiskjali 3.

Til § 1, nr. 83

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 96 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 84

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 99 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 1, nr. 85

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 100 í 2018/1 LSF 204 í fylgiskjali 2.

Til § 2
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. juli 2023.

Í stk. 2 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær § 1, nr. 18 kemur í gildi. Av tí, at tað er neyðugt at fyrireika og seta í gildi eina kunngerð sambært § 14 a, stk. 3, áðrenn § 14 a fær gildi, og tað eisini er neyðugt, at eigaraskráin hjá Skráseting Føroya verður klár áðrenn gildiskomuna, verður tað mett skynsamt, at gildiskoman verður útsett.

Í stk. 3 verður skotið upp, at ásetingin í § 1, nr. 77 í uppskotinum er galdandi fyri lógarbrot, sum eru framd, áðrenn lógin kemur í gildi. Hetta er tó ikki galdandi, um lógarbrotið eftir higartil galdandi reglum er fyrnað. Í § 1, nr. 77 verður skotið upp, at fyrningarfreistin fer úr 5 árum upp í 10 ár, og verður longda fyrningarfreistin galdandi fyri lógarbrot, ið eru framd, áðrenn gildiskomu lógarinnar, men tó ikki fyri tey lógarbrot, sum eru fyrnað eftir 5 ára fyrningarfreistini, tá lógin kemur í gildi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 27. mars 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: 2018/1 LSF 204
Fylgiskjal 3: 2019/1 LSF 58
Fylgiskjal 4: Hoyringarnotat frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 5: Felagið Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 6: Bank Nordik
Fylgiskjal 7: Lív
Fylgiskjal 8: Tryggingareftirlitið
Fylgiskjal 9: Skráseting Føroya
Fylgiskjal 10: Vinnuhúsið
Fylgiskjal 11: Betri Pensjón
Fylgiskjal 12: Fíggjarmálaráðið